

# Aðalfundur

## 2025

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Tú alfagra land mítt | 3 |
| Starvsnevnd, starvsfólk og umboðsting | 4 |
| Sersambondini | 5 |
| Menningarsambond og nevndaryvirlit | 6 |
| Forsetafrágreiðingin hjá ÍSF 2023 | 7 |
| Býtið, grafar | 18 |
| Umboðstingið | 19 |
| Starvsnevndin | 19 |
| **SERSAMBOND:** | |
| Badmintonsamband Føroya | 20 |
| Bogaskjótisamband Føroya | 22 |
| Borðtennissamband Føroya | 24 |
| Flogbóltssamband Føroya | 26 |
| Fótbóltssamband Føroya | 28 |
| Frælsur Ítróttur Føroya | 30 |
| Føroya Fimleikasamband | 32 |
| Hondbóltssamband Føroya | 34 |
| Judo Føroyar | 36 |
| Kurvabóltur í Føroyum | 38 |
| Parasport Føroyar | 40 |
| Ríðisamband Føroya | 42 |
| Róðrarsamband Føroya | 44 |
| Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon | 46 |
| Skjótisamband Føroya | 48 |
| Svimjisamband Føroya | 50 |
| **MENNINGARSAMBOND:** | |
| Billardsamband Føroya | 52 |
| Boksisamband Føroya | 54 |
| Dartsamband Føroya | 56 |
| Golfsamband Føroya | 58 |
| Klintrisamband Føroya | 60 |
| Poolsamband Føroya | 62 |
| Seyðahundasamband Føroya | 64 |
| Føroya Styrkisamband | 66 |
| Taekwondosamband Føroya | 68 |
| Tennissamband Føroya | 70 |
| Ársroknskapur hjá ÍSF | 73 |



**MYNDIR:**
Gilli Brend í Hoyvík
Ólavur Fredriksen
Ann-Mari B. Mouritsen
Sverri Egholm
Finnur Justinussen

**UPPSETING / SNIÐGEVING:**
Loysnir

**TEKSTUR FORSETAFRÁGREIÐING:**
Eydna Skaale

**RÆTTLESTUR:**
Leivur Frederiksen

# Aðalfundur

## Ársfrágreiðing 2024

### Tú alfagra land mítt

**1.** Tú alfagra land mítt, mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt, á sumri við logn,
tú tekur meg at tær so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar, Guð signi tað navn,
sum menn tykkum góvu, tá teir tykkum sóu.
Ja, Guð signi Føroyar, mítt land!

**2.** Hin roðin, sum skínur á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna, sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

**3.** Eg nígi tí niður í bøn til tín, Guð:
Hin heilagi friður mær falli í lut!
Lat sál mína tváa sær í tíni dýrd!
So torir hon vága – av Gudi væl skírd –
at bera tað merkið, sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

# Sersambondini

## Badmintonsamband Føroya
Katrin Jacobsen, forfólk
Mariann Øster, næstforfólk
Dia Lamhauge, nevndarlimur
Sofía Olsen, nevndarlimur/aðalskrivari
Johnny í Grótinum, nevndarlimur

## Bogaskjótisamband Føroya
Fróði Heri Poulsen, forfólk
Jógvan Niclasen, næstforfólk
Hans Petur Højgaard, nevndarlimur
Pernille Krogh, varalimur

## Borðtennissamband Føroya
Fróði Fríðason Jensen, forfólk
Elinborg C. Mortensen, næstforfólk
Teitur Haraldsen Albinus, kassameistari
Pætur Albinus, skrivari
Hallur Thorsteinsson, nevndarlimur

## Flogbóltssamband Føroya
Peter Holm, forfólk
Guðrun L. Joensen, næstforfólk
Jóhan á Mýruni, nevndarlimur

## Fótbóltssamband Føroya
Christian F. Andreasen, forseti
Róin Schrøter, varaforseti
Anja Rein, nevndarlimur
Maria J. Joensen, nevndarlimur
Heri á Rógvi, nevndarlimur
Jóannes A. Prestá, nevndarlimur
Sólrun H. Sørensen, nevndarlimur

## Frælsur Ítróttur Føroya
Gunnvá Wardum, forfólk
Lovisa Niclasen, næstforfólk
Jorie Josephsen, kassameistari
Karin Kirke Petersen, skrivari
Jógvan K. Glerfoss, nevndarlimur
Kim D. Hansen, 1. tiltakslimur
Sølvi Reinert Hansen, 2. tiltakslimur

## Føroya Fimleikasamband
Pól Esper Hansen, forfólk
Heri Lamhauge, næstforfólk, reiðsskapur
Elin Michelsen, estetiskur fimleikur
Tinna Johannesen, breiddarfimleikur
Malan Mikkelsen, Fimleikafagnaður/-galla

## Hondbóltssamband Føroya
Gunn Ellefsen, forfólk
Jógvan Emil Nielsen, næstforfólk
Heini Ellingsgaard, nevndarlimur
Durita Thomsen, nevndarlimur
Kristian Østergaard, nevndarlimur
Høgni Vilhelmsen, varalimur
Birgir Kass, varalimur

## Judo Føroyar
Sofus Debes Johannesen, forfólk
Kristianna Solberg á Túgvu, næstforfólk
Silja Johannesen, nevndarlimur
Andrias Sumberg, nevndarlimur
Sanna Nolsøe Djurhuus, nevndarlimur

## Kurvabóltsamband Føroya
John Norðbúð Thomsen, forfólk
Anna Jakobsen, skrivari
Sára Isfeldt, kassameistari
Sølvi Olsen á Skúr, nevndarlimur
Magnus Jakobsen, nevndarlimur

## Parasport Føroyar
Petur Elias Petersen, forfólk
Tóra Norðgerð, næstforfólk
Hans Karl Højgaard, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

## Ríðisamband Føroya
Brandur í Dali, forfólk
Zacharias R. Jacobsen, næstforfólk
Valborg H. Laksáfoss, nevndarlimur
Poula Tornby, tiltakslimur
Andrias Nielsen, tiltakslimur

## Róðrarsamband Føroya
Petur Hansen, forfólk
Vár G. Hansen, næstforfólk
Rebekka Jacobsen, skrivari
Mira Klit, kappingarleiðari
Unn Eldevig, nevndarlimur
Henrik Rahbek, nevndarlimur
Jógvan Midjord, eykalimur

## Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon
Arnfinnur Helmsdal, forfólk
Andrass Joensen, næstforfólk
Geyr Gilsteinsson, nevndarlimur

### Skjótisamband Føroya
Esmar Joensen, forfólk
Jón Jacobsen, nevndarlimur
Jónstein Johannesen, nevndarlimur
Jógvan Egholm, nevndarlimur
Tórur Fløtt, nevndarlimur

### Svimjisamband Føroya
Rókur í Jákupsstovu, forfólk
Alvi Hjelm, næstforfólk
Bjørg O. Jensen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Annika J. Olsen, nevndarlimur
Signhild Joensen, íðkaraumboð
Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur

# Menningarsambondini

### Billardsamband Føroya
Markus L. Olsen, forfólk

### Boksisamband Føroya
Martin Meng, forfólk

### Dartsamband Føroya
Annfinn A. Hjaltalin, forfólk

### Golfsamband Føroya
Ingi Samuelsen, forfólk

### Klintrisamband Føroya
Absalon Eysturoy, forfólk

### Poolsamband Føroya
Shehan Andrew Wanniya Bandara, forfólk

### Seyðahundasamband Føroya
Tummas Jacobsen, forfólk

### Føroya Styrkisamband
Heini Hátún, forfólk

### Taekwondosamband Føroya
Noomi Kunoy Heradóttir, forfólk

### Tennissamband Føroya
Ingi Højsted, forfólk

# Nevndaryvirlit

### Olympiska nevnd Føroya
Elin H. Joensen, forseti
Magnus Tausen, varaforseti
Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur
Eva Vilhelm, nevndarlimur
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Edna Maria, nevndarlimur Íðkaranevndin

### Íðkaranevndin
Edna Maria Debes, forfólk
Torkil Veye, varafólk
Hávard Vatnhamar, nevndarlimur
Gunnva K. Jacobsen, nevndarlimur
Sára Maria Johansen, nevndarlimur

### Fíggjarnevndin
Elin H. Joensen, forfólk
Eva Vilhelm, nevndarlimur
Ólavur Ólavsson, nevndarlimur

### Ungdóms- og menningarnevndin
Kerstin Laksáfoss, forfólk
Guðrun Jacobsen, nevndarlimur
Magnus Debess Madsen, nevndarlimur

### Spf. Ítróttavedding
Magnus Tausen, forfólk
Rói Poulsen, varaforfólk
Hjørdis Gaard, nevndarlimur
Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, nevndarlimur
Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur
John Kjær, nevndarlimur
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Elin H. Joensen, stjóri

### Ítróttadómstólur
Anna Rein, forfólk
Sissal Kjartansdóttir Kristiansen, nevndarlimur
Heðin Joensen, nevndarlimur
Jóhan Lamhauge, nevndarlimur
Magnus Dam, nevndarlimur
Jóhan E. Simonsen, varalimur
Andrass Thomsen, varalimur
Anja Kristina Øster, varalimur

### Dopingnevndin
Jónfinn Thomsen, forfólk
Jóhanna Arge, nevndarlimur
Pál Weihe, nevndarlimur
Majbritt Lamhauge, varalimur

### Antidopingnevndin
Jónas Tór Næs, forfólk
Katrin Rubek Nielsen, nevndarlimur
Jóannes Guttesen, nevndarlimur

### Føroya Ítróttasavn
Palli Ziskason, kassameistari
Andrass Mortensen, nevndarlimur
Marjun Hanusardóttir, nevndarlimur
Helena Dam á Neystabø, nevndarlimur
Kristian Johansen, nevndarlimur

### Úrval
Ragnar Joensen, forfólk
Jóhanna á Bergi, nevndarlimur
Katrin Olsen, nevndarlimur
Rannvá Sólheim, nevndarlimur (MMR)
Páll Isholm, nevndarlimur
Petur Mittún, skrivari

### Heiðursskjal Poul E. Petersen
Anna Rein
Óli Holm
Heðin Mortensen
Marjun Kalsø
Signar á Brúnni
Gunvá við Keldu

# Forsetafrágreiðing hjá ÍSF 2024

**- frá mars 2024 til mars 2025**

## 1.0 Vit hava flutt ítróttin - og nú flytir ítrótturin okkum

**Tað gongur væl í føroyskum ítrótti. Vit síggja stóra menning.** Ár um ár síggja vit nærum óverulig úrslit. Vit síggja støðugt fleiri íðkandi - bæði á høgum stigi og á breiddarstigi - og vit síggja støðugt fleiri ítróttatilboð. Áhugin veksur. Tilvitanin veksur. Og vit síggja, at fólk søkja felagsskapin, antin sum íðkarar, hjálparfólk ella áskoðarar. Og tað er kanska ikki so løgið, hyggja vit at dagsins veruleika.

**Felagsskapur og samanhald í eini konfliktfyltari tíð**

Meðan valdsstríð, ósemjur og óvissa merkja okkara tíð, stendur ítrótturin hinvegin fyri friði, virðing og føstum kørmum. Í ítróttinum hava øll ein møguleika, og tað ikki altíð er tann størsti, sum vinnur. Øll hava somu treytir og sama grundleggjandi møguleika. Í ítróttinum hittast fólk úr øllum mentanum og úr øllum heiminum undir felags virðum, og hóast tað mangan er hart, so er tað samstundis eitt undirliggjandi krav, at tað skal vera heiðurligt.

**Tað veruliga heldur enn tað virtuella**

Ítróttur snýr seg um verulig avrik og verulig úrslit. Tað snýr seg um veruligt samanhald og veruligar kenslur. Tú kanst ikki vinna við einum filtri, og tú kanst ikki pallseta eina fyrigyklan um tað lýtaleysa lívið í ítrótti. Sterki felagsskapurin, sum kemst av at íðka í felag - at vinna og tapa saman - kann ikki samanberast við mangan grunna felagsskapin á SoMið.

Í eini tíð, sum er myndað av einstaklingum og djúpum gjáum millum bólkar, skapar ítrótturin eitt rúm, har vit hittast bæði kropsliga og kensluliga -og har ósemjur, meiningar, trúgv, kyn, rasa og geografi  verða hildin uttanfyri. Tað er eitt rúm, sum sameinir, og eitt frírúm frá tí, sum skilir.

Tað, at vera virkin, at kunna gera okkurt til nyttu og tað, at øðrum tørvar okkum, gevur gleði og áræði. Tað, at kunna handla, heldur enn bara at hyggja, ger ósigiligan mun.

**Strategi í verki ger mun**

At handla heldur enn at hyggja var júst tað, vit í felag samtyktu við felags strategiini. Tær avgerðir og gerðir, sum vit í felag hava framt seinastu árini, liggja avgjørt eisini til grund fyri góðu gongdini. Tað, at seta orð á veikleikarnar, finna loysnirnar og síðani handla, ger mun. Tað, at arbeiða í felag fram ímóti felags málum, ger mun. Og tað, at arbeiða við allari heildini - bæði breidd og teimum bestu, bæði úrslitum og felagsskapi, bæði íðkarum og teimum sjálvbodnu - ger mun.

Ringarnir av mongu átøkunum eru farnir at breiða seg. Vit síggja tað. Tað hendir okkurt í Føroyum í løtuni. Bara seinasta árið eru 22 nýggj ítróttafeløg stovnað, og støðugt fleiri sambond og menningarsambond leggjast afturat. Hetta økir um møguleikan at fáa fleiri at vera virkin alt lívið.  Vit merkja stóran stuðul og góða sparring frá myndugleikum, politikarum og vinnulívinum.



Hjá teimum bestu hækkar støðið allatíðina, so úrslitini gerast betri, so áhugin veksur, so fleiri koma at íðka, so fleiri gerast betri. Tað er ein góð ringrás, sum savnar okkum.

Og vit savnast um landsliðini. Vit savnast um øll okkara ítróttafólk, sum standa seg væl. Vit savnast við Tjarnir og í øðrum stásiligum nýggjum ítróttakørmum kring landið. Vit savnast um oyggjaleikirnar, sum nú koma aftur til Føroya, og vit taka til okkum allar tær kenslurnar, sum ítrótturin vekir í okkum. Kanska vit enntá tráa eftir teimum. Kenslur sum erni, vón og felagsskapur, ið ikki akkurát eyðmerkja tíðina, vit liva í, men sum ítrótturin ber okkum.

Vit hava flutt ítróttin, og nú flytir ítrótturin okkum.

Tað hendir okkurt í Føroyum í løtuni.

## 2.0 Nýtt hetta seinasta árið

**Tað eru hend nógv nýbrot í føroyskum ítrótti, síðani seinasta aðalfund. Virksemið úti um landið veksur - bæði tá ið tað kemur til ítróttatilboð, men eisini tá umræður onnur tilboð til íðkarar, venjarar og sjálvboðin.**

### 2.1 Heili 22 nýggj ítróttafeløg

Tilsamans eru nú skrásett 164 ítróttafeløg innan 26 ymsar ítróttagreinar í Føroyum.

Tað er sera gleðiligt, at vit hava so nógv, góð fólk kring alt landið, sum taka stig til at skipa ítrótt fyri øll.

Tað er givið, at jú fleiri feløg eru, jú størri møguleika hava vit at fáa øll við. Tað er eitt mál, tí vit vita, at góðir og væl skipaðir felagsskapir halda børnum og ungum frá øðrum leiðum, sum vit ikki vilja hava tey at fara - umframt heilsugóðu fyrimunirnir við at vera kropsliga virkin.
**Les meira á:** https://isf.fo/felog-i-foroyum/

## 2.2 Poolsamband Føroya nýtt menningarsamband

Poolsamband Føroya er vorðið menningarsamband í ÍSF. Hetta bleiv endaliga staðfest á fundi í ÍSF í juli 2024.
ÍSF gleðist um menningina, sum fer fram í føroyskum ítrótti, og at fólk, sum varða av ymsu greinunum vilja skipa ítróttin betur. Poolsambandið er 26. sambandið í Ítróttasamband Føroya, og tað er at gleðast um, at føroyskur ítróttur støðugt verður betri skipaður.



## 2.3 Nýggj venjaraútbúgving undir ÍSF

ÍSF hevur gjørt samstarvsavtalu við Dansk Idrætforbund viðvíkjandi venjaraútbúgvingunum, sum ÍSF vanliga bjóðar út.
Í fyrsta umfari varð "Venjari-1" útbúgvingin boðin út, og arbeitt verður fram ímóti, at "Venjari-2" verður boðin út komandi ár.
Tað nýggja í hesi útbúgvingini er, at hon er býtt sundur í tveir partar:
- Fyrsti partur er E-læring, har luttakarin skal í gjøgnum fimm ymisk modul: fýra kravd og eitt valfrítt.
- Seinni partur er ein skeiðsdagur við 9 undirvísingartímum, har skeiðsluttakarin møtir til gjøgnumgongd av tilfarinum. Her er talan bæði um teori og praksis.

**Málbólkur og úrtøka:**
Venjari-1 skeiðið er ætlað sjálvbodnum, sum vilja menna sínar venjaraførleikar - eitt nú íðkarum, foreldrum ella virknum venjarum, sum vilja gerast enn betri. Aldursmarkið er 15 ár.
Venjara-1 útbúgving gevur grundleggjandi vitan um m.a venjaraleiklutin, fysiska venjing, ítrótt fyri børn og ung og um ítróttaskaðar. Hon gevur førleikar at vera venjari hjá liðum og einstaklingum á byrjanarstigi og hjá eitt sindur royndum leikarum/íðkarum.

Skeiðið gevur eitt nú:
- amboð til at skapa eitt motiverandi venjingarumhvørvi
- at skilja munin á, hvussu børn og vaksin mennast í venjingini
- at læra at samskifta við ymsar áhugabólkar (íðkarar, foreldur, venjarar og leiðarar)
- at megna at fyrihalda seg til egnan leiklut sum venjari og til ein serstakan málbólk
- at síggja egnar styrkir og veikleikar

Valfría undirvísingin snýr seg eitt nú um:
- Skaðar
- Orkuskipanir í vøddunum
- Kropp og trivnað hjá teimum ungu
- Etingarólag
- Gentur, sum íðka
- Íðkarar, sum bera brek ella hava serligan tørv.

Skeiðsdagar vóru í Havn 26. oktobur í Sankta Frants Skúla og í Eysturoy 17. novembur í Glyvra Skúla, og kostnaðurin var 495,00 kr pr luttakara íroknað miðmála.
Undirtøkan fyri venjaraskeiðunum hevur verið øgiliga góð. Tað ber boð um, at avgerðin at umskipa hana, so hon gjørdist léttari at fara undir, var røtt.

## 2.4 Nýggj ráðgeving: Tryggur ítróttur

Grundarlagið undir nýggju ráðgevingini er, at øll, sum íðka í Føroyum, skulu vera trygg og trívast í sunnum og stuðlandi umhvørvum, bæði tá ið tey venja, og tá ið tey kappast. Tíverri kunnu keðiligar støður kortini koma fyri.
Men nýggja ráðgevingin, Tryggur ítróttur, vil hjálpa feløgum, venjarum, nevndum og íðkarum, so tey betur verða før fyri at lofta slíkum støðum.



Arbeiðið við ráðgevingini verður skipað í tveimum.
Í fyrsta lagi kunnu feløg og sambond fáa hjálp, so tey sjálvi kunnu gera sær hóskandi leiðreglur og eina tilbúgvingarætlan, og vera klár, um okkurt óheppið skuldi stungið seg upp. Øll feløg eiga at hava ein ábyrgdarpersón, ið hevur ábyrgdina av trygd og trivnaði. Tað eru jú nevndirnar, sum hava evstu ábyrgdina av at loysa slíkar trupulleikar, men tað kann vera trupult at koma í gongd.

Í øðrum lagi verður royndi ráðgevin, Ann-Britt F. Mortensen, tøk at sparra við, um fólk ella feløg hava spurningar um ítøkilig mál

– ella um tey ivast, hvat er best at gera.
Í hesum sambandi er ein heimasíða ment, sum bæði kann hjálpa feløgum at fara undir arbeiðið við trygd og trivnaði – og veita ráðgeving.
Tað eru ÍSF og FSF, sum í felag hava tikið stig til ráðgevingina við góðum stuðuli frá hinum sambondunum og Betri Trygging, sum er høvuðsstuðul.

**Ráðgeving og verkstovur**
Bíleggja feløgini verkstovur, koma Ann-Britt F. Mortensen, ráðgevi, og fólk frá ÍSF út at leggja lag á, so feløgini sjálv kunnu fara undir arbeiðið við trygd og trivnaði.
Hin parturin – sjálv ráðgevingin – er uttanveltað og hevur einki tilknýti til ítróttarsambondini. Til ber at senda boð ella kjatta, og einaferð um vikuna ber til at ringja. Alt er í trúnaði, og tað eisini kann vera dulnevnt, um fólk ynskja tað.
Heimasíðan Tryggur ítróttur kann finnast á www.trygguritrottur.fo
Arbeiðið við ráðgevingini "Tryggur ítróttur" er byrjað. Tað tekur tíð at byggja tað upp, men áhugi er fyri arbeiðinum og næsta stigið verður við at koma út til øll feløg í landinum.

### 2.5 Eva Vilhelm nýggjur starvsnevndarlimur

Í Starvsnevndini hjá ÍSF eru nú Elin Heðinsdóttir Joensen, forseti, Magnus Tausen, varaforseti, Kerstin Laksáfoss, Anna Maria Toftegaard og Edna Maria Debes, ið er íðkraumboð - og á eykaaðalfundi hjá ÍSF gjørdist greitt, at seinasti limurin bleiv Eva Vilhelm.



Eva er ættað úr Trongisvági, men hevur seinastu árini búð í Hósvík. Hon er 27 ára gomul og hevur verið sera virkin í kapp-róðri, frá 2020-2023 sum forkvinna í Hósvíkar Róðrarfelag.
Valið stóð ímillum Gunnar Djurhuus, sum Hondbóltssambandið innstillaði, og so Evu Vilhelm, sum Róðrarsambandið innstillaði og sum altso endaði við at draga longra stráðið.

## 3.0 Tey bestu

**Føroyskur úrvalsítróttur heldur á at mennast - í stórt sæð øllum greinum. Vit standa okkum betur og gera vart við okkum í fleiri ítróttagreinum, fleiri aldursbólkum og í fleiri kappingum. Tað krevur meira - men tað gevur eisini meira.**

### 3.1 Nýggj stuðulsskipan

Reglurnar fyri Úrval eru endurskoðaðar. Hetta var eitt av málunum í strategiini hjá ÍSF, og arbeiðið er nú liðugt.

Í bólkinum, sum hevur endurskoðað reglurnar fyri úrval, sótu Elin H. Joensen (forseti), Magnus Tausen (varaforseti), Hávard Vatnhamar (starvsnevndin og íðkaranevndin), Páll Isholm (nevndin í Úrvali) og Petur Mittún (umsitingin í ÍSF). Harumframt bleiv Signar Hilmarsson settur sum verkætlanarleiðari.

Eldra úrvalsreglugerðin, ið hevur verið galdandi síðan 2014, hevði eina tríbýtta stuðulsskipan, har strong krøv um ítróttalig avrik vórðu sett til bólk 1, ið fekk 80 % av stuðlinum. Bólkur 2 hevði væl linari krøv og fekk 20 % av stuðlinum, meðan bólkur 3 fekk 100.000 kr. at brúka til menningartiltøk fyri ung ítróttarfólk við góðum avrikum og ágrýtni.

Nýggja reglugerðin byggir á grundarlagið í eldru reglugerðini, á stuðulsskipanir hjá grannalondum, á gransking innan úrvalsítróttin (eitt nú SPLISS) og á støðuna hjá føroyska úrvalsítróttinum. Stuðulin frá Úrvali verður skipaður í eina stuðulsskipan við fimm stigum, har hvørt stig hevur ymiskar treytir til ítróttarlig avrik og fyrisiting. Krøv verða sett bæði til íðkarar og til avvarðandi samband.

#### 3.1.1 Úrvalssambond

Øll sambond, ið samstarva við Úrval, kunnu kalla seg eitt úrvalssamband og skulu sjálvi í minsta lagi fíggja 25 % av egnum úrvalsvirksemi, og Úrval fíggjar í mesta lagi 75 %. Sum nakað nýtt er peningurin ikki markaður til júst tað ítróttarfólkið ella liðið, ið hevur lokið krøvini, men til sambandið at brúka til sítt úrvalsvirksemi. Eisini verður møguligt at brúka 15 % av samlaða stuðlinum til útgerð, ið beinleiðis verður nýtt av úrvalsíðkarum ella í úrvalsvirkseminum hjá sambandinum.
Aftur at stuðlinum til úrvalssambond fer Úrval at skipa fyri regluligum menningartiltøkum fyri ítróttarfólk við góðum avrikum og ágrýtni. Hesi tiltøk miða eftir ítróttaligari menning og eftir at skapa samstarv, sparring og felagsskap millum ítróttargreinar. Øll sambond hava møguleika at tekna íðkarar og venjarar til hesi menningartiltøk.

#### 3.1.2 Úrvalsmiðstøð

Sum partur av hesi nýggju stuðulsskipan skal ein úrvalsmiðstøð setast á stovn. Hendan miðstøð fer at vera undir støðugari menning komandi árini, treytað av at játtanin til Úrval veksur.
Fyrsta stig í hesari tilgongd er at seta ein úrvalssamskipara, sum skal leggja eina ætlan fyri miðstøðina. Úrvalssamskiparin skal hava viðkomandi hægri útbúgving innan ítrótt og skal virka eftir nýggju stuðulsskipanini, samskipa átøk og tiltøk og standa fyri samstarvinum millum Úrval og úrvalssambond.
Málið er, at miðstøðin fer í gongd í 2025. Í fyrstu atløgu fer miðstøðin at virka sum vitanardepil innan úrvalsítróttin í Føroyum. Eitt nú fer Úrval at samla lækna, fysioterapi, ítróttarsálarfrøði, kostráðgeving, kropsliga venjing, sinnisvenjing, ráðgeving og líknandi tænastur. Sum játtanin til Úrval veksur, verður úrvalsmiðstøðin eisini ein venjingarmiðstøð, sum skapar

karmar hjá úrvalsíðkarum tvørtur um greinar at hittast, samstarva og sparra.
Sum partur av úrvalsvirkseminum miðar ÍSF eftir at seta eina serstaka játtan upp á 200.000 kr. av til løn til úrvalsíðkarar. Úrvalsíðkarar kunnu søkja um lønarstuðul av hesi játtan. Lønarstuðulin skal hjálpa íðkarum í teirra gerandisdegi, so at teir kunnu brúka meira tíð til sín ítrótt og minni tíð upp á arbeiði í eitt tíðarskeið, t.d. undan kappingum. Hesin lønarstuðul er treytaður av, at játtanin til Úrval veksur.

### 3.1.3 Íðkarar á miðnámi

Eisini hevur ÍSF víst á, at verandi fyrisiting av næmingum á miðnámi, sum fáast við úrvalsvirksemi, ikki er nøktandi. Verandi skipan hevur áseting um, at næmingur kann vera 10 dagar burtur frá undirvísing. ÍSF metir, at tørvur er á at fáa eina skipan, har næmingurin fylgir undirvísingini, hóast hann er burtur frá skúlagongdini vegna ítrótt. Í hesum sambandi bleiv ein royndar- og menningarætlan sett í verk á sumri 2023. Skúlarnir skipa eitt ÍSF-tilboð, so at íðkarin kann samskipa skúlagongd og ítrótt. Kravið er, at íðkarin fylgir undirvísingini og fær møguleika at gjøgnumføra gymnasialt miðnám á sama stigi sum onnur. Tilboðið verður skipað sum eitt samstarv millum næming, skúla og ÍSF/sersambondini.

### 3.1.4 Eftirmeting

Nýggja úrvalsskipanin er ein stór broyting frá verandi úrvalsskipan, ið krevur tillagingar í úrvalsvirkseminum hjá Úrvali og hjá sambondunum. Við fyrivarni fyri at Úrval ella sambondini vilja broyta partar av reglugerðini, eftir at hon er samtykt, skal reglugerðin eftirmetast eftir tvey ár. Skipanin bleiv samtykt á aðalfundi 4. mai 2024 og skal eftirmetast á aðalfundi 2026.

## 3.2 Úrvalsstuðul 2025

Nevndin í Úrvali játtaði 1,6 milliónir krónur til úrvalsítrótt í 2025. Pengarnir verða býttir millum sjey sambond. Stuðulin verður veittur sambondum, ið hava prógvað sítt høga støði og arbeiða miðvíst við at menna íðkarar og lið. Við hesum stuðli verður vøkstur stimbraður, og føroyskir íðkarar fáa betri møguleikar fyri at røkka altjóða úrslitum.
Ein týðandi broyting í ár er, at Úrval ikki longur veitir beinleiðis stuðul til einstakar íðkarar ella lið. Í staðin verður stuðulin latin sambondunum, sum síðani hava ábyrgdina av at býta peningin til sínar íðkarar ella lið. Sambondini hava jú best innlit í og yvirlit yvir sítt úrvalsvirksemi, og tí eru kunnu tey best taka avgerðirnar. Nevndin í Úrvali staðfestir eina góða gongd innan úrvalsítróttin, sum ber boð um, at føroyskur ítróttur sum heild er í stórari menning.

Stuðulin fyri 2025 er býttur soleiðis (eftir alfabetiskari røð):

| | |
|---|---|
| Bogaskjótisamband Føroya (Stig 1) | 181.000 kr |
| Fimleikasamband Føroya (Stig 5) | 30.000 kr |
| Føroya Styrkisamband (Stig 2) | 168.000 kr |
| Frælsur Ítróttur Føroya (Stig 5) | 105.000 kr |
| Hondbóltssamband Føroya (Stig 2) | 784.000 kr |
| Svimjisamband Føroya (Stig 2) | 276.000 kr |
| Taekwondosamband Føroya (Stig 3) | 56.000 kr |

Nevndin metir, at føroyskur úrvalsítróttur er í góðari menning, nú fleiri ítróttagreinar arbeiða miðvíst við at menna karmar fyri altjóða kappingar.
Í ár komu umsóknir inn um tilsamans 10,1 milliónir krónur, men avmarkaða upphæddin ger, at ikki allar umsóknir kunnu verða játtaðar uttan tillagingar. Býtið verður grundað á innihaldið í umsóknini hjá hvørjum einstøkum sambandi, talið og vavið av innkomnu umsóknunum. Hugt verður eisini eftir, um úrslitini stava frá kappingum við breiðari luttøku og einum kappingarstøði, sum er á ella tætt við altjóða úrvalsstøði fyri viðkomandi ítróttagrein. Henda heildarmetingin skal tryggja, at stuðulsbýtið er rættvíst og samrøtt við tey mál, sum Úrval hevur sett.

## 3.3 Ítróttating: Hví gevast kvinnur at íðka á høgum støði so nógv fyrr enn menn?

Gentur og kvinnur hava ikki sama fokus, tá ið tær íðka ítrótt, sum dreingir og menn. Skulu vit halda kvinnunum til ítróttin, skulu vit hugsa grundleggjandi øðrvísi, enn vit hugsa um dreingir og ítrótt. Tað var niðurstøðan á fullsetta Ítróttatinginum 2024, sum var hildi í Finsen hóskvøldið 23. mai.
Evnið ”Genturnar, kvinnurnar og tær bestu” hevði stóran áhuga hjá teimum, ið varða av ítrótti í Føroyum, og nógvir áhoyrarir og nógvar ítróttagreinar vóru umboðaðar í salinum. At áhugin var stórur hoyrdist á mongu spurningunum og viðmerkingunum, sum áhoyrararnir høvdu eftir fyrilestrarnar.

**Andras Nolsøe** frá ÍSF legði fyri og greiddi frá, hví hetta evnið var komi á skrá. Andras vísti til kanningina um frítíðarvanar millum føroyingar frá 2021, ið staðfesti ein greiðan mun ímillum tað, sum motiverar gentur í ítrótti – og tað, sum motiverar dreingir. Hjá gentunum sæst, at tað í stóran mun eru sosialar umstøður, sum annaðhvørt fáa tær at halda fram, tá tær gerast tannáringar – ella at gevast. Hjá dreingjum hevur tað ikki sama týdning.

**Hetta var eisini niðurstøðan hjá Eyðvør Klakstein**, ið hevur granskað í, hví tað eru so nógvar gentur, sum gevast at spæla landsliðsfótbólt í tannárunum – í mun til dreingir. Tað vísir seg, at tað sosiala hevur alstóran týdning. Eisini hevur tað týdning, at genturnar ikki síggja nakra framtíð í ítróttinum. Tær hugsa meiri um at fáa sær útbúgving og at klára seg fíggjarliga – og tá er fótbólturin ein forðing, tí hann fer við ov nógvari tíð.

**Danska Christina Roslyng**, sum hevur spælt á danska hondbóltslandsliðnum, hevði framløgu undir heitinum “Trivsel i præstationsmiljø”. Síðani hon gavst at spæla, hevur hon starvast sum sportspsykologisk konsulent og hevur havt samrøður, fundir, lagt strategi osfr saman við kvinnuligu landsliðsleikarunum. Endamálið var, at tað skuldi vera gott at spæla á landsliðnum. Eisini hjá kvinnum. Og har krevst eitt annað fokus, tí

tað fyri kvinnurnar ikki er nóg mikið, at ítróttarligu karmarnir eru góðir. Tað skal eisini vera eitt gott, trygt og sosialt umhvørvi.

**Mark Marcher frá HSF** greiddi frá, at tey í nógv ár hava arbeitt fyri at geva kvinnunum júst tað sama, sum menninir fáa. Men nógv bendir á, at kvinnurnar helst ikki hava tørv á júst tí sama, sum menninir fáa. Sannlíkt hava tær tørv á onkrum heilt øðrum fyri at trívast, mennast og halda á at spæla. Júst hvat tað er, fer HSF nú undir at kanna.

**At enda var sofaprát** við Marjuna Danberg, hondbóltsleikara, Ednu Mariu Debes frá frælsum ítrótti og Kristinu Nattestad frá fótbólti. Orðaskiftið var áhugavert og livandi – eitt nú um avbjóðingar hjá gentum at íðka á høgum støði, um sosiala týdningin á liðnum, um hví tær eru givnar og um hvussu tað ávirkar ítróttin, tá kvinnur fáa børn – í mun til tá menn fáa børn.



## 4.0 Breiddin

**Rørsla, røslugleði og rørsluføri. Sunnir felagsskapir og samanhald. Fólk, sum eru virkin alt lívið. Fyrimunirnir við at raðfesta breiddina - og tryggja breiddaríðkarum góð tilboð - eru óteljandi. Tí er breiddarítrótturin eisini eitt av fokusøkjunum í strategiini "í felag fram ímóti felags málum". Hetta seinasta árið hava verið fleiri átøk og tiltøk á breiddarøkinum fyri at kveikja áhuga og skapa rørslugleði.**

### 4.1 Nýggj breiddarpulja til ítróttin

Ætlanin við breiddarpuljuni er at stuðla tiltøkum, sum fáa fleiri við, skapa trivnað og styrkja felagsskapin og sjálvbodnu fjøldina, fremja inklusjón og integratión – og tiltøkum, sum fremja samstarv tvørtur um feløg ella tvørtur um ítróttagreinar.
Treytin fyri at fáa fígging úr puljuni er, at tiltakið, sum skipað verður fyri, ikki snýr seg um kapping á høgum stigi, men at megintátturin er menning, sosial samvera og felagsskapur í breiðasta høpi.

Elin Heðinsdóttir Joensen, forseti í ÍSF sigur, at tørvur er á eini slíkari pulju til breiddina.
– Vit vita, at feløg og sambond hava nógv góð hugskot, men at tað kann vera tungt fíggjarliga at skipa fyri tiltøkum – serliga hjá smáum feløgum og ítróttagreinum.
Allar ítróttargreinar kunnu søkja úr Breiddarpuljuni, og talan kann bæði vera um sambond og feløg. Við hesi skipanini verður eisini eggjað til samstarv; bæði millum feløg og millum ítróttagreinar. Ein einstakur fyrireikari kann søkja upp til 30.000 kr., men sláa fleiri seg saman um eitt tiltak, ber til at søkja um upp til 50.000 kr.
TI ber at søkja alt árið, og svarfreistin er í mesta lagi 6 vikur.
– Tað er avgerandi, at tað skal vera lætt at søkja og at viðgerðin skal ganga skjótt fyri seg. Tað skal bera til at fara frá hugskoti til handling innan stutta tíð, greiðir Elin H. Joensen frá.
Á aðalfundinum hjá ÍSF varð samtykt at royna breiddarpuljuna í 2024 og síðani eftirmeta arbeiðið í 2026.
Í Breiddarpuljuna verða 500.000 kr. lagdar í árliga.

#### 4.1.1 Átta umsóknir játtaðar av Breiddarpuljuni í 2024

Stórur áhugi hevur verið fyri Breiddarpuljuni, og tá ið avtornaði vórðu átta umsóknir játtaðar, ið vóru mettar at lúka treytirnar um, at megintátturin skal vera menning, sosial samvera og felagsskapur í breiðasta høpi.
Tey, ið fingu játtan vóru:

- Tvøroyrar Borðtennisfelag. Tey søktu um virtual reality brillur, ið tey nýta til tiltøk fyri at skapa áhuga fyri ítróttinum, og til børnini, ið koma at vitja. Brillurnar verða eisini nýttar, tá ið onkur er skaddur, so venjingin kann halda fram, sum vant.
- TB Flogbóltur - Flogbóltsskúli
- Hondbóltssamband Føroya og Flogbóltssamband Føroyar - skeiðsrøð um, hvussu sjálvbodna arbeiðið skal skipast.
- Sumbiar Ítróttarfelag - ískoyti til bát, ið skal vera tøkur hjá øllum bygdarfólkinum
- StÍF - At fáa gongd á hondbóltsfitness fyri fólk í aldinum 45+. Tey venja einaferð um vikuna, og tey íðkandi møta væl upp til venjingarnar, ið gongd kom á við ískoytinum frá Breiddarpuljuni.
- Purkan (Porkeri) - Nýtt lív er blást í gamla ítróttafelagi Purkuna, nú nøkur foreldur í felag eru farin undir at skipa fyri venjing, spæli og rørslu tvær ferðir um vikuna til tveir ymsar aldursbólkar.
- Havnar Svimjifelag - venjingarlega við denti á, at øll skuldu sleppa við, sama hvørjum støði, tey eru á. Legan innibar bæði venjing, fyrilestur um mentala venjing og nógva sosiala samveru, har tey eitt nú royndu seg í øðrum ítróttagreinum.
- Havnar Tennisfelag - útgerð til barnatennis, ið bæði verður nýtt til venjing av teimum yngstu og sum eisini kundi nýtast til Skúlaleikir.

### 4.2 ÍSF hevði opið hús á Torginum í SMS

Í sambandi við ABC vikuna bjóðaði ÍSF til Opið Hús á Torginum í SMS í heystfrítíðini.
At vera virkin í ítrótti er at liva boðskapirnar í ABC fyri sálarliga heilsu. Og tað er staðfest, at tað kann hava týdning fyri lívsvirðið, strongdarstøðið og samlaðu heilsustøðuna hjá okkum, tá vit eru virkin saman við øðrum. Og vit vita eisini, at tann góði felagsskapurin hevur so nógv gott og fyribyrgjandi við sær.
Tí brúkar ÍSF boðskapirnar í ABC í nógvum av okkara virksemi.

M.a. í samband við Skúlaleikir í skúlum kring alt landið.
Í heystfrítíðini bjóðaði ÍSF tí ymiskum ítróttagreinum inn til hugna og spøl á Torginum í SMS. Útgerð varð sett upp, so øll kundu royna seg, og undirtøkan var sera góð.

### 4.3 Skúlaleikir 2024

Skúlaleikir eru komnir í eina góða, trygga legu, og koyra nú eftir skinnarum á 4. ári við bæði menning av ítróttalærarum og stórum kappingardøgum.

Undirtøkan er framúr góð, og aftur í ár var metluttøka, nú væl yvir 2000 næmingar tóku lut.

10 ymsar ítróttagreinar eru nú knýttar at Skúlaleikum. Tær eru: flogbóltur, rógving, badminton, kurvabóltur, frælsur ítróttur og rørslumegi, sum tó ikki var við í 2024. Nýggjar ítróttagreinar fyri miðdeild í ár vóru borðtennis, bogaskjóting, hondbóltur og tennis.

Sum nakað nýtt var hádeild boðin við til Skúlaleikir í ár. Eisini millum eldru næmingarnar var sera góð luttøka, tí yvir 80% av næmingum vóru meldaðir til. Hjá teimum eldru eru Skúlaleikir tó skipaðir nakað øðrvísi, tí tey hava bara ein stóran dag, har tey so kunnu velja seg inn á ymsar greinar við tilsamans 15 ymsum aktivitetum, alt eftir um tey vildu hava eina spennandi, ferðmiklan dag - ella ein meiri róligan rørsludag.
Tey royndu seg við fleiri ítróttagreinum, umframt at bæði sløkkilið og løgreglan høvdu fysiskar royndir við næmingunum. Eisini vóru umboð fyri samstarvspartnerarnar hjá Skúlaleikum við í ymsum kappingum - bæði stjórar og politikarar.
Dagurin var serstakliga væleydnaður og gevur áræði til at halda á við at menna Skúlaleikir.

## 5.0 Oyggjaleikir í Føroyum

**3. til 9. juli 2027 verða Oyggjaleikir aftur í Føroyum, og tað verður okkara størsta ítróttatiltak nakrantíð. Tá fara eini 2.500 ítróttafólk at kappast í 14 ymsum ítróttagreinum. Fyrireikingarnar eru byrjaðar og ganga væl - og áhugin og undirtøkan millum føroyingar er góð**

### 5.1 Oyggjaleikanevndin á vitjan

Fyrsta stóra stigið í oyggjaleikafyrireikingunum í Føroyum varð tikið í døgunum 17.- 22. apríl 2024, tá ið altjóða oyggjaleikanevndin, vanliga nevnd IIGA, kom á vitjan.
Talan var um eina arbeiðsferð, har nevndin vitjaði flestu ítróttahallir, vøllir og breytir, sum metast kunnu at verða tikin í nýtslu, meðan Oyggjaleikir eru í Føroyum. Endamálið er at vísa nevndini ítróttaligu hentleikarnar – umframt at vísa á teir hentleikar, sum annaðhvørt skulu umvælast ella eru í gerð.
Eisini heilsaðu tey upp á umboð fyri lands- og kommunalmyndugleikar, ítróttagreinar og ÍSF - eitt nú hittu tey Føroya løgmann, Aksel V. Johannesen, sum eisini er verji fyri ítróttinum, Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í mentamálum, sum umsitur ítrótt, borgarstjórarnar í Havn, Runavík, Klaksvík og Vága kommunu og aðrar myndugleikar við.

### 5.2 Betri verður høvuðsstuðul fyri Oyggjaleikum í Føroyum

Tá ið 21. oyggjaleikirnir verða í Føroyum í 2027, verður tað við almenna heitinum Betri International Island Games XXI ella Betri Oyggjaleikir.
Umframt navnasamstarvið eru fimm onnur samstørv gjørd, sum fíggjarliga syrgja fyri, at leikirnir eru í góðum hondum. Samstørvini fevna eisini um leikirnar í Orknoyggjum 2025 og Ítróttafagnaðin 2024, 25, 26 og 27. Tað eru Atlantsflog, Bakkafrost, MBM, Smyril Line og SMS, sum saman við Betri Stuðuli fara at gera sítt til, at Betri Oyggjaleikir 2027 verða ógloymandi.
Síðan 1998 hevur skotski bankin NatWest International verið navnastuðul hjá IIGA, og hava oyggjaleikir tí itið NatWest International Island Games í 25 ár. Nú hevur bankin tikið seg burturúr, og seinastu NatWest leikirnir vóru í Guernsey í fjør. Eingin nýggjur IIGA stuðul er funnin, og tí fingu Føroyar høvi til at finna sítt egna navnasamstarv.

### 5.3 Búmerkið avdúkað

Tíðliga á sumri 2024 skrivaði ÍSF út búmerkjakapping til Oyggjaleikir 2027, og 26. september varð búmerkið, sum Robert Gutke av Eiði eigur, avdúkað.
Aldur, vindur, rørslur, breytir og veðrahorn eru nakað av tí, sum sæst aftur í búmerkinum, sum ein samd dómsnevnd valdi millum tey 51 innkomnu uppskotini.




Seks fólk vóru í dómsnevndini. Anna Maria Toftegaard, ÍSF, Barbara M. Lamhauge og Heidi Andreasen, Sansir, Niels Mortensen, Oyggjaleikanevndin 27, Hansina Iversen, næstforkvinna í LISA og Høgni E. Magnussen, grafikari í Kringvarpi Føroya.
Arbeiðið við at gera heimasíðu og samleika til Betri Oyggjaleikir 2027 fer nú í gongd. Samskiftisfyritøkan Sansir hevur fingið ta arbeiðsuppgávuna, og eftir ætlan verður heimasíðan almenn í juli næsta ár, tá ið oyggjaleikirnir í Orknoyggjum eru av.

### 5.4 Oyggjaleikir um alt landið

Í desember 2024 varð greitt, hvar ymsu ítróttakappingarnar vera, tá ið Føroyar hýsa Betri Oyggjaleikum í 2027. Onkur ivamál eru, men yvirskipað eru ítróttakappingarnar endaliga

staðsettar - og kappingarnar verða um alt landið.
Kappast verður í badminton, borðtennis, frælsum ítrótti, judo, kurvabólti, skjóting, súkkling, svimjing og tennis í Havn og nær við Havnina. Kappast verður í bogaskjóting í Miðvági, í fimleiki í Runavík og í flogbólti og triatlon í Klaksvík.




Harafturat verður nógvur fótbóltur á leikunum, og avgjørt er, at fótbóltur verður í Suðuroy, Havn og í meginøkinum annars. Enn hevur FSF tó ikki endaliga gjørt av, hvørjir vøllir skulu brúkast. Oyggjaleikanevndin 27 fegnast um at vera komin á mál við hesi truplu uppgávu, eins og nevndin eisini fegnast um, at leikirnir eru staðsettir kring landið.
Samstundis ásannar nevndin og harmast um, at øll sersambondini ikki hava fingið júst tað, sum tey ynsktu sær.
– Hetta hevur verið drúgt, og tað bar tíverri ikki til at ganga øllum á møti. Við hesi staðsetingini meta vit tó, at flestu ítróttagreinarnar hava fingið bestu møguleikar og hentleikar at avgreiða sínar kappingar á Betri Oyggjaleikum, sigur Oyggjaleikanevndin.

## 6.0 Tiltøk hjá ÍSF

**2024 varð merkt av nógvum útvendum virksemi hjá ÍSF. Stórur partur av tiltøkunum eru beinleiðis í tráð við strategiina og førleikamenning av sjálvbodnum, eins og fokus eisini verður sett bæði breiddina og tey bestu. Undirtøkan hevur verið sera góð.**

### 6.1 Aðalfundur 2024

Tað var væl møtt til ársaðlafundin hjá ÍSF, sum varð hildin leygardagin 4. mai. Fundurin byrjaði við, at forsetin, Elin H Joensen, legði ársrfrágreiðingina fram. Hon legði eitt nú dent á postiva andan, ið merkti føroyskan ítrótt í 2023 – og mongu góðu samstørvini, ið hava verið.

### 6.1.1 Fíggjarligur stuðul til breiddarítrótt

Samtykt varð at skipa eina nýggja Breiddarpulju í ítróttinum, ið skal gera tað lættari hjá feløgum og sambondum at skipa fyri tiltøkum, sum ikki snúgva seg um kapping á høgum stigi, men sum hava felagsskap og ítróttargleði í miðdeplinum. Árliga verða 500.000 kr settar av til Breiddarpuljuna, og søkjast kann leypandi ígjøgnum árið. Søkjast kann um upp í 30.000 kr, um talan er um eitt felag/samband, sum skipar fyri – og upp í 50.000 kr, um fleiri feløg/sambond skipa fyri tiltøkum í felag.
Ein onnur samtykt snúði seg um Úrvalsskipanina, sum hevur virkað í fleiri ár, men sum nú er endurskoðað. Higartil er stuðulin í stóran mun farin til einstøku íðkararnar. Sjálvandi skal einstaki íðkarin framhaldandi vera í miðdeplinum, men frameftir skal nakað eisini falla til tað jørðildið, sum úrvalsíðkararnir spretta úr. Pengarnir skulu í størri mun koma fleiri til góðar og røkka longur. Nýggja skipanin hevur íblástur úr grannalondunum, men er kortini snikkað saman til føroysk viðurskifti.

### 6.1.2 Broytingar í starvsnevndini

Eisini vórðu broytingar gjørdar í Starvsnevndini hjá ÍSF. Hávard Vatnhamar, sum seinastu tvey árini hevur verið formaður í Íðkanarnevndini – og sum tí hevur verið limur í starvsnevndini – verður nú avloystur av Eydnu Mariu Debes.
John Kjær, sum í eitt mannaminni ótroyttiliga hevur arbeitt fyri føroyskan ítrótt herheima og í oyggjaleikahøpi, tók ikki við afturvali.

### 6.2 ÍSF á ferð við tiltøkum um sjálvboðið arbeiði

Tey sjálvbodnu eru grundarlagið undir øllum ítróttalívi og øllum ítróttafelagsskapum í Føroyum. Uttan tey bar einki til, og tí er tað fest í strategiina, at vit skulu fjálga um tey sjálvbodnu.
Tí skipaði ÍSF í døgunum frá 23.-29. oktober 2024 fyri tiltøkum kring landið, ið setti fokus á tey sjálvbodnu og týðandi arbeiði teirra. Danin, Jesper Frigast Larsen, kom til Føroya at tosa um “Frivillighed under pres”.
Jesper hevur arbeitt innan ítrótt alt sítt lív. Fyrst innan danska golfsambandið, síðani sum ítróttarábyrgdari hjá Team Danmark og at enda hjá Dansk Idræts Forbund, har hann eitt nú hevði ábyrgdina av OL-luttøkuni hjá Danmark fleiri ferðir.
Á øllum tiltøkunum var eisini sofaprát við ymisk lokal sjálvboðin, sum greiddu frá sínum upplivingum í føroyskum ítróttalívi.
Tiltøkini vóru ókeypis og vóru ætlað nevndarlimum, venjarum, íðkarum, foreldrum og øðrum áhugaðum kring landið.
Tiltøkini vóru á hesum støðum og við hesum sjálvbodnu:
23. oktober, Ítróttarhúsið á Svangaskarði.
**Eldsál:** Hanna Olsen, Víkingur
24. oktober, Trongisvágs skúli.
**Eldsál:** Otto Gram, TB Flogbóltur
27. oktober, Skúlin á Giljanesi.
**Eldsál:** Christina Ravnsfjall , 07 Vestur
28. oktober, Skúlin á Skúlatrøð.
**Eldsál:** Sonja Kjølbro, Klaksvíkar Róðrarfelag
29. oktober, Kantinan hjá Føroya Tele í Hoyvík.
**Eldsálir:** Jógvan K. Glerfoss, Bragdið &
Súsanna Maria Hansen, B36

### 6.3 ÍSF skipar skeið fyri nevndarlimir

Á vetri 2024 fór ÍSF undir at bjóða skeið fyri nevndirnar í sambondum og ítróttafeløgum. Tað er í tráð við strategiina hjá ÍSF, ið eitt nú snýr seg um at menna sjálvbodna arbeiðið í sambondunum og ítróttafeløgunum kring landið, og áhugin hevur verið

sera stórur - helst tí at tað eru sera nógvar nevndir, men sera fá mennandi tilboð til júst nevndarlimir.
Innihaldið í nýggja skeiðnum er millum annað:
- Nevndararbeiði - hvat er tað?
- Hvat skulu vit hugsa um, tá ið vit seta fólk í starv?
- Hvussu fáa vit fleiri sjálvboðin?
- Ársætlan
Fyrsta skeiðið var hildið fyri nevndini í Róðrarsambandi Føroya, og fleiri skeið eru á skrá í 2025. Tey eru stórt sæð fullteknað. Undirtøkan hevur verið sera góð og skoðsmálini, sum skeiðið hevur fingið, eru somuleiðis sera góð. Hetta prógvar stóra tørvin á at førleikamenna mongu nevndarlimirnar, ið fyri tað mesta eru sjálvboðin.
Tað eru ítróttaráðgevararnir hjá ÍSF, Katrin á Neystabø og Andras Nolsøe, sum hava skeiðið.

### 6.4 Ítróttaráðstevnan: Frá spælandi børnum til stór avrik

**"Børnini, breiddin og tey bestu". Hesin setningur er endurtikin aftur og aftur, síðani vit í 2022 gjørdu okkara felags strategi fyri føroyskan ítrótt. Hetta var eisini yvirskriftin til ítróttaráðstevnuna 2025, sum var í Kongshøll 31. januar – og sum ÍSF og Setrið í felag skipaðu fyri.** Upptøkur frá uppleggunum síggjast á heimasíðuni hjá ÍSF.



#### 6.4.1 Generation Sunde børn

Louise Thirstrup Thomsen er partur av einum stórum granskingartoymi í Danmark, sum júst nú hyggur at rørslu, kosti, skerm- og svøvnvanum hjá skúlabørnum. Endamálið er at kanna, hvussu vit skapa karmarnar fyri heilsufremjan millum børn. Hvussu kunnu vit taka ítøkilig stig til at venda rákinum, ið bara gongur skeiva vegin?

#### 6.4.2 Rørsluvon børn

Bára Danielsen, Námslektari á Námsvísindadeildini, arbeiðir við nýggjari gransking – m.a. saman við m.a. Helga Winther Olsen. Tey kanna, hvussu vit kunnu tryggja rørslu í skúladegnum, og hvat tað er, sum ger, at børn finna gleði úti í náttúruni og í rørsluspølum. Málið er at skapa rørsluvon børn og rørlsuførar føroyingar – rørsluføroyingar, sum tey rópa tað.

#### 6.4.3 Rørsla sum námsfrøðiligt amboð í gerandisdegnum

Á stovninum í Vestmanna, sum Morten Hust Petersen er leiðari á, taka tey rørslu í størsta álvara. Tað er partur av uppgávunum hjá starvsfólkinum at skipa fyri ella eggja til rørslu – antin skipaðari ella í fríum spæli. Har skulu tey starvsfólkini eisini vera við í spælinum, heldur enn at hyggja at børnunum, meðan tey spæla.
Á stovninum í Øksnagerði, har Tórunn Dánjalsdóttir, motorikvegleiðari, er leiðari, verður eisini dentur lagdur á nógva rørslu, men ikki eins skipað, sum í Vestmanna. Har er tað meira í fríum spæli og í størri mun, har tað hóskar inn í gerandisdegin.

#### 6.4.4 Møguleikar fyri rørslukanningum

Magni Mohr greiddi frá rørslukanningum við Tjarnir við sonevndari tracking. Hann nevndi, at vit kunnu nýta amboð og umstøður hjá úrvalsíðkarum til eisini at kanna fólkaheilsu hjá børnum, vaksnum, eldri og sjúklingum. Eitt nú vísir slík tracking, at børn í fríum fótbóltsspæli kýta seg eins nógv, sum børn í skipaðari venjing. Tað er hent at vita, tá ið venjingar skulu skipast.



#### 6.4.5 Venjing, tá ið kroppurin stendur í vøkstri

Eftir steðgin frættu vit um nýggj norsk granskingarúrslit – t.d. hvussu børn og ung, sum standa í vøkstri, eiga at venja. Halvard Grendstad greiddi frá, at børn fáa lítið burturúr, um vit venja tey hart, meðan tey standa í vøkstri. Tá er skilabetri at venja motorikk, rørsluføri, umframt teknikk og taktikk. Í 12-14 ára aldri gerst venjingin ofta harðari, og tá síggjast nógvir skaðar og ungir íðkarar eru í vanda fyri at brenna út. Men lata vit børnini spæla og hava tað stuttligt – gevur tað teimum nett tað sama, sum vandu tey harða styrki og konditiónsvenjing.

#### 6.4.6 Góð ráð frá topp-íðkarum

Jónas Isaksen, Bjarta Johansen, Elisabeth Erlendsdóttir og Viljormur Davidsen styðjaðu undir sama boðskap: Hav tað stuttligt, íðka ymsar greinar og hugsa meira um sosiala partin enn um úrslit. Síggj hugvekjandi filmin.

#### 6.4.7 Burðardyggar ítróttaleiðir

Signar Hilmarson vísti á altjóða gransking við sama boðskapi. Latið børnini spæla, hava tað stuttligt og íðka ymiskt. Hann setti spurningar sum: Hvussu skipa vit venjingina hjá einstaka

barninum, hvør skal taka ábyrgdina av venjingarmongdini, og hvussu samstarva feløg og sambond tvørturum ítróttagreinar fyri at tryggja burðardygga venjing?

### 6.4.8 Tað, sum tykist best her og nú, fer at minka um menningina í longdini

Eftir ráðstevnuna stóð ein klárur boðskapur eftir: Børn hava tað íborið at røra seg og spæla. Vit skulu bara tryggja karmarnar í gerandisdegnum og á stovnum. Og tá tað snýr seg um børn í ítrótti, so skal okkara fremsta ambitión vera stuttleikin og kærleikin til spælið – og ikki úrslitið her og nú – tí soleiðis fáa vit bestu úrslitini longur frammi í tíðini, tá ið tað veruliga hevur týdning.

### 6.5 Ítróttafagnaðurin 2024

Leygarkvøldið 1. februar 2025 var Løkshøll í Runavík karmur um ÍtróttaFAGNAÐIN, sum ÍSF skipaði fyri. Tey, ið vórðu tilnevnd og heiðrað, eru bæði úrmælingar innan sína ítróttargrein og fólk, ið eru savnandi og mennandi fyri føroyska ítróttarlívið.
Seks heiðurslønir vórðu lætnar, umframt Heiðursskjal Poul E. Petersen.



### 6.5.1 ÍtróttaNAVNIÐ 2024: A-landsliðið hjá kvinnum í hondbólti

28. novembur til 15. desember luttók føroyska A-landsliðið hjá kvinnum fyri fyrstu ferð í einum endaspæli.  Føroyar spældu í bólki D í Basel í Sveis. Úrslitini vóru eitt tepurt tap móti Sveis, javnt móti Kroatia og at enda eitt tap móti Danmark, sum rakk finaluni.
Føroyar gjørdust nr. 3 í bólkinum og samanlagt nr. 17 av 24 londum. Hetta hevur við sær, at Føroyar eru styrkimettar í ovara lagnum undan lutakastinum til HM play off dystirnar í apríl 2025.
Sjey teirra, sum vóru við til EM, spæla yrkis- ella sáttmálahóndbólt í fremstu donsku deildini, sum er millum heimsin sterkastu. Áhugin fyri kvinnunum er sera stórur og omanfyri 400 føroyingar vóru til dystirnar.
Hini tilnevndu vóru: rógvarin Sára Maria Johansen og rógvarin Sverri Sandberg Nielsen.

### 6.5.2 STJØRNUSKOTIÐ 2024: Svimjarin Líggjas Joensen

16 ára gamli Líggjas Joensen hevur havt einstandandi framgongd seinastu árini.
Hann fekk fott úrslit til HM á langgeil í Katar. í Apríl var hann til Danish Open, har hann vann fleiri gull, silvur og bronsur. Í juni/juli var hann til NMU í Finnlandi, har hann vann tvær gull, eina silvur og eina bronsu. Í november/desember svam hann til NJM, har hann vann eina gull og tvær silvur – og at enda svam hann á stuttgeil til HM í desember, har hann fekk eitt 32. pláss, sum kvalifiserar til úrval á 2. stigi. Hartil koma heiðursmerkini, hann hevur vunnið til liðkappingar.
Líggjas eigur fleiri føroysk met og juniormet. Nú kappast hann um metini, sum Pál Joensen eigur, og hóast tað er ein trupul uppgáva, nærkast hann í hvørjum.
Hóast sín unga aldur hevur hann svomið seg til gullnál við stjørnu hjá SSF, sum er fyri besta avrik yvirhøvur, umframt hann hann rakk 800 AQUA-stig, sum eisini er ein sjáldsamur heiður.
Hini tilnevndu vóru: Maria Pálsdóttir Nólsoy, hondbóltur, og Mia Højgaard, amboðsfimleikur.

### 6.5.3 ÍtróttaELDSÁLIN 2024: Hildigarð Eliasen, ÍF

Hildigarð Eliasen hevur nógv nøvn: ÍF-kemparin, ÍF-mamman, ÍF-omman, Frú ÍF, Ársins ÍF-fjeppari, samskipari, peningarøkil, ábyrgdari av tombola – bara fyri at nevna okkurt úr rúgvuni. Hildigarð hevur ríkað ÍF í ein mansaldur við nærveru og ágrýtni, og hon hevur altíð gjørt tað við ítróttarliga andanum í miðdeplinum. Tað munnu vera fá í føroyska fótbóltsumhvørvinum, sum antin ikki hava hoyrt um Hildigarð. Hon er bæði kend fyri sítt álvarsemi, speisemi og at hon ongantíð er bangin fyri at siga sína hugsan.



Hildigarð syrgdi í áravís fyri, at ÍF altíð var ein góður vertur, at dómararnir vóru í lagi og at okkurt altíð var til matna, sama um talan var um 8 ára gomul ella tey á bestu liðunum. Hildigarð byrjaði at hjálpa til, meðan maðurin var virkin og børnini spældu. Hóast Hildigarð nú er komin væl til árs við sínum 77 árum, loysir hon framvegis uppgávur fyri ÍF.
Hini tilnevndu vóru: Súsanna Maria Hansen, B36, og Marlon Kjærbo, SuSvim.

### 6.5.4 ÍtróttaVENJARIN 2024: Jóhan Petur Poulsen, Víkingur

í 2024 leiddi hann Víking til FM við sínum skarpa fótbóltsheila, treiskni, áhaldni og taktiska snildni.
Men Jóhan Petur Poulsen er so nógv meira enn tað. Hann er ein felagsins maður, har samanhald er gandaorðið. Hann veit, at skal eitt miðalstórt felag sum Víkingur gera seg galdandi í fótbólti, so telja allir smálutir. Tú hittir hann í Víkinga-húsinum ella við vøllin so at siga sólaringin runt, bæði til dystir og til venjingar hjá øllum liðum og árgangum í felagnum. Hann hevur fingurin á pulsinum og varnast tíðliga gávuríkar leikarar – bæði á dreingja- og gentusíðuni.
Harafturat virkar hann eisini sum høvuðsungdómsvenjari í felagnum og leggur dent á menningina hjá ØLLUM í felagnum – bæði breidd og elitu. Hann arbeiðir hart, er nærlagdur, seriøsur. Hann er ein sannur fongur fyri felagið.
Hini tilnevndu vóru: Súsanna Maria Hansen, B36, og Marlon Kjærbo, SuSvim.

### 6.5.5 ÍtróttaFELAGSSKAPURIN 2024: Flogbóltsfelagið Ternan

Í flogbóltsfelagnum Ternuni á Toftum hevur tilgongdin seinastu árini verið metstór, tí felagið er merkt av opnum og inkluderandi hugburði. Breidd og trivnaður verða raðfest høgt, og øll kunnu luttaka og menna seg í felagnum. Eitt ábyrgdarfólk er knýtt at hvørjum liði og skipar fyri felags kappingum og sosialum tiltøkum. Hetta ger, at leikarar, venjarar og sjálvboðin kenna seg sum ein virknan part av einum góðum felagsskapi.
Hóast felagið bara hevur virkað í knøpp 15 ár, hevur tað kortini 180 limir og lið í flestu deildunum – eisini bestu deildini hjá kvinnum og monnum.
Venjararar og umstøður til ungdómsliðini eru góð, og fleiri av ungdómsliðunum hava vunnið heiðursmerki. Eisini hevur verið boð eftir leikarum í landsliðshøpi.
Sjálvt tey, ið eru yngri enn 6 ár, kunnu ganga til familjuflogbólt saman við foreldrunum.
Felagið er væl skipað – bæði tá tað kemur til dómarar, fólk at skriva upp, gera klárt osfr. Leikarar døma regluliga, tá onnur lið spæla, tí hetta styrkir felagskensluna og er eisini ein menning í sær sjálvum.
Hini tilnevndu vóru: Dartsamband Føroya og Hósvíkar Róðrarfelag.

### 6.5.6 ÍtróttaSÓLSTRÁLAN 2024: Lea Sundberg Eliasen – Fimleikafelagið Ljósið

Lea var í ársins venjaratoymi í estetiska fimleikinum í 2024 og er bæði sum íðkari og venjari ein stór fyrimynd. Bæði við sínum góða morali, hjálpandi anda og síni stremban eftir menning - bæði fyri íðkararnar og seg sjálvai. Sama hvørjii úrslitini eru til kappingar, so er hugurin at halda fram og at kveikja hugin hjá íðkarunum altíð tann sami.
Lea blæsir lív í felagið, og hon livir og andar estetiska fimleikin og Ljósið. Í árinum, sum fór, var hon venjari á fleiri liðum, samstundis sum hon íðkaði sjálv.

### 6.5.7 Heiðursskjal Poul E. Petersen varð latið Niklas á Líðarenda

Ítróttasamband Føroya lat í ár Niklas á Líðarenda heiðursskjal Poul E. Petersen fyri hansara megnar arbeiði fyri føroyskan ítrótt. Bara tríggjar mánaðir seinni, 5. mai 2025, andaðist Niklas á Líðarenda eftir stutta sjúkralegu, 69 ára gamal.
Dómarar fáa sjáldan rós, og hetta er júst tað, sum gjørdi Niklas so serligan; at hann í samfull 43 ár var ein fyrimynd og undangongumaður innan dómarayrkið.




Niklas dømdi í bestu føroysku deildini frá 1981 til 2003 – samfull 22 ár. Eftir hetta dømdi hann lægri deildirnar í 6 ár, inntil hann gavst sum dómari. Men síðan hevur Niklas verið dómaramennari og dómarainstruktørur, og hevur hann fingið fleiri hundrað fólk at taka dómaraprógv í Føroyum. Eisini hevur hann ment dómarar á øllum stigum her á landi og uttanfyri landoddarnar.
Niklas er skrásettur dómari í 1.266 fótbóltsdystum í føroyskum og evropeiskum kappingum – umframt óteljandi dystirnar, hann hevur dømt í yngru deildunum, sum ikki eru skrásettir nakrastaðni. Eisini hevur Niklas sitið í dómaranevnd FSF's, har hann hevur flutt dómaragerningin í Føroyum fram á leið, og eisini var hann eitt skifti varaforseti í FSF.
Hóast hann táttaði í tey 70, sást hann á vøllinum einar 10 ferðir farna kappingarár.
Endamálið við at lata heiðursskjal Poul E. Petersen er at heiðra eldsálir í føroyskum ítrótti, og fyri henda heiðurin fekk Niklas eisini gullnál ÍSF. Ærað verði minnið.

### 6.5.8 Høvuðsstuðar hjá ÍtróttaFAGNAÐINUM 2024

Høvuðsstuðlarnir til Ítróttafagnaðin vóru: SMS, MBM, Bakkafrost, Betri, Atlantic Airways, Smyril Line og Runavíkar Kommuna.

### 6.6 Ítróttafagnaðurin flytir til Klaksvíkar

ÍSF leggur dent á, at Ítróttafagnaðurin skal ferðast kring landið.

Fyrsti faganaðurin varð hildin í Smæruni í Havn í 2018, og síðani hevur hann verið hildin eitt nú í Fuglafirði, í Norðurlandahúsinum og í Runavík.
Í februar 2025 undirskrivaðu Karl Johansen, borgarstjóri í Klaksvík, og Petur Mittún, aðalskrivari hjá ÍSF, undir sáttmála, sum staðfestir, at komandi trý árini verður ítróttafagnaðurin í Varpinum í Klaksvík.
Næsti Ítróttafagnaðurin verður 7. februar 2026.

### 6.7 Heiðurstekin frá ÍSF

ÍSF heiðrar javnan fólk, sum hava gjørt eitt serstakt og stórt arbeiði til frama fyri føroyskan ítrótt. Í 2024 vóru fýra menn heiðraðir fyri sítt serstaka og virðismikla íkast við gullnál ella heiðurskrossi.

### 6.7.1 Heiðurskrossur ÍSF latin John Kjær

Fyri sítt drúgva arbeiði føroyskum itrótti at frama fekk John Kjær á aðalfundinum heiðurskross ÍSF, sum er hægsta heiðursmerkið, ÍSF kann lata. Hann hevur tænt føroyskum ítrótti og ÍSF á ósjálvsøknan hátt, og í heilsan síni takkaði Elin H. Joensen John Kjær fyri rúgvismikla arbeiðið hesi mongu árini – og hon fegnaðist í sama viðfangi um, at hann kortini framhaldandi verður ráðgevi hjá Oyggaleikafyrireikingarnevndini.



### 6.7.2 Gullnál latin Esmari Joensen

Á eykaaðalfundinum bleiv gullnál handað Esmari Joensen, formann í Skjótsambandi Føroya. Esmar hevur verið formaður í Skjótsambandinum síðani 2018.

### 6.7.3 Gullnál latin Niklasi á Líðarenda

Í sambandi við, at Niklas á Líðarenda fekk Heiðursskjal Poul E. Petersen á Ítróttafagnaðinum, fekk hann somuleiðis gullnál fyri sítt stóra og drúgva arbeiði føroyska dómaragerninginum at frama.

### 6.7.4 Gullnál latin Kai Roest

Kai Roest varð somuleiðis heiðraður við gullnál og heiðursbrævi ÍSF í 2024 fyri sítt stóra arbeiði fyri borðtennis - bæði á Tvøroyri og í landshøpi.




## 7.0 Endi

**Tað er púra greitt. Tað gongur væl í føroyskum ítrótti og vit síggja eina stóra menning**
Vit kunnu nú taka samanum enn eitt ár við stórari framgongd, bæði hvat ið viðvíkur íðkarum, feløgum, sambondum, úrslitum og tilviti millum fólk.
Tað er helst ein samanrenning av nógvum faktorum, sum hevur elvt til hetta.
Men tað er ein sannroynd, at ítrótturin ber okkum nógv av teimum virðum, sum ikki standa sterk í tíðini, vit liva í júst nú. Felagsskap. Virðing. Og greiðar reglur.
Og tað er eisini ein sannroynd, at tað er hent ómetaliga nógv í ymsu sambondunum og ítróttagreinunum, ið arbeiða eftir strategiini og nú síggja ringarnar av arbeiðinum.
Tað verður ómetaliga spennandi at síggja, hvat komandi árini fara at bera okkum. Og tað áliggur okkum ein stór ábyrgd at halda góðu gongdini.
Men niðurstøðan fyri hetta farandi árið má vera hendan:
Vit hava flutt ítróttin - og nú flytir ítrótturin okkum.

# Býtið 2019-2025




# 2024: Býtið, Altjóða puljur og Úrval



# Umboðstingið



# Starvsnevndin



# Badminton

Badmintonsamband Føroya / bsf@bsf.fo / Tel 582300 / www.bsf.fo

**Saman við landsliðsvenjaranum skipa vit nøkur venjaraskeið/hugskotsdagar til tey, sum eru venjarar hjá leikarum kring landið. Vit hava tosað við Badminton Danmark um venjaraskeið.**

## Strategi

**Breidd - Úrval - Sjálvboðin - Ítróttagleði:**

Vit eru partur av Skúlaleikum og Parabadminton. Bæði samstørvini eru gevandi og skapa nýggj sambond við okkara ítrótt. Nógvir ungir leikarar eru farnir at spæla badminton, eftir at vit fóru í samstarv við ÍSF um Skúlaleikir.

Viðvíkjandi parabadminton hevur virksemið stóran týdning fyri okkum. Vit hava fyri stuttum sent teimum nýtt uppskot um samstarv. Vit hava eisini skaffað teimum tveir nýggjar parabadmintonvenjarar til komandi ár.

Hetta kappingarárið hava vit havt tríggjar breiddarvenjingar fyri leikarar úr U11, U13, U15 og U17/19. Hesir spælarar hava vant við góðum venjara - saman við spælarum úr øðrum feløgum. BSF hevur fingið nógvar positivar afturmeldingar um okkara breiddarvenjing, har ætlanin altíð var at skipa eina stuttliga og øðrvísi venjing fyri breiddina, sum eisini kann styrkja samanhaldið og ítróttagleðina millum feløgini.

Skipað talentvenjing verður fyri U15, U17 og U19 úrvalsleikarar. í 2024 høvdu vit seks talentvenjingar.

Bruttohópurin hjá seniorum vandi eina ferð um vikuna. Í fyrru helvt var tað hjálparlandsliðsvenjarin, sum vandi bruttohópin. Rúni Øster vandi talenthópin. Tá ið kappingarárið 2024/25 fór ígongd, hevði BSF gjørt sáttmála við Wong Fai Yin, sum nú er okkara landsliðsvenjari. Wong hevur ábyrgdina av øllum landsliðsvenjingum, meðan Erland Poulsen hevur havt talentvenjingarnar.

Vit royna at skipa kappingar fyri flest allar úrvalsleikarar uttan fyri Føroyar. U15 er til kapping eina ferð um árið, U17/19 er til kapping tvær ferðir um árið, meðan seniorspælarar fara oftari. Somuleiðis eggja vit spælarum til sjálvir at fara uttanlands. Eitt mál er at stuðla yngri spælarum, so at tey mennast til at fara til Future Series kappingar, og at stuðla teimum, sum hava aldur og ynskja at fara til m.a Future Series kappingar

Sjálvboðin eru ein styrkur hjá badminton, sum vit upp á ongan máta kunnu vera fyriuttan. Orka hevur ikki verið til at arbeiða við hesum í ár - heldur ikki fíggjarliga.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

4 FM fyri børn og ung: í einmansleiki, FM-lið, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.
4 kappingar í blandaðum tvímansleiki - allir aldursbólkar.
4 kappingar í tvímansleiki - allir aldursbólkar.
5 Grand Prix kappingar í einmansleiki fyri børn, ung og vaksin.
3 FM fyri seniorar: í einmansleiki, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.
3 U9 kappingar, har øll luttakandi fáa heiðursmerki.
Badminton Europe summarlega og lið-kapping - saman við Íslandi og Grønlandi.
Stuðla HBF, tá ið íslendingar komu til kapping í Havn fyri U15 og U17 í mai 2024.

**Kappingar í uttanlands:**

Januar 2024 - Kapping í Århus, seniorar
Januar 2024 - Future series Reykjavík januar 2024 senior
Mars 2024 - Odense - kapping fyri seniorar
Mars 2024 - ISI cup, Danmark, kapping fyri U17 og U19
Mai 2024 - Farum ungdómsleikarar, U15
Okt./nov. 2024 - Small Nations á Kýpros - kapping fyri seniorar
November 2024 - Invitational Games á Malta - kapping fyri U17/U19 (seinast fødd í 2006)

## Virksemi annars

Í 2024 eydnaðist tað okkum at fáa samstarv við Grønland og Ísland um North Atlantic Camp. Legan er stuðlað av Badminton Europe (BEC). Í Høllini á Hálsi frá 5. - 11. august. Talan var um sera væleydnaða venjingarlegu og liðkapping, har 40 leikarar, 10 venjarar og ferðaleiðarar vóru sera væl nøgd. Í 2025 verður legan í Íslandi. Legan er fyri U15- og U17 leikarar.

Vit hava eisini sent tveir leikarar til Summer School, sum er ein Badminton Europe-summarlega. BEC vil, at arbeitt verður fram móti, at javnstøða er millum dreingir og gentur, tí senda vit sum oftast ein drong og eina gentu.

Í 2023 var Small State fyri fyrstu ferð hildið. Kappingin var á Malta. Føroyar stóðu seg væl og fingu eitt flott fjórða pláss. Í 2024 var kappingin í Kýpros. Bólkurin, sum vit vóru í, var sera sterkur, men vit kláraðu at blíva nummar tvey í okkara bólki eftir ein sera spennandi dyst móti Íslandi. Vit blivu nummar fýra í samlaðu kappingini.

Í ár hava vit havt Shuttle time undirvísing á Sandi. Hetta hevur



**Nevndarforfólk:**
Katrin Jacobsen

**Nevndarlimir:**
Mariann Øster, næstforfólk
Dia Lamhauge, nevndarlimur
Sofía Olsen, nevndarlimur/aðalskrivari
Johnny í Grótinum, nevndarlimur

**Aðrar nevndir:**
**Kappingarnevnd:** Leggur allar kappingar tilrættis sambært galdandi reglugerð
Rikke Berg Larsen
Arnhold Olsen

**Dómsnevnd:** Viðger og kann taka avgerðir í kærumálum
Fróði Hansen
Aksel Poulsen
Magnus Gaard

**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Sofía Olsen, aðalskrivari | 0,2 |
| Aksel Poulsen, fíggjarfólk | 0,1 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

verið sera væl fyriskipað av Bjørg Djurhuus, Guðruni Jacobsen og Sofíu Olsen. Nógv luttóku, og síðani hava vit fingið fyrispurningar um badmintonútgerð frá spírandi felagnum á Sandi. Shuttle time er eisini partur av okkara BEC-samstarvi. BSF hevur havt forfólkafundir saman við feløgunum nakrar ferðir um árið, so at vit vita, hvat er á skránni hjá feløgunum. Vit hava somuleiðis endurnýggjað okkara Grand Prix-reglugerð vegna økt leikaratal - serliga hjá teimum vaksnu. Í ár hevur ein nýggjur hópur av vaksnum C-leikarum luttikið í okkara Grand Prix.

## Framtíðarætlanir

Arbeiða við at fáa Small State kappingina til Føroya.
Arbeiða við fyrireikingum til Oyggjaleikir í 2025, og 2027 í Føroyum.
Arbeitt verður við at fáa nýggjan venjara til feløgini uttan fyri Havnina.
Sosial átøk fyri sjálvboðin og spælarar.
Framhaldandi úrvalsvenjingar við ungdómslandsliðunum frá U15, U17 og U19.
Framhaldandi vikuligar venjingar fyri seniorar
Saman við landsliðsvenjaranum skipa nøkur venjaraskeið/hugskotsdagar til tey, sum eru venjarar hjá leikarum kring landið.
Hava tosað við Badminton Danmark um venjaraskeið.
Gera facebook-bólk til leikarar, har tey kunnu samskifta um badmintonlegur og kappingar uttanlands, so at tey kunnu hjálpa hvørjum øðrum við at velja, hvat ið er vert at fara til.
Luttaka í kappingum í Danmark og aðra staðni í Evropa, so at okkara spælarar vinna enn fleiri stig í Future Series.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| HBF | 400 |
| KBF | 100 |
| ÍF | |
| MBF | 50 |
| VÍF | 10 |
| Nápur | 50 |
| Badmintonfelagið á Sandi | |

# Bogaskjóting

Bogaskjótisamband Føroya / bskf@bskf.fo / Tel 225077 / www.bskf.fo

**Ætlanin er eisini at brúka meira orku, íroknað fíggjarliga orku, upp á ítróttar-upplivingar hjá teimum yngstu skjúttunum - at geva teimum okkurt at stíla eftir.**

## Strategi

**Breidd:** BSKF broytti í 2024 vetrarkappingina hjá barna- og ungdómsskjúttunum soleiðis, at skjúttarnir eru býttir í tríggjar aldursbólkar: U18, U16 og U12. Hetta letur upp fyri javnari kapping samanborið við gomlu skipanina, og skjúttar kunnu gera seg galdandi i fleiri aldursbólkum. Endamálið við broytingini er bæði at stimbra áhugan fyri bogaskjóting í øllum aldursbólkum og at skipa føroysku kappingina eftir líknandi leisti, sum verður brúktur í grannalondunum. Meira verður gjørt burturúr, so at teir ungu skjúttarnir eisini skulu hava størri ítróttarligar upplivingar at stremba eftir.

Feløgini verða eggjað til at senda sínar bestu skjúttar at luttaka í kappingini um norðurlendska ungdómsmeistaraskapin í bogaskjóting, NUM, og seinasu tvey árini er áhugin fyri at sleppa við til ta kappingina vaksin nógv. Luttøkan í NUM er tó avmarkað, og fyri at øll skulu hava onkra gularót at stremba eftir, tók BSKF í fjør heyst avgerð um at bjóða øllum aktivum ungdómsskjúttum at tekna seg til donsku kappingina, Frederiksborgpokalen.

Skjúttarnir rinda eitt egingjald fyri at sleppa at kappast í NUM og Frederiksborgpokalen, og í 2024 var egingjaldið 2.000 kr.

Skúlaárið 2024-2025 hevur BSKF saman við limafeløgunum bjóðað bogaskjóting fram sum ítróttagrein hjá 6. flokkunum í Skúlaleikum. Málið er at kveikja áhuga fyri bogaskjóting millum tey ungu, og nógv bendir á, at átakið ber frukt, tí nógvir av næmingunum, sum hava verið við í Skúlaleikum, hava aftaná vent sær til BSKF ella lokalu feløgini at tekna seg til venjingarnar.

**Úrval:** Reglurnar fyri úrvalsstuðli eru munandi broyttar, og skjúttarnir, feløgini og BSKF trilva seg eitt sindur fram í fyrstani. BSKF hevur gjørt av at brúka fíggjarliga orku uppá at lyfta úrvalsvenjingina (landsliðsvenjingina) upp á hægri stig. Í 2024 var danski úrvalsskjúttin Martin Damsbo Christensen høvuðsvenjari hjá landsliðnum. Hann telist millum heimsins bestu compoundskjúttar, og hann er eisini stak væl dámdur sum venjari millum føroysku skjúttarnar. Aftur at honum var danski venjarin Søren Ipsen, ið umframt at vera hjálparvenjari hjá landsliðnum, eisini gjørdi ávíst arbeiði við breiddini. Í desember var nýggj venjaraavtala gjørd fyri 2025 við Martin Damsbo Christensen og konu hansara Eriku Damsbo Christensen, ið eisini er úrvalsskjútti. Tann fíggjarligi parturin er ein stórur avbjóðing, at luttaka í altjóða kappingum, tí einki endurgjald er fyri mista arbeiðsinntøku. BSKF ásannar, at tað er neyðugt við eini hugburðsbroyting hjá íðkarunum, so tað at útvega stuðul til sín sjálvs (sponsorstuðul) í framtíðini verður ein natúrligur partur av fyrireikingini. BSKF arbeiðir eisini við at fáa sponsorstuðul til vega.

**Sjálboðin / Ítróttagleði:** Liggur á láni, men verður við í Strategi- og virksemisætlanini, sum er í gerð.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

Í vetrarhálvuni: Innandurakappingar í bogaflokkunum recurve, compound og berboga (barebow) fyri børn og ung í frástøðunum 12 og 15 metrar.

Veturin 2023-2024 endaði við FM-kapping í 12 metrum í Miðvági 2. mars 2024 og FM-kapping í 15 metrum á Eiði 16. mars 2024.

Broytt kappingarskipan fyri veturin 2024-2025, sum byrjaði við kapping í Søldarfirði 26. oktober 2024; nú verður kappast í aldursbólkunum U12 (8 metra frástøða), U16 (12 metra frástøða) og U18 (18 metra frástøða).

Í vetrarhálvuni: Innandura Grand Prix-kappingar fyri vaksin við recurve-, compound- og barbogum í 18 metra frástøðu.

Veturin 2023-2024 endaði við FM-kapping og Grand Prix-avgerð á Eiði 16. mars 2024.

Vetrarkappingin 2024-2025 byrjaði við kapping í Søldarfirði 27. oktober 2024.

Summar: FM uttandura á fløtuni í Hoydølum 25. august 2024.

**Kappingar uttanlands:**

6. januar 2024: Nytårspokalen, innandurakapping í Taastrup í Danmark.

19. - 24. februar 2024: EM innandura, Varazdin, Kroatia - Sólgerð Henriksen, recurve, Jóannes Poulsen, Jógvan Niclasen og Sámuel Petersen, compound.

7. - 12. mai 2024: EM uttandura, Essen, Týskland - Jógvan Niclasen, Sámuel Petersen, compound.

30. mai - 2. juni 2024: Kamnik, Slovenia, altjóða kapping - Jóannes Poulsen, Sámuel Petersen, compound.

3. - 8. juni 2024: Porec, Kroatia, altjóða kapping - Jóannes Poulsen, Sámuel Petersen, compound.

4. - 7. juli 2024: NUM (Norðurlendski ungdómsmeistaraskap-

urin), Odense, Danmark - Lilja Strøm Winther, berbogi, Marianna Reynskor, Lea Karina H. Haraldsen, Hannis R. á Plógv, recurve, Dávid Højgaard, Narvi E. B. Jensen, compound.
17. - 18. august 2024: Orknoyggjar, Norðuratlantiska kappingin - Rakul Dam, Jóannes Poulsen, Jógvan Niclasen, Sámuel Petersen, Nikkel Petersen, compound.
8. - 10. november 2024, JVD Open, Eindhoven, Holland, altjóða kapping - Jógvan Niclasen, Jóannes Poulsen, Sámuel Petersen, compound.
15. - 17. november 2024, GT Open, Luksemborg, altjóða kapping - Jóannes Poulsen, Sámuel Petersen, compound.

## Virksemi annars

BSKF arbeiðir við at orða eina ”strategi og virksemisætlan” fyri tey næstu trý-fimm árini. Aðalhugsanin er, at úrvalsvirksemi og breidd eru bundin hvør at øðrum, og tí mugu tey mennast lið um lið. Tað er í samsvari við hesa hugsan, at BSKF ítøkiliga stuðlar rekruttering av nýggjum skjúttum og har við fleiri aktivum limum í bogaskjótifeløgunum.
Ítøkiliga hevur BSKF brúkt orku uppá at stuðla felagnum í Suðuroy, Team SuðurSkot, sum kom í ein aldudal.
Arbeiðið við strategi og virksemisætlan var í gongd, tá ið tíðindini bórust um, at Oyggjaleikir 2027 verða í Føroyum. Bogaskjóting verður ein av ítróttargreinunum á Oyggjaleikum, og tað broytir fortreytirnar fyri strategi- og virksemisætlan munandi - bæði tí, at ein so stór ítróttarhending á heimavølli natúrliga broytir ítróttarlig mál og ætlanir, sum vóru sett út í kortið frammanundan, og tí praktisku fyrireikingarnar av Oyggjaleikum longu merkja økt arbeiðstrýst, og tað fer bara at vaksa, so hvørt sum leikirnir nærkast.
Arbeitt verður áhaldandi við at fáa betri karmar fyri uttanduraskjótingini, men enn hevur ikki eydnast at fáa avtalu við nakra kommunu um at gera skjótibreyt.
BSKF arbeiðir í fyrstu syftu ítøkiliga við at útvega eina umbygda bingju til skjótiskýli. Talan er um bingju, har partur av síðuni er tikin úr. Neyðugt verður síðan at fáa loyvi at seta skýlið á egnað stað, har til ber at hava fyribils skjótibreyt.

## Framtíðarætlanir

Arbeiðið at orða strategi og virksemisætlan er í gongd, og ætlanin er, at tað skal verða klárt at leggja fyri aðalfundin hjá BSKF í 2025. Í “Úrvalsætlan 2025 - 2026” hjá BSKF er aðalhugsanin soleiðis lýst:
“Úrvalsvirksemið verður partur av strategiini og virksemisætlanini, men longu nú ber yvirskipað til at siga, at úrvalsvirksemi og breidd eru knýtt at hvørjum øðrum, og tí mugu ganga hond í hond.
Úrval og breidd skulu eisini spegla hvørt annað, og tað merkir, at strembast skal eftir, at allar kappingargreinarnar (býttar á bogaslag, kyn, aldursbólkar, frástøður o.a), sum føroysku bogaskjótifeløgini bjóða, eisini verða raðfestar og síggjast aftur í úrvalsabeiðinum.”
Arbeiðið at gera eitt føroyskt regluverk fyri bogaskjótiítróttina misti ferðina, tá ið Michael Feldballe, sum var ein drívmegi í tí arbeiðnum, flutti av landinum. Ferð verður aftur sett á tað arbeiðið í næstum.




**Nevndarforfólk:**
Fróði Heri Poulsen

**Nevndarlimir:**
Jógvan Niclasen, varaforfólk
Hans Petur Højgaard, nevndarlimur
Pernille Krogh, varalimur

**Lønt starsfólk:**
Ingolf S. Olsen, skrivari/samskipari 0,36

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Bogaskjótifelagið Tambar | 40 |
| Bogaskjótifelagið Ørvur | 50 |
| Bogaskjótifelagið Vágaskot | 55 |
| Team Suðurskot | 40 |

**Sosialir miðlar:**
Facebook (BSKF)
Instagram: worldarchery_faroeislands

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Borðtennis

Borðtennissamband Føroya / btsf@btsf.fo / Tel 269511 / www.btsf.fo

**Borðtennissamband Føroya hevur í 2024 á fyrsta sinni verið við á Skúlaleikum, og tað hevur verið hugaligt at sæð, hvussu skúlaungdómur hevur stuttleikað sær so mikið við at spæla borðtennis, sum á so mangan hátt er ein sera stuttlig og góð ítróttagrein fyri børn.**

## Strategi

**Breidd:**

Miðaldeildin er endurstovnað. Hetta er ein deild, har leikarar - sama aldur, kyn og venjingarstøðu - leika hvør ímóti øðrum í hugnakappingum, sum fevna og fjálga um breiddina.

**Úrval:**

Bæði A- og ungdómslandsliðið hava havt enn eitt hendingarríkt kappingarár við hópin av kappingum og venjingarlegum - bæði herheima og uttanlands.

**Sjálvboðin:**

Fjálgað verður um tey sjálvbodnu við at rinda atgongumerki teirra til ymisk tiltøk í borðtennis og í ítróttarhøpi annars, umframt at bjóða teimum við á uttanlandsferðir sum ferðaleiðarar.

**Ítróttagleði:**

Bæði í Skúlaleikum og úti í feløgunum eru nógv nýggj spøl tikin í brúk. Hesi spøl hava verið væl umtókt millum ungu leikararnar.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

Grand Prix 3 - Tórshavn, januar 2024
Grand Prix 4 - Tórshavn, februar 2024
Grand Prix 5 - Trongisvágur, februar 2024
FM ung - Trongisvágur
FM vaksin - Tórshavn
Grand Prix 1- Tórshavn, september 2024
Grand Prix 2 - Trongisvágur, oktober 2024
Grand Prix 3 - Tórshavn, november 2024

**Kappingar uttanlands:**

Aarhus Open - Aarhus, Danmark, oktober 2024
North European Championships - Riga, Lettland, juni 2024
Kids Masters - Amager, Danmark, apríl 2024
KR Open - Reykjavík, Ísland, mars 2024
Spar Nord Cup - Roskilde, Danmark, februar 2024
Kvickly Cup - Ribe, januar 2024

## Virksemi annars

**Borðtennis í framgongd**

Eitt av størstu borðtennisfeløgunum í landinum borðtennisfelagið Tór í Havn fylti 30 ár í ár. Dagurin varð hátíðarhildin í hølum felagsins í høllini á Hálsi í Havn, har Heðin Mortensen, táverandi borgarstjóri, helt røðu. Hópin av fólki var komið saman at ynskja felagnum og fólkunum í felagnum tillukku við stovningardegnum. Eftir hátíðarhaldið varð skipað fyri kapping, har umleið 50 leikarar luttóku.

Borðtennissamband Føroya hevur í 2024 á fyrsta sinni verið við á Skúlaleikum, og tað hevur verið hugaligt at sæð, hvussu skúlaungdómur hevur stuttleikað sær so mikið við at spæla borðtennis, sum á so mangan hátt er ein sera stuttlig og góð ítróttagrein fyri børn. 20 skúlaflokkar kring alt landið hava luttikið á Skúlaleikum, og feløgini í høvðusstaðnum og í Suðuroy hava merkt væl av tilgongd av nýggjum leikarum, ið royndu borðtennis á Skúlaleikum.

Føroyski ungdómsleikarin 13 ára gamli Rasmus Teitsson í Skorini úr borðtennisfelagnum Tór í Havn hevur í ár av álvara gjørt um seg uttanlands, har hann hevur vunnið fleiri heiðursmerki í donskum kappingum - eitt nú Ribe, Aarhus, Odense og Roskilde. Hann telist ímillum fremstu leikararnar í sínum aldursbólki í Danmark. Í Kids Masters, har tólv teir fremstu í hvørjum aldursbólki hittast, gjørdist hann nummar seks. Rasmus umboðar føroyska ungdómslandsliðið, men savnar eisini sjálvur pening saman til at luttaka í donskum kappingum.

## Sosialir miðlar

Facebook: Borðtennissamband Føroya
Instagram: table.tennis.faroe.islands
Youtube: Borðtennissamband Føroya



**Nevndarforfólk:**
Fróði Fríðason Jensen

**Nevndarlimir:**
Elinborg C. Mortensen, næstforfólk
Teitur Haraldsen Albinus, kassameistari
Pætur Haraldsen Albinus, skrivari
Hallur Thorsteinsson, nevndarlimur

**Kappingarnevnd:**
Peter Hentze Niclasen, forfólk
Vagnur Kjærbech Nolsøe, nevndarlimur
Kai Roest, nevndarlimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Borðtennisfelagið Tór | 30 |
| Tvøroyrar Borðtennisfelag | 30 |
| Oyndarfjarðar Ítróttarfelag | 10 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Flogbóltur

Flogbóltsamband Føroya / fbf@fbf.fo / Tel 218766 / www.fbf.fo

**FBF hevur við stuðli frá FIVB sett fulltíðarvenjara at taka sær av allari gentusíðuni og teimum yngru dreingjunum.**

## Strategi

**Breidd:**

Flogbóltsskúlin og Skúlaleikir

**Úrval:**

Sandflogbóltur

**Sjálvboðin:**

Liðleiðarabólkur

**Ítróttagleði:**

Flogbóltsskúlin og Skúlaleikir

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

Lands- og steypakappingar fyri vaksin og allar yngri deildir frá september til apríl í 2025

NEVZA U19 fyri kvinnur og menn, oktober 2024

**Uttanlands:**

NEVZA U17 fyri gentur og dreingir, oktober 2024

CEV Silver League fyri kvinnur og menn, mai-juni 2024

NEVZA sandflogbóltur U18, juni 2024

CEV Eurovolley sandflogbóltur, U18, juli 2024

## Virksemi

Umframt kappingar í øllum deildum frá september 2024 til apríl 2025, landsliðskappingar í Føroyum og uttanlands fyri bæði innanduraflogbólt og sandflogbólt, hevur FBF hildið flogbólts-skúla fyri leikarar í aldrinum U12 - U18 frá september 2024 til apríl 2025. FBF hevur eisini sent venjarar til CEV venjaraskeið í kidsvolley, sum er stuðlað av CEV.

## Framtíðarætlanir

FBF hevur við stuðli frá FIVB sett fulltíðarvenjara at taka sær av allari gentusíðuni og teimum yngru dreingjunum. Hetta fer væntandi at styrkja venjingarstigið hjá teimum bestu leikarunum og hjá leikarum sum heild. Umframt at venja landsliðini er ætlanin eisini, at fulltíðarsetti venjarin skal hava ábyrgdina fyri flogbóltsskúlanum. Venjarin skal eisini vitja feløgini javnan fyri á tann hátt at styrkja venjarasíðuna í einstøku feløgunum.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/fbf.fo

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| TB | 115 |
| B71 | 86 |
| Fleyr | 150 |
| KÍF-Flogbóltur | 120 |
| SÍ | 80 |
| Dráttur | 120 |
| Mjølnir | 150 |
| ÍF | 100 |
| Ternan | 180 |

**Nevndarforfólk:**

Peter Holm

**Nevndarlimir:**

Guðrun L. Joensen, næstforfólk

Jóhan á Mýrini, nevndarlimur

**Aðrar nevndir:**

Jana Jacobsen, kappingarstjóri

**Liðleiðaranevnd**

Guðrun L. Joensen

Hanna Helena Weihe Simonsen

Randi Larsen

Lena í Buð

Marjun Kalsø

**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Beinir Kristiansen, stjóri | 25% |
| Jana Jacobsen, samskipari | 100% |
| Trina Eysturoy, samskipari | 75% |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Fótbóltur

Fótbóltssamband Føroya / fsf@football.fo / Tel 351979  / www.football.fo / www.fsf.fo

**Føroyskur fótbóltur er í støðugari menning, og ongantíð hevur virksemið verið meira umfatandi. Serliga gleðiligt er at síggja, at luttøkan millum børn og ung er høg - bæði í mun til tal á leikarum og liðum.**

## Strategi

Visjónin hjá FSF er, at Føroyar skulu gerast heimsmeistarar í luttøku. So nógv sum møguligt skulu vera við í føroyskum fótbólti - so leingi sum møguligt.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

Fótbóltssamband Føroya skipar á hvørjum ári fyri fótbóltskappingum fyri børn, ung og vaksin. Harafturat hevur FSF ellivu landslið, sum eru í gongd meginpartin av árinum.

**Uttanlands:**

Fótbóltssamband Føroya hevur ellivu landslið - U15, U16 og U17 gentur, og A-landsliðið við kvinnum, umframt U15, U16, U17, U19 og U21 við dreingjum, og A-landsliðið við monnum - sum á hvørjum ári kappast í altjóða kappingum, sum verða fyriskipaðar og spældar bæði í Føroyum og uttanlands.

## Virksemi annars

**Fótbóltsárið 2024**

Føroyskur fótbóltur er í støðugari menning, og ongantíð hevur virksemið verið meira umfatandi. Serliga gleðiligt er at síggja, at luttøkan millum børn og ung er høg - bæði í mun til tal á leikarum og liðum.

**Landskappingin**

Í 2024 vóru 456 lið tilmeldað landskappingar, sum eru fleiri enn árið fyri. 317 lið vóru tilmeldað í mansfótbólti, og 139 lið vóru tilmeldað í kvinnufótbólti. Tilsamans 3.930 børn í aldursbólkinum 5 til 17 ár vóru skrásett í 2024 - 1.467 gentur og 2.463 dreingir.

Í Betri deildini hjá monnum vann Víkingur sannførandi gull. KÍ vann silvur, meðan HB vann bronsu.

í 2024 vóru aftur átta lið í Betri deildini hjá kvinnum. NSÍ vann meistaraheitið, KÍ silvur og Víkingur bronsu

**Steypakappingin**

Finalan um Løgmanssteypið í 2024 var millum B36 og HB. Eftir loknan dyst og longda leiktíð var støðan 2-2. Finaluna vann HB eftir brotssparkskapping.

Í steypakappingini hjá kvinnum møttust NSÍ og Víkingur. NSÍ vann 4-1.

**Evropeiska luttøkan hjá feløgunum**

Í 2024 kappaðust KÍ, HB, Víkingur og B36 í UEFA-kappingunum fyri feløg hjá monnum.

Í kappingini hjá kvinnum luttók KÍ sum meistaralið.

**Landsliðsfótbóltur**

Í 2024 spældi A-landsliðið hjá monnum tíggju landsdystir. Í UEFA Nations League var føroyska landsliðið í bólki 4 í deild C, sum endaði við, at Føroyar fingu seks stig. Tríggir dystir endaðu við  javnleiki og Føroyar vunnu ein. Úrslitini vóru 1-1 heima móti Norðurmakedónia, 2-2 heima móti Armenia, 1-1 heima móti Lettlandi, og vit vunnu 1-0 á Armenia á útivølli.Manslandsliðið spældi eisini í Baltic Cup - umframt tveir venjingardystir móti Liktinstein og Danmark.

Kvinnurnar spældu tíggju landsdystir í 2024. Í EM undankappingini fingu kvinnurnar níggju stig. Tær vunnu 4-0 á Andorra á heimavølli, vunnu 2-1 á Montenegro á heimavølli, og tær vunnu 4-0 á Andorra á útivølli. Kvinnurnar luttóku eisini í Baltic Cup í 2024. Tær taptu fyrra dystin fyri Lettlandi 2-1, vunnu síðani seinna dystin 2-1 á Litava. Tær endaðu nummar trý í kappingini. Kvinnurnar spældu tveir venjingardystir í 2024 móti Malta og Albania.

U21 landsliðið spældi fimm dystir í 2024 - tríggjar heima og tveir úti. U21 liðið fekk trý stig í hesum dystum. Stigini komu til høldar við 1-0 sigri á Belarus. Føroyar endaðu á fjórða plássi í bólkinum við 10 stigum.

Í 2024 leiktu ungdómslandsliðini 50 landsdystir. FSF hevur U15, U16, U17 og U19 landslið fyri gentur og dreingir. U15 og U16 liðini spæla venjingardystir/menningarkappingar, meðan U17 og U19 spæla bæði venjingardystir/menningarkappingar og undankappingardystir.

**Grassroots**

FSF hevur í 2024 skrásett tilsamans 3.930 børn í aldursbólkinum 5 til 17 ár í Comet-skipanini. Árliga grassrootsvikan var í døgununum 23.-29. september. Tiltakið kallaðist Bóltur&Spæl, og var fyri børn 5-6 ár. 635 barnagarðsbørn luttóku saman við

**Forseti:**
Christian F. Andreasen

**Nevndarlimir:**
Róin Schrøter, varaforseti
Heri á Rógvi
Maria Jóhannusardóttir Joensen
Anja Rein
Jóannes A. Prestá
Sólrun Hendriksdóttir Sørensen

**Aðrar nevndir:**
Fíggjarnevndin, Kappingarnevndin, Útbúgvingar- og menningarnevndin, Dómaranevndin, Landsliðsnevndin, Kvinnunevndin, Grassroots- og ungdómsnevndin, Aga- og etiskanevndin, Yvirkærunevndin
www.fsf.fo/fsf/nevndir/

**Feløg:**
07V, AB, B36, B68, B71, EB/Str., FCH, FCS, HB, ÍF, KÍ, MB, NSÍ, Royn, Skála, TB ,Víkingur



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

uml. 160 starvsfólkum, og 150 skúlanæmingar luttóku sum hjálparfólk.
Saman við Parasport varð eisini skipað fyri einum fótbóltsfestivali á Tórsvølli fyri næmingum á serbreytunum á miðnámi. Uml. 60 næmingar frá Glasi, Kambsdali og úr Klaksvík vóru við - umframt næmingar úr Rásini í Runavík.
Í november í 2024 fór Playmakers av bakkastokki. Playmakers, ið er eitt venjingarátak ætlað gentum í aldrinum 5-8 ár, er samstarv millum UEFA og Disney.
Í stuttum er talan um samanrenning av søguforteljing, rørslum og menning av ymiskum sosialum førleikum. Playmakers heldur áfram í 2025.

**Fótbóltstilboð til vaksin og børn við menningartarni**
Venjingartilboðið fyri børn við menningartarni í aldrinum 8-12 ár kallast “Fótbóltur fyri øll”. B36 hevur staðið fyri venjingunum, og tað helt áfram í 2024. Samstarvsavtala er gjørd við Parasport fyri árini 2023-2026.

**Tryggur Ítróttur**
Arbeiðið at gera eina heimasíðu um safeguarding í føroyskum ítrótti helt fram í 2024. Í februar varð skipað fyri eini verkstovu fyri fólk í føroyskum ítrótti. Tine Vertommen úr Belgia varð bjóðað til Føroya at standa fyri verkstovuni. Tryggur Ítróttur er samstarv millum FSF og ÍSF, sum er stuðlað av Betri Trygging.

**Kvinnur í fótbólti**
Á kvinnu- og gentusíðuni er serstøk menningarætlan gjørd, sum eitur “Kvinnur á vøllin”, sum nágreinar menningina av kvinnufótbólti árini 2021 til 2025.

## Framtíðarætlanir

Í løtuni verður fyrst og fremst arbeitt eftir tí menningarætlan, sum í 2021 var løgd fyri næstu fimm árini. Tað vil siga til og við 2026. Síðani verður ein nýggj menningarætlan gjørd, ið væntandi eisini fer at fevna um næstu trý til fimm árini.

FSF hevur metstóra luttøku. Við miðvísum átøkum er høvuðsmálið í menningarætlanini rokkið - nevniliga at økja um talið á virknum fótbóltsleikarum við 20 prosentum í mun til 2021. Arbeitt verður tó áhaldandi við at røkka øllum deilmálunum í menningarætlanini.

Ársfrágreiðingin 2024 og Menningarætlanin 2021-2026 kunnu lesast í fullari longd á heimasíðuni hjá FSF.

## Sosialir miðlar

Facebook: www.facebook.com/fsf1979
Instagram: www.instagram.com/fsf1979/
YouTube: www.youtube.com/@FSFVarpid
LinkedIn: www.linkedin.com/company/9332950/admin/dashboard/

# Frælsur ítróttur

Frælsur Ítróttur Føroya / athletics@athletics.fo / Tel 228611  / www.renn.fo

**Ítróttagleði fyrst og fremst - hetta er kenslan, sum vit altíð royna at fáa í gerandisvenjingarnar í lokalfeløgunum.**

## Strategi

**Breidd:** Tríggjar stórkappingar og FM eru kappingar fyri úrvalsíðkarar og breidd. Tað eru breiddaríðkararnir, sum fáa gleðina av hesum kappingum. Til VU-spelen, ið er stór kapping í Gøteborg í Svøríki, taka vit íðkarar niður í 12 ára aldur, sum vísa áhuga og hegni til ítróttin. Annars eru tað lokalfeløgini, sum fara við allari breiddini til eina kapping um veturin og eina á sumri.

**Úrval:** Stuðul iDMU og iDMsenior.
Stuðul til DMU og Dmsenior.
Pallas Spelen.
VU-spelen.
Stuðla úrvalsvenjingarlegum og einstøkum kappingum.

**Sjálvboðin:** Í 2024 hava vit brúkt sjálvboðin til allar kappingarnar, sum vit hava havt.
Hol er sett á arbeiðið at lata tey sjálvbodnu betri í. Millum annað við skipaðari undirvísing í okkara úrslitaskipan.

**Ítróttagleði:** Ítróttagleði fyrst og fremst - hetta er kenslan, sum vit altíð royna at fáa í gerandisvenjingarnar í lokalfeløgunum. Vit leggja dent á, at hetta er størsti parturin av motivatiónini - bæði hjá úrvali og breidd.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**
06.01.23: Nýggjárshálvmaraton (Roysnið)
27.01.24: RASKA VK4 (Frælsið)
03.02.24: RAKSA VK5, FM kross, Hoydalar (Bragdið)
24.02.24: RASKA VK6, Norðoyggjar (Treysti)
10.03.24: RASKA VK7, Suðuroy (Hvistan)
23.03.24: RASKA VK8, Runavík (Roysnið)
25.04.24: Flaggdagsrenning, Tórshavn (Bragdið)
04.04.24: FM hálvmaraton, Klaksvík (Treysti)
18.05.24: RASKA Stórkapping 1, Tórsbreyt (Hvirlan)
18.05.24: Kvinnurenning, Tórshavn (Bragdið)
01.06.24: RASKA Stórkapping 2, Guttabreyt (Treysti)
08.06.24: Stuttleikir, Tórsbreyt (Hvirlan)
09.06.24: Tórshavn Maraton, Tórshavn (Bragdið)
22.06.24: RASKA Stórkapping 3, Tórsbreyt (Bragdið)
07.06.24: Top Run, Kollafjørður (Bragdið)
27.07.24: Ólavsøkurenning, Tórshavn (Bragdið)
03.08.24: Backyard Ultra, Havnardalur (Bragdið)
10.08.24: FM vaksin á breyt, Tórsbreyt (FíF)
17.08.24: Ovastevnurenning, Nólsoy (Bragdið)
24.08.24: Faroe Express Stafettin, Tórshavn (Bragdið)
31.08.24: FM ung á breyt, Tórsbreyt (FíF)
07.09.24: Føroya Vakrasta Hálvmaraton, Vágar (Frælsið)
02.11.24: RASKA VK1, Runt Agnið (Roysnið)
23.11.24: RASKA VK2, Kerjar (Hvirlan)
07.12.24: RAKSA VK3, Kollafjørður (Bragdið)

**Kappingar uttanlands:**
18.01.24: Stórmót, Laugardalshøllin, Reykjavík, IS
25.01.24: Pallas Spelen, Malmø, SE
01.02.24: Innomhus Kast, Vaxjø, SE
16.02.24: iDM senior, Odense, DK
02.03.25: iDMU, Skive, DK
21.06.25: DM senior, Herning, DK
29.06.24: DM senior, Hvidovre, DK
05.07.24: VU-spelen, Gøteborg, SE
07.09.24: DMU, Randers, DK

## Framtíðarætlanir

Vit halda fram við stórkappingunum,  og vit fara í ár at royna at leggja FMU og FM saman í eina kapping, soleiðis at meira virksemi kann fáast á Tórsbreyt. Vit stuðla framvegis íðkarum í at fara til DMU og DM senior - bæði innandura og uttandura.
Oyggjaleikir í Orknoyggjum.
VU-spelen í Gøteborg.
Ætlanin er at skipa fyri felags breiddarvenjing fyri øllum feløgunum á leið 1-2 ferðir hvønn mánað.
Vit fara at heiðra hjálparfólk til FM, tá ið kappingarárið endar.
Hugsanin er eisini at onkursvegna fáa FM meira stórfingið, og skal tað tí enda við eini heiðursløtu fyri íðkarar, luttakarar, vinnarar, fyriskiparar og hjálparfólk.
Klárgerðing til OYL 2027.
Ætlanin er um at fáa gongd á arbeiðið at fáa sjálvstøðugan limaskap í IAAF.



## Nevndarforfólk:
Gunnvá Wardum

## Nevndarlimir:
Lovisa Niclasen, næstforfólk
Jorie Josephsen, kassameistari
Karin Kirke Petersen, skrivari
Jógvan Kristiansson Glerfoss, nevndarlimur
Kim D. Hansen, 1. tiltakslimur
Sølvi Reinert Hansen, 2. tiltakslimur

## Aðrar nevndir:
**Dómsnevnd:**
Viðger kærur frá landsstevnum, FM-kappingum og øðrum málum, sum viðvíkja sergreinum (smb. reglugerð hjá ÍSF)
Arnfinn Johannesen
Lovisa Niclasen
Andreas Josephsen

**Kappingarnevnd:**
(er í løtuni ikki virkin, og tí hevur starvsnevndin ábyrgdina) Hevur leiðsluna av øllum almennum kappingum í frælsum ítrótti í Føroyum og tekur avgerð í møguligum trætumálum. Kappingarnevndin verður vald á hvørjum ári.
Gunnvá Wardum
Lovisa Niclasen

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Annað
Stórur partur av orkuni næstu tvey árini fer til OYL í Føroyum 2027. Enn eru vit ikki komin til nakað meira ítøkiligt viðvíkjandi dómarum og hjálparfólkum. Vit ætla at hava eina dómaraútbúgving í heyst. Møguliga verður eisini ein dómaraútbúgving á heysti í 2026. Við hesum fáa vit dómarar, ið kunnu fáa royndir í kappingunum á sumri í 2026. Vit vænta tó ikki at klára at útbúgva allar teir dómararnar, sum vit fara at fáa brúk fyri, og tí má ein loysn finnast.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Bragdið, Tórshavn | 350 |
| Hvirlan, Tórshavn | 100 |
| Roysnið, Nes | 45 |
| Treysti, Klaksvík | 300 |
| Hvistan, Suðuroy | 40 |
| Frælsi, Vágar | 70 |

## Sosialir miðlar
www.facebook.com/2002fif
www.instagram.com/athleticsfo/

# Fimleikur

Føroya Fimleikasamband / fimleikur@fimleikur.fo / Tel 919919 / www.fimleikur.fo

**Føroya Fimleikasamband hevur sett sær fyri at menna venjarahópin í amboðsfimleiki har landsliðsvenjararnir skipa fyri venjingarlegum. Aðalmálið er at lyfta stigið hjá øllum fimleikarum og venjarum.**

## Strategi

**Breidd:**

Føroya Fimleikasamband skipar fyri dómaraskeiði á hvørjum ári fyri breiddarvenjarar. Í 2024 fingu breiddarvenjararnir eisini høvi at luttaka í fimleikagalla.

**Úrval:**

Føroya Fimleikasamband hevur sett sær fyri at menna venjarahópin í amboðsfimleiki við at skipa fyri venjingarlegum, har landsliðsvenjararnir hava skipað fyri. Aðalmálið er at lyfta stigið hjá øllum fimleikarum og venjarum.

**Sjálvboðin:**

Fyri at sjálvboðin skulu hava tað léttari, hevur Føroya Fimleikasamband gjørt eitt stórt arbeiði við at fyriskipa skeið, venjingar og kappinga. Ein yvirskipaður framferðaháttur hevur gjørt arbeiðið hjá FFS munandi léttari. Harafturat verður ein eftirmetingarfundur í endanum á hvørjum kappingarári. Hetta verður gjørt fyri at fáa innlit í, hvussu arbeiðið kann gerast betri.

**Ítróttagleði:**

Føroya Fimleikasamband skipaði fyri einum felagsfundi við øllum fimleikafeløgunum í Føroyum fyri at kunna um arbeiðið hjá FFS og fyri at fáa viðmerkingar frá feløgunum. Felagsvenjingar í amboðs- og estetiskum fimleiki eru gjørdar fyri at samansjóða kappingarfimleikin í Føroyum.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

20. januar 2024 - Góðkenningardagur í FIMI  
27. januar 2024 - 1. steypakapping í estetiskum fimleiki í Tórshavn  
3. februar 2024 - Steypakapping í amboðum í FIMI  
9. mars 2024 - 2. steypakapping í estetiskum fimleiki í Bylgjuni  
4. mai 2024 - Góðkenningardagur í FIMI  
4.-5. mai 2024 - FM í estetiskum fimleiki í Tórshavn  
18. mai 2024 - FM í amboðsfimleiki í Bylgjuni  
16. novembur 2024 - Góðkenningardagur í Bylgjuni  
30. nobembur 2024 - Liðkapping í amboðsfimleiki í FIMI

**Uttanlands:**

8.-10. mars - NM2024 fyri seniorar í Oslo (NOR)  
15. mars. 2024 - World Cup estetiskum fimleiki í Finnlandi  
21.-22. septembur - NEC fyri seniorar var hildið í Dublin (IRL)

## Virksemi annars

**Dómaraskeið:**

Dómaramangul er altíð ein avbjóðing. Vit hava áhaldandi roynt at skipa fyri dómaraskeiðum - bæði í Bylgjuni og FIMI. Nógv hava verið á hesum skeiðum, men enn eru ikki nógv, sum bjóða seg fram at vera fastir dómarar. Anna Margit Dalsgaard og Pól Esper Hansen, sum bæði eru altjóða dómarar hava skipað fyri FIG dómaraskeiðinum tvær ferðir um árið. Somuleiðis hevur eisini verið skipað fyri dómaraskeiði á estetisku síðuni.

**Norðurlendskur fundur 2024:**

Á hvørjum ári verður skipað fyri fundi millum norðurlendsku fimleikasambondini, og í mars 2024 var fundurin hildin í Føroyum á Hotel Brandan. Tey, ið luttóku, vóru formenninir og skrivararnir hjá Svøríki, Íslandi, Finlandi, Danmark og Norra. Fyri Føroya Fimleikasamband luttóku Pól Esper Hansen, forfólk, Heri S. Lamhauge, næstforfólk og Ninna Reinert Simonsen, aðalskrivari.

**Myndafólk til kappingar:**

Fyri at gera okkum meira sjónlig hava vit roynt at fingið myndafólk til bæði kappingar og góðkenning. Síðani hava vit lagt hetta á fimleikur.fo og á okkara Facebooksíðu. Vit hava eisini roynt at fingið feløgini at frámerkja okkum á Instagram við ymiskum venjingum. Hetta gera vit fyri at skapa áhuga og vitan um fimleik.

**Fimleikagalla**

Á hvørjum ári verður skipað fyri fimleikagalla fyri allar fimleikarar og nevndir. Í 2024 bleiv fimleikagalla hildið í Dansifrøi í Havn.

## Framtíðarætlanir

3. steypakapping í estetiskum fimleiki  
Í 2025 hevur Klaksvíkar fimleikafelag skipað fyri sínari fyrstu steypakapping í estetiskum fimleiki.



**Nevndarforfólk:**
Pól Esper H. Hansen

**Nevndarlimir:**
Heri Lamhauge, næstforfólk/reiðskapur
Elin Michelsen, estetiskur fimleikur
Malan Mikkelsen, fimleikagalla/fagnaðurin
Tinna Johannesen, breiddarfimleikur

**Lønt starvsfólk:**
Ninna Reinert Simonsen, skrivari 0,3
Heri Jøkladal, kassameistari

Mynd: Finnur Justinussen

**FIG dómarar**
Føroya Fimleikasamband hevur í dag fýra altjóða dómarar í amboðsfimleiki. Anna Margit Dalsgaard, Jákup O. Svøðstein, Julian Steingrund og Pól Esper H. Hansen hava øll staðið altjóða dómaraskeið hjá FIG í 2025. Málið hjá FFS er at hava fimm kvinnu- og mannfólkadómarar.

**Landsliðsvenjarar til Oyggjaleikir í Føroyum**
Seinastu tvey árini hava Louise Brandenborg Jensen og Andreas Peter Bøgebo verið landsliðsvenjarar í amboðsfimleiki. Sáttmálin við landsliðsvenjararnar gongur út í september 2025. Louise verður ikki landsliðsvenjari aftur í fyrstu umfari, tí hon er farin í barnsburðarfarloyvi. Føroyar skulu tí finna ein nýggjan landsliðsvenjara til føroyska kvinnulandsliðið í amboði. Ætlanin er at seta eitt venjararpar, sum skal venja føroyska landsliðið fram til oyggjaleikirnar í Føroyum í 2027.
Ætlanin er eisini at fáa skrivara upp á hálva ella vónandi fulla tíð.

## Annað

**Oyggjaleikir 2027 í Føroyum**
Fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar í Føroyum eru longu byrjaðar. Ein tørvsmeting og fíggjarætlan eru longu gjørd fyri kappingina, og í næstum verður ein arbeiðsbólkur settur, sum skal fyriskipa kappingina, sum verður hildin í Bylgjuni í Runavík. Føroya Fimleikasamband er í tøttum sambandi við Runavíkar kommunu, sum væntandi fer at spæla ein stóran leiklut.

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Havnar Fimleikafelag | 1.285 |
| Fimleikafelagið Støkk | 957 |
| Fimleikafelagið Ljósið | 350 |
| Klaksvíkar Fimleikafelag | 390 |
| Fimleikafelagið Flog | 138 |
| Tvøroyra Fimleikafelag | 150 |
| Vága Fimleikafelag | 108 |
| **Íalt** | **3.378** |

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/www.fimleikur.fo
www.instagram.com/fimleikasambandid/
www.fimleikur.fo/

# Hondbóltur

Hondbóltssamband Føroya / hsf@hsf.fo / Tel 231982 / www.hsf.fo

**HSF upplivir, at flestu feløgini eru vælskipað við sjálvbodnum hjálparfólkum, og HSF roynir at vara um hesi fólk við t.d. atgongumerkjum til landsdystir.**

## Strategi

**Breidd:** HSF arbeiðir áhaldandi við at tryggja eina so stóra breidd sum gjørligt. Kappingar verða skipaðar í fleiri bólkum í hvørjum árgangi, hetta fyri at tryggja, at so nógv sum gjørligt spæla á einum hóskandi og mennandi stigi. T.d. eru bæði A- og B-steypakappingar, sum báðar enda við einum finaludegi í Høllini á Hálsi.

**Úrval:** HSF er av tí áskoðan, at breidd og úrval ikki útiloka hvørt annað, tey hanga saman. Tískil fevnir leikaramenningin hjá HSF breitt, og roynt verður at fáa so nógv sum gjørligt í gjøgnum skipanina. Fyri at styrkja um úrvalsumhvørvið, hevur HSF m.a. havt málverjavenjaraskeið, skeið í skaðafyribyrging, havt serskeið fyri lámar og vengur. Umhvørvið við hondbóltsgreining er styrkt við at felagsavtala er gjørd við greiningarfyritøkuna Sideline XPS, sum ger, at allir dystir í bestu føroysku deildunum verða kliptir, kunnu greinast og nýtast til hagtøl.

**Sjálvboðin**: HSF upplivir, at flestu feløgini eru vælskipað við sjálvbodnum hjálparfólkum, og HSF roynir at vara um hesi fólk við t.d. atgongumerkjum til landsdystir. HSF hevur havt skeið fyri feløgini, ið snúgva seg um, hvussu tey kunnu fáa fleiri sjálvboðin.

**Ítróttagleði:** Hondsbóltslandsliðini savnaðu tjóðina til EM-endaspølini hjá monnum og kvinnum. Fjepparagleðin var ovurhondsstór. HSF ger nógv fyri, at landsliðini eru í eygnahædd við ung og gomul. Landsliðini hava vitjað nógvar skúlar og hitt tey ungu.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

A-Menn: 2 x Vinardyst móti Belgia - 5. og 6. januar (Høllin á Hálsi), HM-undankapping móti Norðurmakedonia - 8. mai (Høllin á Hálsi), EM-undankapping móti Kosovo - 6. november (Høllin á Hálsi)

A-Kvinnur: EM-undankapping móti Luksemborg - 3. mars (Høllin á Hálsi),
EM-undankapping móti Svøríki - 3. apríl (Høllin á Hálsi),
2 x vinardyst móti Svøríki B - 22. + 23. november (Badmintonhøllin í Klaksvík og Høllin á Skála)

U06-Menn: 2 x Vinardyst móti Íslandi - 1. og 2. juni (á Giljanesi og í Kollafirði)

U08-Menn: 2 x Vinardyst móti Íslandi - 1. og 2. juni (á Giljanesi og í Kollafirði)

**Kappingar uttanlands:**

A-Menn: EM-endaspæl - 11.- 15. januar (Berlin, Týskland),
HM-undankapping móti Norðurmakedonia - 12. mai (Skopje, Norðurmakedonia),
EM-undankapping móti Ukraina - 10. november (Vilnius, Litava)

A-Kvinnur: EM-undankapping móti Luksemborg - 28. februar (Luksemborg),
EM-undankapping - 7. apríl (Reykjavik, Ísland),
2 x Vinardyst móti Slovakia - 28. + 29. september (Samorin + Bratislava, Slovakia),
EM-endaspæl - 29. november - 3. december (Basel, Sveis)

## Virksemi annars

Hondbóltsárið 2024 var helst hitt besta nakrantíð í føroyskari hondbóltssøgu, tá ið hugsað verður um altjóða úrslit.
Manslandsliðið spældi EM-endaspæl í Berlin og megnaði eisini at fáa stig móti Noregi. Føroyar endaðu sum nummar 18 av 24 liðum í kappingini. Umleið 5.000 føroyingar vóru í Berlin og stuðlaðu føroyska liðnum í sannari fólkaveitslu.
Menninir vóru eisini júst ov stuttir til at vinna seg til HM-endaspælið, eitt mál restaði í play-off dystunum móti Norðurmakedonia.
Elias Ellefsen á Skipagøtu bleiv av IHF, altjóða hondbóltssamgonguni, kosin heimsins besti ungi spælari í 2023.
Kvinnulandsliðið gjørdi monnunum eftir og megnaði eisini at vinna seg í EM-endspælið, sum var í november/desember í Basel í Sveis. Kvinnurnar stóðu seg eisini væl, og við einum javnleiki móti Kroatia og góðari málúrtøku endaði liðið sum nummar 17. av 24.
U18- og U20 landsliðini hjá monnum luttóku eisini í EM-endaspølum á sumri, og tey gjørdust ávikavist nummar 15. og 18. av 24 liðum. Óli Mittún bleiv toppskjútti í U20 EM-endaspælinum.
U16-kvinnurnar luttóku í European Open, og tær blivu nr. 19 av 20 liðum.
Aftur í vetur luttóku føroysk feløg í European Cup. Kvinnu- og mansliðini hjá VÍF og H71 luttóku. Kvinnurnar hjá H71 spældu seg víðari í annað umfar.

HSF hevur uppbygt gott samstarv við íslendska hondbóltssambandið. í 2024 hava verið fleiri ungdómsvenjingardystir landanna millum.




**Nevndarforfólk:**
Gunn Ellefsen

**Nevndarlimir:**
Jógvan Emil Nielsen, næstforfólk
Durita Thomsen, Heini Ellingsgaard, Kristian Østergaard, Høgni Vilhelmsen, Birgir Kass
**Dómsnevnd:**
Súsanna Leo, forfólk
Kristian Johansen, Margrið Weihe
**Dómaranevnd:**
Jógvan Emil Nielsen, forfólk
Heini Ellingsgaard, Dánjal Samuelsen, Thomas Juul Thomsen, Margrið Weihe

**Kappingarnevnd:**
Høgni Vilhelmsen, forfólk
Jákup Dam, Eyðun Mortensen, Ása á Neystabø
**Stuðlanevnd:**
Durita Thomsen, forfólk
Gunn Ellfesen, Heini Ellingsgaard
**Aganevnd:**
Jens Andrias Winther, formaður
Niels Winther, Hartvig Joensen

**Lønt starvsfólk:**
Andrass Thomsen, stjóri 1
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri 1
Ári Rouch, samskipari 1
Hallur Danielsen, samskipari 1
Nicholas Satchwell, samskipari 0,5

**Feløg og limir:**

| | |
|---|---|
| EB, Eiði | 307 |
| H71, Hoyvík | 523 |
| ÍA, Argir | 237 |
| KÍF, Kollafjørður | 118 |
| Kyndil, Tórshavn | 335 |
| Neistin, Tórshavn | 543 |
| SÍF/Søljan, Sandavágur | 230 |
| StÍF, Strendur | 352 |
| Stjørnan, Klaksvík | 135 |
| Team Klaksvík, Klaksvík | 190 |
| Tjaldur, Runavík | 217 |
| VB, Vágur | 132 |
| VÍF, Vestmanna | 242 |
| Vípan, Sandur | N/A |
| Eydnudeild | 60 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

Av øðrum virksemi kann m.a. nevnast ymisk skeið sum HSF skipar fyri. T.d.i fysioterapeutar, dómaraskeið, venjararskeið, málverjavenjaraskeið og skeið fyri dómaraborð. Allir dystirnir í bestu føroysku deildunum verða greinaðir av Sideline. At luttaka á hægsta stigi er fíggjarliga krevjandi, men HSF fegnast um gott samstarv við stuðlar, nú enn størri avbjóðingar standa fyri framman í 2025.

## Framtíðarætlanir

HSF arbeiðir áhaldandi við at menna føroyskan hondbólt á fleiri mótum. Eitt av aðalmálunum er, at Føroyar eisini skulu luttaka í HM-endaspæli fyri menn ella kvinnur innan fimm ár. Fyri at røkka hesum málinum leggur HSF nógv fyri at menna dygdargóðar leikarar saman við feløgunum, sum kunnu standa seg í altjóða dystum. HSF arbeiðir áhaldandi við at tryggja virksemið fíggjarliga saman við myndugleikum, stuðlum og okkara egna virksemi. HSF vil menna samleikan hjá hondbóltinum í Føroyum, menna dygdargóðar nútímans loysnir, sum kunnu virka fyri at breiða hondbóltin út og styrkja um umsitingina hjá feløgunum og sambandinum sjálvum. Hartil vil HSF viðvirka til at tryggja nøktandi, nútímans karmar til, at altjóða hondbóltur kann leikast í Føroyum - karmar, sum liva upp til krøvini hjá altjóða sambondunum IHF og EHF.

## Framtíðarætlanir

www.facebook.com/hondboltssambandid/
www.instagram.com/handball_faroe_islands/
www.tiktok.com/@handballfaroeislands

# Judo

Judo Føroyar / judo@judo.fo / Tel 216586 / www.judo.fo

**Nú oyggjaleikirnir vera í Føroyum í 2027, hava vit sjálvsagt sett judo á skránna. Málið hjá okkum er at hava luttakarar í øllum vektbólkum á leikunum - bæði hjá kvinnum og monnum.**

## Strategi

**Breidd:** Vit útbúgva venjarar hjá feløgunum, og vit útbúgva tey ungu at vera hjálparvenjarar, so at vit kunnu taka í móti so nógvum sum gjørligt.

**Úrval:** Vit hava venjingarvikuskifti, har útlendskur venjari leggur lag á, og vit stuðla íðkarum í at luttaka á venjingarlegum, sum liggja beint eftir kappingar uttanlands.

**Sjálvboðin:** Vit hava gott samband við foreldur v.m., sum hjálpa væl til, tá ið kappingar ella onnur tiltøk eru.

**Ítróttagleði:** Vit skipa fyri ymiskum sosialum tiltøkum. Harafturat árligi World Judo Day, ið er ein øðrvísi judouppliving.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**
Februar 2024: SJF-kapping - Oyrarbakki
Mars 2024: FM fyri børn - Oyrarbakki
Apríl 2024: FM fyri vaksin - Tórshavn
Oktober 2024: VJF-kapping - Giljanes
November 2024: HJF-kapping - Tórshavn

**Kappingar uttanlands:**
Januar 2024: RIG - Reykjavík, Ísland
Apríl 2024: Copenhagen Open - Danmark
Mai 2024: NM - Svøríki
Juni 2024: EM fyri veteranar - Sarajevo
Juni 2024: EM fyri Cadets - Sofia
Oktober 2024: HM fyri veteranar - USA
November 2024: EM fyri smátjóðir - Kýpros

## Virksemi annars

2024 hevur verið eitt hendingaríkt ár. Vit hava framvegis seks aktiv judofeløg, sum gera eitt stórt og gott arbeiði hvørt sær. Luttakaratalið er ymiskt, onkur feløg hava tíverri ikki havt líka nógvar luttakarar sum áður, meðan onnur feløg hava havt stóran vøkstur.
Stuttligt er at síggja, hvussu nógva orku feløgini, nevndir og venjarar leggja í at gera eitt gott arbeiði, og einki er at ivast í, at um tað eydnast at halda fast í hesum, so fer tað at síggjast aftur í størri luttøku, og fleiri av íðkarunum fara at kunna gera vart við seg - eisini í altjóða kappingum.
Vit hava ein altjóða dómara, sum viðlíkaheldur sína støðu sum altjóða dómari við at døma í minst trimum kappingum í EJU-regi árliga. Vit hava eisini ein annan dómara, sum dømir í norðurlendskum kappingum,og millum ungdómin síggja vit eisini áhuga fyri døming. Judo Føroyar vil eggja teimum at halda fram, so at tey koma upp á hægri stig, sum kann hava við sær, at tey fáa altjóða avbjóðingar.
Judo Føroyar skipar fyri tveimum FM-kappingum, einari fyri børn, sum flytur seg kring landið, og einari fyri vaksin, har finalurnar eru í samstarvi við badminton og borðtennis (Kontrast FM). Harafturat heita vit á lokalfeløgini um at skipa fyri felags venjingarlegum og kappingum. Farna árið hevur ein slík venjingarlega og tríggjar kappingar verið, har luttøkan hevur var sera stór.
Til uttanlands kappingar eru vit fast við til RIG í Reykjavík og til NM. Evropeiska Judosambandið hevur sum mál, at øll limalondini skulu luttaka í øllum EM-kappingunum. Vit eru ikki komin hartil enn, men í 2024 luttóku vit í EM fyri cadets (15-18 ára gomul), í EM fyri smátjóðir og í EM fyri veteranar. Vit halda fram við at luttaka í hesum kappingunum, og í framtíðini vilja vit stremba eftir at luttaka í kappingum fyri unglingar, U23 og seniorar.
Í HM kappingum hava vit farna árið bert luttikið í HM fyri veteranar. Luttøkan í judo á oyggjaleikum hevur verið sera svikalig nógvu seinastu árini, men tá ið judo hevur verið á skránnið, hava vit luttikið.
Nú oyggjaleikirnir vera í Føroyum í 2027, hava vit sjálvsagt sett judo á skránna. Málið hjá okkum er at hava luttakarar í øllum vektbólkum á leikunum - bæði hjá kvinnum og monnum.

## Framtíðarætlanir

Judo Føroyar ætlar framhaldandi at útbúgva bæði venjarar og dómarar. Eitt fokuspunkt hjá okkum er at økja talið á kvinnuligum judoíðkarum. Hetta verður gjørt við m.a. at útbúgva kvinnuligar venjarar, fáa kvinnuligar venjarar úr útlondum at halda skeið, sum harumframt eisini umfatar venjingar, har bæði kynini luttaka.
Judoíðkaratalið í Føroyum skal eisini økjast, og vit fara at gera eina fimm ára ætlan, sum hevur til endamáls at økja luttakara-


Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

talið upp í 500 í fyrsta umfari. Tá ið tað málið er rokkið, seta vit okkum nýggj mál. Samstundis sum judíðkararnir blíva fleiri, vænta vit, at vit fáa fleiri úrvalsíðkarar. Ætlanir okkara fevna eisini um, at vit skulu taka okkum serliga væl av hesum íðkarum. Stutt sagt fevna ætlanir okkara um framgongd á øllum økjum.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Havnar Judofelag Nihon, Tórshavn | 66 |
| Sunda Judofelag Tori, Oyrarbakki | 16 |
| Vága Judofelag, Miðvágur | 41 |
| Klaksvíkar Judofelag Kocho, Klaksvík | 36 |
| Skálafjarðar Judofelag, Strendur | 23 |
| Suðuroyar Judo, Vágur | 24 |

## Sosialir miðlar

judo føroyar - leitiúrslit | Facebook

**Nevndarforfólk:**
Sofus Debes Johannesen

**Nevndarlimir:**
Kristianna Solberg á Túgvu, næstforfólk
Sanna Nolsøe Djurhuus
Andrias Sumberg
Silja Johannesen

**Stigtøkunevnd:** Viðlíkhalda beltiskrøv og góðkenna beltisroyndir
Andrias Sumberg, forfólk
Sigmundur Johansen
Sofus Debes Johannesen

**Lønt starvsfólk:**
Sanna Nolsøe Djurhuus, aðalskrivari 0.25

# Kurvabóltur

Kurvabóltssamband Føroya / kurvabolt@kurvabolt.fo / Tel 590696 / www.kurvabolt.fo

**Eitt av hæddarpunktunum hetta árið hevur verið væleydnaða barnakappingin, sum hevur savnað sera nógvar ungar kurvabóltsspælarar. Hetta er tekin um, at kurvabóltur er vorðin ein alsamt meira vælumtókt ítrótt millum børn og ung.**

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

07.10.23 til 11.05.24: Landskapping, menn - Klaksvík, Tórshavn, Toftir, Runavík og Kambsdalur

07.10.23 til 11.05.24: Landskapping, kvinnur - Klaksvík, Tórshavn og Toftir

Vit skipa fyri dagskappingum og venjingardystum, har nógv børn og ung luttaka.

## Virksemi

2024 hevur verið eitt spennandi og mennandi ár fyri Kurvabóltssamband Føroya (KSF). KSF vil altíð leggja seg eftir, at sambandið er eitt virkið og vakið samband, sum skal menna møguleikarnar hjá limum okkara at fáa best møguligu karmar at virka undir. Uppgávur og skyldur hjá KSF økjast ár um ár, og 2024 var als einki undantak.

**Atljóða samstarv**

Góða samstarvið, sum vit hava havt við danska kurvabóltssambandið (DBBF), heldur fram. Arbeitt verður í løtuni við at gera eina verkætlan í sambandi við dómaraútbúgvingar á altjóða góðkendum stigi.

**Eyka aðalfundur**

KSF hevði eykaaðalfund í fjør. Sambandið hevði tørv á at fáa útgreinað nøkur ítøkilig mál í viðtøkunum. Aðalfundurin gekk sera væl, og øll mál vórðu samtykt uttan viðmerkingar.

**Fyrireikingar til Oyggjaleikirnar í 2027**

Fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar í 2027 eru farnar í gongd. Longu nú krevur hetta sera nógva orku. Tað er sera nógv, sum skal koma í rættlag, áðrenn vit eru klár til at taka í móti hinum oyggjalondunum í 2027. Avgerð er tikin um, at kurvabóltur verður spældur í nýggju stórhøllini við Tjarnir. Hetta er sera spennandi fyri okkum í KSF. Nú ræður um hjá okkum - saman við Tórshavnar kommunu og saman við Tjarnir - at fáa allar karmar at verða so góðar sum yvirhøvur gjørligt

**Oyggjaleikakapping á Ynys Mon í 2025**

Ein onnur spennandi uppgáva fyri KSF í ár er luttøkan í kurvabóltskappingini í Ynys Mon í summar. Hetta er ein kapping fyri oyggjaleikalond, og vit eru sera spent at senda bæði mans- og kvinnulandslið til kappingina. Kurvabóltur er ikki við sum ítróttagrein á sjálvum oyggjaleikunum, og tí gjørdi Ynys Mon av at skipa fyri kurvabóltskapping í summar. Landsliðsvenjarar eru settir, og venjingar eru byrjaðar. Ferðalag okkara fer at telja umleið 30 persónar, sum eru leikarar og leiðarar, og vit gleða okkum at umboða Føroyar í hesi kapping, har vit vónandi fara at klára okkum væl.

**Barnakappingar her heima**

Eitt av hæddarpunktunum hetta árið hevur verið væleydnaða barnakappingin, sum hevur savnað sera nógvar ungar kurvabóltsspælarar. Hetta er tekin um, at kurvabóltur er vorðin ein alsamt meira vælumtókt ítrótt millum børn og ung. Luttakaratalið til kappingarnar er vaksið munandi, og vit fegnast um, at fleiri aldursbólkar eru komnir afturat. Vit vilja takka øllum feløgum og venjarum, sum hava gjørt hetta møguligt, og vit síggja fram til enn fleiri kappingar í komandi ári.

**Skúlaleikir**

Góða og jaliga gongdin við Skúlaleikunum heldur fram til stóra gleði fyri øll tey, sum ganga í 6. flokki kring landið. Hetta tiltakið hevur víst seg at vera eitt gott fet inn í kurvabóltsítróttina fyri nýggjar spælarar, og vit gleðast um, at hetta hevur eydnast væl. Skúlaleikir eru eitt sera gott tiltak, sum gevur børnum høvi at royna ymiskar ítrottargreinar.

**Stutt um árið**

Vit í KSF gleðast um 2024, og vit kunnu líta aftur á árið við gleði. Vit meta, at gongdin er framvegis hin rætta, og vit byrja at fáa meira samstarv uttannfyri Føroyar, og hesum verður avgjørt arbeitt víðari við. Vit merkja eisini, at arbeiðsuppgávur okkara gerast alsamt fleiri.

**Sosialir miðlar:**

Kurvabóltssamband Føroya - Facebook

kurvaboltssambandforoya - Instagram




## Nevndarforfólk:
John Norðbúð Thomsen

## Nevndarlimir:
Sára Isfeldt, peningarøkil
Anna Jakobsen, skrivari
Magnus Jakobsen, nevndarlimur
Sølvi Olsen á Skúr, nevndarlimur

## Aðrar nevndir:
**Kappingarnevnd:**
Kenneth á Argjaboga
Súsanna Mørk
Jónathan Miné Olsen

**Dómsnevnd**
Sigrid Midjord
Rainer Latupeiressa
Pól Jakobsen

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Hamar Tórshavn | 45 |
| Sporðdrekin - Tórshavn | 70 |
| Ravnur - Toftir | 56 |
| Hávur - Klaksvík | 52 |
| Falkur - Kambsdalur | 14 |
| Tarvur - Runavík | 15 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Parasport

Parasport Føroyar / parasport@parasport.fo / Tel 217975 / www.parasport.fo

**Markleys leggur stóran dent á felagsskap, menning og stuttleika. Hvussu dugnaligur ein ynskir at blíva, er upp til hvønn einstakan.**

## Kappingar

**Í Føroyum:**

21.03 - FM Special Olympics í borðtennis, Frælsið
14.03 - FM Special Olympics í bowling, Leirvík
17.03 - FM Special Olympics í boccia, við Løgmannabreyt
18.03 - Jysk open svimjikapping, Gundadali
17.11 - Jólakapping í SO svimjing, Gundadalur
05.12 - Jólakapping í SO boccia, Løgmannabreyt
05.12 - Jólakapping í SO borðtennis, Frælsið
12.12 - Jólakapping í SO bowling, Leirvík
06.07 - Bocciakapping á Eystanstevnu

**Uttanlands:**

24. - 26. mai: SO idrætsfestival, Frederikshavn DK. Svimjing, borðtennis, boccia, bowling og fimleikur.
7. - 14. juli: 2024 International Framerunning Cup, DK.

## Virksemi

Strategiin hjá Parasport bleiv samtykt í 2023, og hon er galdandi til 2028
Missión: Øll kunnu íðka
Visjón: Øll skulu hava møguleika at íðka á hóskandi stigi og mennast í felagsskapi.
Fyri at kunna náa visjónini og veita øllum møguleika at íðka á hóskandi stigi og at mennast í felagsskapi, leggur Parasport Føroyar árini 2023-2028 dent á fimm fokusøki.

**1: Greina og styrkja fyriskipanarliga partin.**
Hetta arbeiðið er ígongd. Uppgávurnar eru greinaðar, og ábyrgdarøkini eru býtt út.

**2: Styrkja tilvitanina í samfelagnum um Para-rørsluna og Special Olympics-brandið**.
Størri dentur er lagdur á at brúka sosialar pallar at vísa á virksemi og møguleikar í Para- og Special Olympics ítrótti. SoMe-fólk er sett at hjálpa okkum at røkka einum breiðari skara.

**3: Vaksa um breiddina og styrkja elituna**
Arbeitt verður framhaldandi við verkætlanini Markleys, ið skal eggja yngri íðkarum at gera meir við ítróttina, eins og íðkarar, ið vísa serligt hegni, fáa størri stuðul og vegleiðing.

**4: Fremja inklusjón**
Á heysti í 2024 vitjaðu vit í íslendska parasport sambandinum, har vit fingu kunning um verkætlan, ið skal fremja inklusjón. Vónin er at fara undir líknandi verkætlan í Føroyum næstu árini.

**5: Betra um og birta undir samstarv við viðkomandi feløg og samstarvsfelagar**
Vit gleðast um, at vit hava fingið enn betur samstarv við bæði feløg og sersambond, og at Havnar svimjifelag hevur valt at gerast limur í Parasport, soleiðis, at teirra parasvimjarar nú hava møguleika at luttaka í fleiri parakappingum. Vónin er, at fleiri feløg gera tað sama, soleiðis, at tað við tíðini er natúrligt, at feløg eisini hava málbólkin í limaskaranum.

## Framtíðarætlanir

Fleiri kappingar og tiltøk eru á skránni í 2025
Umframt tær átta føstu kappingarnar, sum Parasport skipar fyri, er ætlanin eisin at luttaka í fleiri øðrum kappingum í ymiskum ítróttargreinum. Fimm svimjarar fara at luttaka í SO svimjikapping í Íslandi í mai.
NM í boccia verður í Íslandi í mai, og eftir ætlan verða fýra føroyskir luttakarar við har. Umframt hetta fer Áki Joensen, ið hevur víst stórform seinastu tíðina, at kappast í Boccia challenger kapping í Póllandi í juni. Framerunning international Cup verður sum vant í Danmark í juli. Starvsnevndin hevur úttikið fýra íðkarar at luttaka.
Tveir íðkarar vera við í European Youth para games í Istanbul í juli í boccia og svimjing, og ein svimjari skal luttaka í Virtus HM í svimjing í Bangkok í august.
Vit hava fingið innbjóðing til Small nations SO bocciakapping í Liktinstein í september, umframt, at ætlanin er at hava luttakarar við í NM í svimjing komandi vetur.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/parasportforoyar
www.instagram.com/parasportforoyar/
www.tiktok.com/@parasport.froyar



**Nevndarforfólk:**
Petur Elias Petersen

**Nevndarlimir:**
Tóra Norðgerð, næstforfólk
Hans Karl Højgaard, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Tróndur Ravnsfjall, ítróttaráðgevi

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| IF Smæran | 100 |
| Svanur IF | 140 |
| Havnar svimjifelag | 345 |
| Fimleikafelagið Ljósið | 270 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Ríðing

Ríðisamband Føroya / info@ridisamband.fo / Tel 511618 / www.ridisamband.fo

**Tað eru fimm ymiskar kappingargreinar. Trav, Tølt, Skeið, Tvíspor ung og Tvíspor vaksin. Sostatt eru 25 FM kappríðingar á hvørjum ári. Hetta eru kappingar, ið Ríðisamband Føroya skipar fyri í tøttum samstarvi við feløgini.**

## Kappingar

**Í Føroyum**

**FM kappingar:**

Á hvørjum ári verður skipað fyri regluligum FM kappingum. Fimm kappingarumfør eru vanliga í kappríðing, har dystast verður um hava skjótasta rossið í fimm ymsum greinum. Hetta eru kappingar, ið byrjaðu fyri 100 árum síðani. Tí er kappríðing millum elstu ítróttargreinar í Føroyum.

Tað eru fimm ymiskar kappingargreinar. Trav, Tølt, Skeið, Tvíspor ung og Tvíspor vaksin. Sostatt eru 25 FM kappríðingar á hvørjum ári. Hetta eru kappingar, ið Ríðisamband Føroya skipar fyri í tøttum samstarvi við feløgini.

Skipað verður eisini fyri fýra kappingum í gonguløgum fyri íslandsross. Hendan kappingin er deild upp í bólkar fyri tey ymsu gonguløgini og sergreinar í hesum gonguløg. Vanliga verður kappast í seks greinum, t.v.s., at tað eru í øllum førum 24 kappingar hvørt ár.

Hesar kappingar verða fyriskipaðar eftir altjóða lógarverki, tí hetta er grein, har ross, reiðfólk og dómarar hava møguleika at koma út um landoddarnar at kappast.

Um veturin skipa feløgini eisini hvør í sínum lagi fyri kappingum. Hetta gongur serliga fyrí seg í reiðhallunum í Havnardali og nú eisini í Miðvági, har góðir møguleikar eru fyri hesum.

**Uttanlands:**

**HM silvur**

Triðja árið á rað vann føroysk ríðing heiðurstekin í NM ella HM kapping í gonguløgum. Aftur hesaferð var tað Knút Lútzen á hestinum Kára frá Ásbrú. Teir báðir vunnu silvur í NM í Herning. Afturat teimum var stórur hópur í Herning, og vóru fleiri onnur, sum eisini rukku finalupláss í teirra greinum.

## Virksemi annars

**Nýggj ríðibreyt í Havnardali**

Tað má metast sum afturstig fyri ítróttina, at elsta og størsta ríðibreytin í landinum má víkja fyri nýggja innkomuvegnum í Tórshavnar kommunu.  Riðið hevur verið kapp í Marknagili á hvørjum ári síðani 1970. Føroya Ríðingarfelag, ið eigur breytina, er tó í samstarvi við kommununa, farið í gongd við ætlanir um nýggja breyt á økinum hjá felagnum í Havnardali. Vónin hjá RF er, at breytin í Havnardali verður klár til ólavsøku, tá ið FM kapping er á skrá.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/profile.php?id=100063579280565
www.instagram.com/ridisambandforoya/

**Nevndarforfólk:**
Brandur í Dali

**Nevndarlimir:**
Zacharias R. Jacobsen, næstforfólk
Valborg H. Laksáfoss, nevndarlimur
Poula Tornby, tiltakslimur
Andrias Nielsen, tiltakslimur

**Lønt starvsfólk:**
Eyðna Simonsen, skrivari
Nina Brockie, ungdómsmennari

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Føroya Ríðingarfelag, Tórshavn | 400 |
| Føroyskt Íslandsrossafelag, Tórshavn | 150 |
| Vága Ríðingarfelag, Miðvágur | 120 |
| Dalaross, Kollafjørður | 50 |
| Suðurross, Porkeri | 30 |
| Sleipnir, Runavík | 50 |


Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Rógving

Róðrarsamband Føroya / rsf@rsf.fo / Tel 267553 / www.rsf.fo

**Flestu feløgini undir RSF bjóða øllum áhugaðum møguleika at brúka høli og bátar til stuttleikavenjingar - uttan krav um kappingarluttøku.**

## Strategi

**Breidd:**
Flestu feløgini undir RSF bjóða øllum áhugaðum møguleika at brúka høli og bátar til stuttleikavenjingar - uttan krav um kappingarluttøku.

**Úrval:**
RSF er ikki partur av úrvali hjá ÍSF, tí sambandið hevur ikki altjóða viðurkenning. Tó hava vit landslið, sum vit senda til DM, EM og HM á hvørjum ári.

**Sjálvboðin:**
Øll feløg undir RSF gera eitt megnar arbeiði sjálvboðin - uttan sjálvbodnu fjøldina var ógjørligt at skipa fyri kappróðri - inni sum úti.

**Ítróttagleði:**
RSF frøist um, at serliga ung róðrarfólk týðiliga vísa gleðina við at hoyra til róðrarumhvørvið.

## Kappingar

**Í Føroyum:**
Sjey FM kappingar (+ ein útsettur barnaróður frá sundalagsstevnu), trý Ódnartøk, fýra Grand Prix í inniróðri og ein talgild inniróðrarstevna í Norðurlandameistaraskapinum.

02.03.2024 Open Nordic Championship, Gøtugjógv (netborið)
09.03.2024 Grand Prix og FM í inniróðri - Við Streymin
04.05.2024 Ódnartak 1. - Norðragøta
11.05.2024 Ódnartak 2. - Runavík
18.05.2024 Ódnartak 3. - Miðvágur
01.06.2024 Norðoyastevna - Klaksvík
15.06.2024 Sundalagsstevna - Kollafjørður
22.06.2024 Jóansøka - Vágur
29.06.2024 Fjarðastevna - Vestmanna
06.07.2024 Eystanstevna - Runavík
13.07.2024 Vestanstevna - Sandavágur
20.07.2024 Útsettur barnaróður frá sundalagsstevnu - Kollafjørður
28.07.2024 Ólavsøka
05.10.2024 Grand Prix 1 - Kambsdalur
02.11.2024 Grand Prix 2 - Trongisvágur
07.12.2024 Grand Prix 3 - Kambsdalur

**Uttanlands:**
Januar 2023: DM í Gladsaxe, Danmark
Februar 2024: EM í Prag, Kekkia
Februar 2024: HM í Prag, Kekkia

## Virksemi

Árligi aðalfundurin hjá RSF er í mars á hvørjum ári. Á heysti var eftirmetingarfundur fyri kappróðurin. Eykaaðalfundur var 30. september. Tað einasta á skránni var nevndarval. Tríggir av fýra nevndarlimum vildu verða loystir úr nevndini.
Umframt kappingar hevur RSF luttikið í Skúlaleikum. Umboð fyri nevndina hevur havt ein fund uttanlands við European Rowing, har vit vóru partur av sendinevndini hjá Dansk Roning.
Sum nakað nýtt í 2024 stóð RSF fyri at stroyma Ódnartøk á Youtube-vanga okkara.
Í mai varð skipað fyri einum róðursfólkaskeiði í Hósvík.

## Framtíðarætlanir

Vit fara at arbeiða fram ímóti at fáa Parasport og aðrar kappingarteinar enn 2000 m. við í inniróður.
Arbeiðið við at søkja um altjóða limaskap í World Rowing er nærri einum máli.
Vit fara at skipa landsliðsarbeiðið betur.
Uppstart í coastal rowing.
Leggja strategi, visjón og missión fyri RSF - harvið eisini gjølligar 2 og 5 ára ætlanir.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/rsf1980
#faroeserowing á Instagram



**Nevndarforfólk:**
Petur Hansen

**Nevndarlimir:**
Vár G Hansen, næstforkvinna
Rebekka Jacobsen, skrivari
Mira Klit, kappingarleiðari
Unn Eldevig, nevndarlimur
Henrik Rahbek, nevndarlimur
Jógvan Midjord, eykalimur

**Dómsnevnd:**
Óla Jákup av Fløtum, nevndarlimur
Jórun Høgnesen, nevndarlimur
Sunrid Traðará, nevndarlimur

**Fíggjarnevnd:**
Petur Hansen, formaður
Vár G. Hansen, nevndarlimur
Unn Eldevig, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Kaysten Rasmussen, samskipari | 0,5 |
| Ulrik Andersen, KT-umsitari | 0,5 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Argja róðrarfelag | 72 |
| Árnafjarðar róðrarfelag | |
| Eiðis róðrarfelag | 21 |
| Froðbiar sóknar róðrarfelag | 39 |
| Haldórsvíkar kapproðrarfelag | |
| Havnar róðrarfelag | 196 |
| Hósvíkar róðrarfelag | 50 |
| Hvalbiar róðrarfelag | 9 |
| Hvalvík- Streymnesar róðrarfelag | 25 |
| ÍF kapproður | 30 |
| Kapproðrarfelagið NSÍ | 84 |
| Kapproðrarfelagið Tindur | 75 |
| KÍF kapproður | 60 |
| Klaksvíkar róðrarfelag | 102 |
| Kvívíkar sóknar róðrarfelag | 20 |
| Miðvágs róðrarfelag | 18 |
| Nólsoyar ítróttarfelag, róðrardeild | 12 |
| Norðdepils Hvannasunds róðrarfelag | 55 |
| Róðrardeild Sandavágs ítróttarfelag | 56 |
| Róðrarfelagið Knørrur | 84 |
| Skála róðrarfelag | 25 |
| Strálan, Strendur | 7 |
| Sunda róðrarfelag | |
| Sumbiar ítróttafelag | 8 |
| Sørvágs róðrarfelag | 45 |
| Vágs kapproðrarfelag | 28 |
| VÍF kapproður | 80 |
| **Tilsamans** | **1201** |

SERSAMBANDIÐ FYRI SÚKKLING OG TRIATHLON

# Súkkling og Triathlon

Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon / sst@sst.fo / Tel 216420 / www.sst.fo

**Fyrireikingar til oyggjaleikir í Føroyum fara at fylla heilt nógv komandi tíðina. Harumframt vilja vit styrkja førleikarnar við venjaraskeiðum og dómaraskeiðum.**

## Strategi

**Breidd:**

Sersamband og feløg skipa fyri sera nógvum kappingum, so høvi er at royna seg. Feløgini eru eisini sera virkin við felags-túrum.

**Úrval:**

Landsliðsvenjari er settur at menna landsliðini - serliga fram móti oyggjaleikum í 2025 og oyggjaleikum í 2027.

**Ítróttagleði:**

Nógv høvi eru at royna ítróttargreinarnar, sum SST umboðar.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

20.05.24: FM TRI 2024 Sprint, Tórshavn
30.08.24: FM MTB 2024 XCC Stuttteinur, Tórshavn
31.08.24: FM MTB 2024 XCO Miðteinur, Tórshavn
01.09.24: FM TRI 2024 OL teinur, Klaksvík
04.09.24: FM VEG 2024 Tíðarsúkkling, Strendur
15.09.24: FM VEG 2024 Vegasúkkling, Skálavík
31.12.24: Nýggjársfleirkappingin 2024, Tórshavn

## Virksemi

Umframt nógvar størri og smærri kappingar, sum tey fýra limafeløgini skipaðu fyri í 2024, skipaði SST fyri seks FM-kapp-ingum.
20. mai varð kappast í FM Triathlon Sprint í Havn. Magni Hansen vann frammanfyri Bergtór Tórsteinsson og Andrass Joensen.
30. august varð kappast í FM í fjallasúkkling - sonevndum XCC Stutteini - í Havn. Helgi Winther Olsen vann frammanfyri Niklas Hallgren Niclassen og Gunnar Dahl-Olsen.
Dagin eftir, tann 31. august, varð kappast í FM í fjallasúkkling - sonevndum XCO Miðteini - í Havn. Helgi Winther Olsen vann aftur. Hesa ferð var tað frammanfyri Gunnar Dahl-Olsen og Jóhannes Jóannesson.
1. september varð kappast í FM í triathlon á OL-teini í Klaksvík. Hjá monnum vann Helgi Winther Olsen frammanfyri Bergtór Tórsteinsson og Jákup Petur Eliassen. Hjá kvinnum vann Anna Lovisa Mýri.
4. september var FM í tíðarkoyring á Strondum. Helgi Winther Olsen vann. Honum á baki komu Pauli Poulsen og Bergtór Tórsteinsson.
15. september varð skipað fyri FM í vegasúkkling á Sandoynni. Helgi Winther Olsen vann aftur. Hann var frammanfyri Nikas Hallgren Niclassen og Paula Poulsen.
Í flestu kappingum varð kappast í fleiri ymiskum aldursbólkum.
Sersambandið umboðar tríggjar ymiskar ítróttargreinar, sum eru súkkling á vegi, í fjøllum og triatlon. Hóast íðkarar ganga aftur í øllum trimum greinum, hava tey flestu eina ítróttagrein, sum teimum dámar best ella eru sterkast í. Tó eru summi, sum ferð-ast lætt millum ymsu ítróttargreinarnar, og í 2024 hevði Helgi Winther Olsen eitt heilt serligt ár við sigrum bæði í súkkling á vegi, í fjøllum og í triatlon.
Komandi oyggjaleikirnir í Orknoyggjum í 2025 og í Føroyum í 2027 fylla nógv, og í tí sambandi hevur SST gjørt avtalu við Torkil Veyhe um at taka sær av landsliðunum. Torkil hevur drúgvar royndir í súkkling á hægsta stigi, og hann fer vónandi at hjálpa okkara íðkarum at gerast so góðir, sum teir kunnu til komandi avbjóðingarnar.

## Framtíðarætlanir

Fyrireikingar til oyggjaleikir í Føroyum fara at fylla heilt nógv komandi tíðina. Harumframt vilja vit styrkja førleikarnar við venja-raskeiðum og dómaraskeiðum.

## Sosialir miðlar

Facebook: Sersambandið fyri súkkling og triathlon
Instagram: sst.fo



**Nevndarforfólk:**
Arnfinnur Helmsdal

**Nevndarlimir:**
Andrass Joensen, næstforfólk
Geyr Gilsteinsson, nevndarlimur

**Starvsfólk:**
Sølvi Reinert Hansen, samskipari 0.1
Torkil Veyhe, landsliðsvenjari 0.2

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Súkklu og Triathlon felag | 25 |
| Norðstrok | 33 |
| Skatefelagið | 17 |
| Troy | 3 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

SKJÓTISAMBAND FØROYA

# Skjóting

Skjótisamband Føroya / skot@skot.fo / Tel 244143 / www.skot.fo

**Føroysk ítróttarsøga bleiv skrivað, tí fyri fyrstu ferð vunnu vit eitt heiðursmerki í norðurlandameistara skjótikapping. Tað hendi, tá ið Tórur Fløtt úr Sunda Byrsufelagi vann silvurheiðursmerki í OL skeet greinini.**

## Strategi

**Breidd - Úrval - Sjálvboðin – Ítróttagleði:**

Í okkara altjóða arbeiði verður av og á spurt um, hvørja strategi vit hava í Føroyum. Tá er gott at hava ÍSF strategiina at vísa á, hóast hon ikki er beinleiðis í gerandis-tilvitskuni hjá SkF.

Nevnast kann t.d., at viðvíkjandi breiddini er okkara yngsti íðkari 15 ár og tann elsti er 93 ár. Í samband við úrval krevur okkara altjóða limaskapur, at vit mugu seta fígging av til at menna okkara landsliðsíðkarar.

Allar skjótibreytir í Føroyum vera í dag riknar av sjálvbodnum í limafeløgunum. Uttan hesi sjálvbodnu hevði neyvan nøkur breyt verið í dag. Tey sjálvbodnu gera hetta arbeiðið, tí tey hava alsk til felagið og ítróttina. Tey gera tað ikki við vinningi fyri eyga.

Uttan at vit seta orð á tað áðrenn, verður allíkavæl nógv í strategiini brúkt, hóast tað ikki er tilvitað.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

| | | |
|---|---|---|
| 30/03 | Veiðifelagið Byrsumúli | F80 kappingin |
| 13/04 | Eysturskot | NT kapping |
| 20/04 | Sunda Byrsufelag | 38 ára kapping |
| 27/04 | Eysturskot | Flaggdagskapping |
| 27/04 | Vestmanna Byrsufelag | Krossmessukapping |
| 04/05 | Veiðifelagið Byrsumúli | 13. Simme Cup |
| 25/05 | Veiðifelagið Byrsumúli | Vármúlakapping |
| 25/05 | Sunda Byrsufelag | Magn við Streymin |
| 01/06 | Eysturskot | ABT kapping |
| 08/06 | Eysturskot | NT kapping |
| 15/06 | Eysturskot | F-16 kappingin |
| 15/06 | Sunda Byrsufelag | Summarkappingin |
| 22/06 | Veiðifelagið Byrsumúli | Jóansøkukappingin |
| 22/06 | Vestmanna Byrsufelag | Syftusøkukappingin |
| 29/06 | Veiðifelagið Byrsumúli | Gentleman 2024 |
| 06/07 | Eysturskot | ABT kapping |
| 13/07 | Eysturskot | NT kapping |
| 20/07 | Veiðifelagið Byrsumúli | Tórshamar Open |
| 10/08 | Eysturskot | Eysturoyar Cup |
| 17/08 | Eysturskot | FM ABT |
| 24/08 | Veiðifelagið Byrsumúli | FM OL Trap |
| 31/08 | Vestmanna Byrsufelag | FM OL skeet |
| 07/09 | Eysturskot | FM Nordisk Trap |
| 14/09 | Sunda Byrsufelag | Veðrakappingin |
| 21/09 | Veiðifelagið Byrsumúli | Mikkjalsmessukappingin |
| 26/10 | Veiðifelagið Byrsumúli | Harukappingin |

**Uttanlands:**

| | | |
|---|---|---|
| 13/04 | Danmark | Sydvestjysk Grand Prix |
| 27/04 | Danmark | Horsens GP |
| 11/05 | Danmark | CPH Grand Prix |
| 02/08 | Danmark | Nordic Shooting Region |
| 03/08 | Ísland | Viking Cup 2024 |
| 23/08 | Svøríki | Landskampen 2024 - Karlstads Jaktskytteklubb |
| 28/09 | Danmark | Horsens Efterårs GP |

## Virksemi

**Norðurlandameistarakapping 2024**

Norðurlandameistarakappingin, sum er annaðhvørt ár, bleiv hildin í Danmark fyrst í august mánaði í 2024.

Føroysk ítróttarsøga bleiv skrivað, tí fyri fyrstu ferð vunnu vit eitt heiðursmerki í norðurlandameistara skjótikapping. Tað hendi, tá ið Tórur Fløtt úr Sunda Byrsufelagi vann silvurheiðursmerki í OL skeet greinini. Innleiðandi tølini hjá Tóri vóru so mikið góð, at um vit samanbera úrslitið hjá honum við OL í Paris, sum bleiv avgreitt samstundis, so hevði hann einans verið tvær dúgvur frá umskjóting í at sleppa í eina OL finalu!

Eisini Alex Johannesen úr Eysturskoti megnaði at vinna finalupláss í OL trap greinini. Í finaluni bleiv tað til eitt fimta pláss.

Leivur Joensen úr Sunda Byrsufelagi luttók fyri fyrstu ferð á føroyska landsliðinum, tí Skjótisambandið hevði avlagt tvey pláss til unglingar á landsliðinum í ár. Í unglinga OL skeet kappingini megnaði Leivur at vinna finalupláss. Tað bleiv eisini til eitt fimta pláss hjá honum í finaluni.

Jógvan Egholm úr Vestmanna Byrsufelagi, Bartal Klettheyggj og Johnhard Klettheyggj úr Veiðifelagnum Byrsumúla luttóku eisini í kappingini, men teir blivu ov stuttir til at vinna sær finalupláss.

**SkF vertur fyri altjóða aðalfundi**

Tá ið tað gjørdist greitt, at aðalfundurin í norðurlendska skjóti-



**Nevndarforfólk:**
Esmar A. Joensen

**Nevndarlimir:**
Jón Jacobsen, nevndarlimur
Jónstein Johannesen, nevndarlimur
Jógvan Egholm, nevndarlimur
Tórur Fløtt, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Herleif Hammer, skrivari

**Feløg og limatøl**

| | |
|---|---|
| Veiðifelagið Byrsumúli (VBM), Tórshavn | 199 |
| Eysturskot (EYS), Leirvík | 51 |
| Sunda Byrsufelag (SBF), Norðskáli | 23 |
| Vestmanna Byrsufelag (VBF), Vestmanna | 44 |

**Sosialir miðlar**
www.facebook.com/Skjotisamband
twitter.com/skjotisamband
www.instagram.com/skjotisamband_foroya/

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

sambandinum NSR ikki kundi avgreiðast í Danmark í 2024, tók Skjótisamband Føroya (SkF) av møguleikanum og bjóðaði seg fram at vera vertur fyri fundinum í Føroyum.
Limalondini tóku undir við hesum, og fríggjadagin tann 6. september var aðalfundurin hjá NSR fyri 2024 hildin í nýggju felagshølinum hjá Veiðifelagnum Byrsumúla á Sandvíkum í Tórshavn.
Eftir sjálvan aðalfundin varð skipað fyri skjótikapping millum umboð hjá limalondunum. Kappingina vann forsetin í Estlandi, nummar tvey gjørdist forsetin í Føroyum og bronsuna vann forsetin í Finnlandi. Umboðini vóru sera hugtikin av nýggju skjótibreytini á Sandvíkum.
Eftir hetta var rundferð til kend støð í Føroyum, og seinni á kvøldi fingu fólk ein betri bita.
Samanumtikið var tað ein sera góður dagur, og SkF hevur fingið stórt rós fyri tiltakið. Fleiri hava havt á orði, at hetta var ikki seinastu ferð, at tey vóru í Føroyum.
Limalondini í norðurlendska skjótisambandinum eru Ísland, Føroyar, Stóra Bretland, Írland, Noreg, Svøríki, Danmark, Finnland, Estland, Lettland og Litava

**Limaskapur í ESC**
Eftir at Skjótisamband Føroya fekk limaskap í altjóða skjótisambandinum, ISSF, hevur í eina tíð eisini verið arbeitt við at blíva limur í evropiska skjótisambandinum (ESC).
Arbeiðið er nú komið so mikið langt, at formansskapurin í ESC hevur játtað føroyskan limaskap treytað av, at aðalfundurin endaliga samtykkir tað í oktober mánaði í 2025.
Formansskapurin hevur samstundis játtað, at okkara landslið nú kunnu luttaka í øllum EM kappingum á jøvnum føti við øll onnur lond.
Vit í SkF fegnast um hesa fyribils góðkenning. Hetta víðkar munandi um kappingar-útboðið í Evropa, sum okkara íðkarar kunnu luttaka í.

**Príshækkingar**
Prísurin á patrónum er hækkaður nógv, síðan inflatiónin kom yvir okkum. Hóast prísurin ikki hækkaði ógvusliga í fjør, dýrka leirdúgvurnar eisini, tí nú síggja vit somu ógvusligu príshækkingar á dúgvunum, sum vit hava sæð á patrónunum. Seinastu árini er prísurin á einum umfari (25 dúgvur + 25 patrónir) hækkaður við 75 prosentum.
Ógvusligu príshækkingarnar eru kanska ein av størstu hóttanum ímóti at fáa nýggjar íðkarar til leirdúgvuskjóting í løtuni, tí umframt at prísurin á patrónum og dúgvum er høgur, so er ítróttarútgerðin til at íðka skjóting eisini kostnaðarmikil.

# Svimjing

Svimjisamband Føroya / ssf@ssf.fo / Tel 607559 / www.ssf.fo

**Í Føroyum hava góð prát verið við fólk í skúlaverkinum um møguligt samstarv í sambandi við lívbjarging og svimjifrálæru. Endamálið hjá SSF er altíð, at so nógv sum gjørligt skulu kunna læra at svimja og lívbjarga.**

## Strategi

Sum umbiðið eftirmetti SSF strategiina hjá ÍSF saman við feløgunum á forfólkafundi í september 2024. Semja var um at halda seg til hana. Hildið var tó eisini at tillagingar mugu gerast í strategiini.

**Breidd:**

SSF hevur ikki beinleiðis skipað fyri breiddartiltaki í 2024; men HS skipaði fyri felags venjingarlegu, umframt at alt fleiri luttaka á barnastevnunum.

**Úrval:**

SSF luttók við góðum úrslitum í Danish Open, NMU, NM/NJM, EM, HMS og HM. Serliga EM og HMS eydnaðust væl, tí íðkarar kvalifiseraðu okkum til stig 2 í nýggju úrvalsskipanini, umframt NMU og NJM har vit vunnu gull-, silvur-, og bronsuheiðursmerki.

**Sjálvboðin:**

Einki beinleiðis virksemi var í 2024. Umstøðurnar eru tó vorðnar munandi frægari við nýggja langhylinum í Havn. Íðkaranevndin skipaði fyri felags gallaveitslu.

**Ítróttagleði:**

Størsta framgongd í 2024 var, at íðkarar í størri mun eru við í avgerðunum umvegis íðkaranevndina. Hartil er DEI (inklusjón) sett á breddan.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

13. - 14. januar 2024 SuSvim Open (Vágur)
3. februar 2024 FLOT-stevna (Toftir)
17. - 18. februar 2024 Ægir Open (Klaksvík)
24. februar HS-stevna (Argir)
9. mars 2024 SuSvim-stevna (Vágur)
16. - 17. mars 2024 SuSvim Open (Vágur)
6. apríl 2024 Reysta-stevna (Leirvík)
20. - 21. apríl 2024 ABMS 2024 (Klaksvík)
25. apríl 2024 HS Flaggdagssprint (Tórshavn)
10. - 12. mai 2024 FML/JML (Vágur)
28. - 29. juni 2024 Tórshavn Open (Tórshavn)
21. september 2024 HS-stevna (Argir)
28. - 29. september 2024 HS Open (Tórshavn)
12. oktober 2024 SuSvim-stevna (Vágur)
26. - 27. oktober 2024 Ægir Open (Klaksvík)
8. - 10. november 2024 FMS/JMS 2024 (Tórshavn)
7. desember 2024 FS-stevna (Fuglafjørður)
14. desember 2024 SMS Jólasprint (Tórshavn)

**Uttanlands:**

11. - 18. februar 2024 HM á langgeil (Doha, Katar)
11. - 14. apríl 2024 Danish Open (Bellahøj, Danmark)
11. - 23. juni 2024 EM á langgeil (Beograd, Serbia)
2. - 3. juli 2024 NMU (Helsinki, Finnland) - 2 gull, 1 silvur, 1 bronsu
2. - 7. juli 2024 EJM (Vilnius, Litava)
1. - 3. desember 2024 NM/NJM (Vejle, Danmark) - 2 gull, 2 silvur, 2 bronsur
10. - 15. desember 2024 HM á stuttgeil (Budapest, Ungarn)

## Virksemi

SSF skipar regluliga fyri felagsfundum, har nevndarfólk, venjarar og onnur úr feløgum og sambandi umrøða nútíðar- og framtíðarætlanir, umframt aktuell evni. Hetta tykiskt at betra munandi um samhoyri og kósina í føroyskari svimjing.
Landsliðsvirksemið hjá SSF var endurskoðað í 2024 m.a. við fundi við feløgini á heysti í 2024, og síðani við starvsnevndarviðgerð í 2025. Nú verður lagt um til skipan við landsliðssamskipara, sum í samráði við venjarar og íðkarar ger uppskot til landsliðsætlan.
Íðkaranevndin hjá SSF er rættiliga virkin bæði sum hoyringspartur, har forfólkið er fullgildugur og virkin limur í starvsnevndini hjá SSF, og ítøkiliga har tey í 2024 skipaðu fyri ítróttarforum og gallaveitslu hjá SSF við kjósan av ársins svimjara og øðrum.
Ein stór uppgáva hjá SSF í 2024 var at gera umsókn til nýggju úrvalsskipanina við tilhoyrandi virksemis-, landsliðs- og úrvalsætlan. Hetta gekk rímiliga væl, og tí hevur SSF næstan somu upphædd til úrvalsvirksemi í 2025, sum íðkararnir fingu í 2024.
SSF skipaði hin 18. til 20. oktober 2024 fyri svimjifrálæruráðstevnuni, Nordic Learn to Swim Conference, í Norðurlandahúsinum í Havn, har eini 70 fólk úr Íslandi, Føroyum, Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi, Estlandi og Týsklandi luttóku.
Langhylurin í Havn læt upp 28. oktober í 2024 og varð nýttur til FM á stuttgeil hin 8. til 10. november í 2024. Nógv føroysk met og juniormet vóru sett. Umstøðurnar eru nú munandi betri í Havn - bæði hjá HS, SSF og øðrum.
SSF er rættiliga virkið herheima og uttanlands við so vítt gjørligari uppmøting, har ynski er um tað. Forfólkið er nevndarlimur í European Aquatics við svimjifrálæru og miðlan sum uppgávu-



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

**Nevndarforfólk:**
Rókur í Jákupsstovu
**Nevndarlimir:**
Alvi Hjelm, næstforfólk
Bjørg O. Jensen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Annika J. Olsen, nevndarlimur
Signhild Rannváardóttir, íðkaraumboð
H. Rúni Gaardbo, tiltakslimur
**Svimjinevnd:**
Bjørg O. Jensen, forfólk
Jón Bjarnason, næstforfólk
Rakul A. Dam, skrivari

**Dómsnevnd:**
Anni á Hædd, forfólk
Jórun E. Johannesen, nevndarlimur
Monika H. Rasmussen, nevndarlimur
**Íðkaranevnd:**
Signhild Rannváardóttir, forfólk
Natanael A. Matras, næstforfólk
Barbara Debes, skrivari
Rói Bech, nevndarlimur
**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Sølvi Reinert Hansen, aðalskrivari | 1/2 |
| H. Rúni Gaardbo, landsliðssamskipari | 1/6 |

øki - umframt uppbygging av dátusavni.
Í 2024 vóru fundarboðini m.a. til aðalfund og til inklusjónsráðstevnu hjá European Aquatics - umframt fyrsta fysiska fund hjá Nordic Life Saving Group síðani koronufarsóttina. Hartil vóru kunnandi fundir hjá World og European Aquatics um komandi átøk.
Í Føroyum hava góð prát verið við fólk í skúlaverkinum um møguligt samstarv í sambandi við lívbjarging og svimjifrálæru. Endamálið hjá SSF er altíð, at so nógv sum gjørligt skulu kunna læra at svimja og lívbjarga.

## Annað

SSF arbeiðir áhaldandi við at betra um sín fyrisitingarsið sum liður í 'Good Governance' átakinum hjá World Aquatics síðani 2021. Átøk í 2024 vóru m.a. at fáa broytt lógina hjá SSF til at miða móti javnstøðu í starvsnevndini, at leingja um fráboðanarfreist fyri aðalfundin og at krevja framløgu av fíggjarætlan á aðalfundinum. Ynskið um javnstøðu í starvsnevndini hjá SSF varð rokkið á aðalfundinum í 2024 - eins og í 2025.

SSF undirskrivaði í 2025 felags inklusjóns-yvirlýsing hjá European Aquatics. SSF arbeiðir miðvíst við at fáa í lag felags fráboðanarskipan og etiska nevnd í ÍSF - umframt at luttaka í gjøgnumskygnisátaki hjá European Aquatics og í átakinum Tryggur Ítróttur hjá ÍSF.
https://ssf.fo/felagsskapur/aetlanir/

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/svimfor
www.instagram.com/svimfor/

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) | 53 |
| Havnar Svimjifelag (HS) | 400 |
| Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim) | 150 |
| Svimjifelagið FLOT (FLOT) | 178 |
| Svimjifelagið Hellufossur (SHF) | 86 |
| Svimjifelagið Reysti (Reysti) | 109 |
| Ægir (Ægir) | 400 |

# Billard

Billardsamband Føroya / billardsambandforoya@gmail.com / Tel 252202 / www.billard.fo

**Samanlagt hava vit nógvar limir, og vit hava eisini fleiri sunnar kappingar, sum verða hildnar ár eftir ár uttan avbrot. Vit síggja jaliga menning, men vit meta, at tað er framvegis nógv pláss fyri at gera tað enn betri.**

## Strategi

**Breidd:** Vit spæla í trimum deildum, og tað er eingin gátt viðvíkjandi førleikum fyri at kunna luttaka í 3. deild.
**Úrval:** Tað besta vit hava at bjóða úrmælingunum er FM. Men vit vóna, at vit kunnu fara til Danmarkar at kappast.
**Sjálvboðin:** Vit eggja feløgunum til at fjálga um tey sjálvbodnu.
**Ítróttagleði:** Vit hava ein góðan felagsskap. Tað sæst eisini á innanhýsis Facebooksíðuni, Billard FO, har tilfar regluliga kemur, sum bæði eru gaman og álvari.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
FM fyri lið í 1. deild, 2. deild og 3. deild frá okt. til mars verður spælt úti hjá feløgunum (Síðan 1977)
FM fyri einstaklingar, apríl, í Havn (Síðan 1977)
Haldor Holm Cup, oktober, í Klaksvík (Síðan 1989)
Skómakara-kapping, á Varmakeldu, í Fuglafirði
Lions Cup Suðuroy, september, á Tvøroyri (Síðan 2018)
Billardspælarar frá øllum feløgum spældu ímóti B67 Herning 17.05 og 18.05 í 2024. Spælt varð í hølunum hjá havnamonnum og í Klaksvík.

## Virksemi

**Liðkappingarnar**
Liðkappingarnar í 1., 2. og 3. deild hava sína gongd, og nevndin metir, at kappingarnar eydnast væl.
Í kappingarárinum 2023/24 vóru seks lið í 1. deild, seks lið í 2. deild og sjey lið í 3. deild.
Mest vinnandi billardfelagið í Føroyum, Klaksvíkar Billardfelag, vann sítt 16. FM heiti fyri lið. Tað var nevniliga KLBF1, sum var mannað við Urbanusi Knud Olsen og Kristiani Suna Høgnesen, ið megnaði at vinna føroyameistaraskapið fyri lið.
Í 2. deild var tað lið úr Fuglafjarðar Billardfelag, ið megnaði at vinna deildina. Liðið mannaðu Jákup Arnholdt Lambaa og Bjarni Skaalum.
Tað er at fegnast um, at fuglfirðingar aftur eru umboðaðir í bestu deildini.
Í 3. deild vóru tað havnamenn, sum triðja kappingarárið á rað vunnu deildina.
Samanlagt vóru tað 51 mans, sum umboðaðu feløgini í liðkappingunum í ár.

**KLBF1 vinnari av 1.deild**
Urbanus Knud Olsen og Kristian Suni Høgnesen TVBF 1.
Tað var stuttligt at síggja Gullok aftur við borðið eftir longri steðg.

**Haldor Holm Cup**
Haldor Holm Cup hoyrir heima í Klaksvík. Haldor Holm Cup verður spælt soleiðis, at leikarar dystast í fleiri settum - upp í 100 eygu. Ólavur Kjølbro vann finaluna, sum hann í ár spældi ímóti Sonhardi Johannesen.

**Lions Cup Suðuroy**
Lions Cup Suðuroy er einstaklingakapping, sum verður spæld hvørt ár í hølunum hjá Tvøroyrar Billardfelagi. Kappingin er skipað soleiðis, at bara leikarar við upp í fimtan í miðal frá styrkislistanum árið fyri sleppa at luttaka í kappingini. Hesa ferð vóru tíggju leikarar við. Dystast bleiv fyrst í tveimum bólkum. Síðani vóru semifinalur, bronsudystur og finala.
Vinnarin bleiv veteranurin av Tvøroyri Bjarni Thomsen, nr. 2 gjørdist Hugin Albinus, og nr. 3 var vinnarin frá í fjør Jan Muller.

**FM fyri einstaklingar**
FM fyri einstaklingar bleiv í ár spælt í hølunum hjá Klaksvíkar billardfelagi. Ikki færri enn 20 spælarar høvdu teknað seg til hesa innleiðandi kappingina. Tvørámaðurin Páll Heri Nolsøe, vann kappingina. Í fjør var hann við góðum spæli eisini nær við at vinna, men hann bleiv nummar tvey tá. Hetta er triðja føroyameistaraheitið hjá honum.
Nummar tvey gjørdist Hallur Joensen, sum dagliga spælir í Danmark. Triðja plássið fór til Ólav Kjølbro, sum annars vann í fjør.
Allir dystirnir blivu fyri fyrstu ferð stroymdir beinleiðis á Youtuberásini hjá Billardsambandinum.

**Skómakarakappingin á varmakeldu**
Aftur í ár skipaðu fuglfirðingar fyri skómakarakapping á Varmakeldu. Kappingin var jøvn. Vinnari gjørdist Magni Jøkladal, nr. 2 bleiv Mortan Berjastein og nr. 3 var Heri Signar Nolsøe.

**Stroyming**
Gongd er nú komin á stroymingina. Sambandið hevur nú ein vanga á youtube, ið vísir dystir beinleiðis. Nú verður lagt upp



**Nevndarforfólk:**
Markus L. Olsen

**Nevndarlimir:**
Ólavur Kjølbro, kassameistari
Oskar Eiriksson, skrivari
Hans Jacob Nystrøm, nevndarlimur
Jakup Arnholdt Lambaa, nevndarlimur
Kristian Suni Høgnesen, tiltakslimur
Heri Signar Nolsøe, tiltakslimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tvøroyrar Billardfelag | 23 |
| Klaksvíkar Billardfelag | 24 |
| Billardfelag Fuglafjarða | 11 |
| Havnar Billardfelag | 12 |
| Skálafjarða Billardfelag | 11 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

til, at feløgini stovna sær hvør sín vanga, so at feløgini hava møguleika til at vísa sínar dystir. Longu nú hevur felagið av Skálafjørðinum, sum verður stytt SFBF, stovnað sær ein vanga og víst onkran dyst.

**B67 Herning**
Í døgunum 17. og 18. mai 2024 vóru átta leikarar frá B67 Herning í Føroyum og spældu billard. Dystirnir blivu leiktir í hølunum hjá Klaksvíkar billardfelagi og í Havnar klubba.
Hetta var fjórðu ferð, at dystir blivu leiktir millum B67 Herning og leikarar úr øllum feløgunum í Føroyum. Leikt verður annaðhvørt ár og skift verður millum at leika í Føroyum og í Herning. Endað var við einum hugnakvøldi í hølunum hjá Havnar klubba.

**Samandráttur**
Út frá tí, sum er nevnt omanfyri, metir nevndin, at billardítróttin átti at verið nógv meiri sjónlig fyri tann vanliga føroyingin. Hetta eru vit í nevndini í holt við at bøta um við at gera ítróttina lættari atkomiliga á sosialu miðlunum, og vit eru vísir í, at tað fer at batna. Sum heild halda vit í nevndini, at billardítróttin í Føroyum liggur á einum lutfalsliga góðum staði, og at pílarnir enn peika uppeftir, síðan ítróttin fram til 2008 var í einum lítlum aldudali. Nýggja felagið á Skálafjørðinum er eitt dømi um, at áhugi er, og at vøksturin kann halda fram. Okkara fatan er, at teir leikarar, ið leggjast afturat, eru leikarar, ið oftast verða hangandi og halda fram við spælinum. Hetta er sera jaligt og umráðandi, tí fleiri dømi kunnu síggjast aðrastaðni, har ungir og nýggir leikarar byrja upp á eina ítróttagrein, men detta burtur aftur eftir ein tíð av tí, at teir fyrr ella seinni mugu velja og vraka - ella bara ikki tíma meira.
Samanlagt hava vit nógvar limir, og vit hava eisini fleiri sunnar kappingar, sum verða hildnar ár eftir ár uttan avbrot. Vit síggja jaliga menning, men vit meta, at tað er framvegis nógv pláss fyri at gera tað enn betri.

## Framtíðarætlanir

· At skaffa ein høvuðsstuðul til bestu deildina í liðkappingini
· At skaffa ein høvuðsstuðul til FM kappingina fyri einstaklingar
· Hava ein miðlamann, sum kann umsita ein facebook profil og skriva fleiri greinar og savna myndir at leggja á miðlarnar.
· Eggja feløgunum til at gera sítt fyri at fáa meiri tilgongd. Kanska gera avtalu við ungdómshús, skúla o.s.fr.
· Bøta um heimasíðuna
· Finna eina loysn upp á stroyming, útgerð o.s.fr. Kanska stroyma beinleiðis á Facebook.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/Billardsambandforoya
Billardsamband Føroya - YouTube

# Boksing

Boksisamband Føroya / boksisambandforoya@gmail.com / Tel 210307

**Vit byrja eina tvey ársætlan, ið umfatar venjaraútbúgvingar og serligar coaching-útbúgvingar, har dentur verður lagdur á ítróttarskaðar og opin brot (cut man)**

## Strategi

**Breidd:**
Venjingarlegur í Føroyum
**Úrval:**
Altjóða stevnur - fleiri heiðursmerkir vunnin
**Sjálvboðin:**
Einki - øll orka er løgd í breidd og úrval

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Ongar kappingar hava verið í Føroyum seinasta árið.

**Uttanlands:**
**Januar:** Stór, felags venjingarlega fyri breiddina og úrval í Helsinge í Danmark. Endaðu við stevnu í Royal Arena, har fleiri enn 30 boksarar úr Føroyum vóru við.
**Februar:** Tvær breiddarstevnur við seks dystum. Vunnu tveir og taptu fýra í Kalundborg og Gilleleje.
**Mars:** Hvidovre Box Cup, sum er altjóða kapping við fleiri enn 400 boksarum. Vit høvdu tríggjar boksarar við í kappingini, og vit komu heim aftur við tveimum gullheiðursmerkjum.
**Apríl:** Tuff Nuff altjóða kapping, har 300 boksarar luttóku. Vit høvdu tveir boksarar við, og vit vunnu eina gull og eina bronsu.
**Oktober:** HSK altjóða kapping við 500 boksarum. Vit høvdu tríggjar boksarar við, og vit vunnu eina silvur.

## Virksemi

- Vit byrja eina tvey ársætlan, ið umfatar venjaraútbúgvingar og serligar coaching-útbúgvingar, har dentur verður lagdur á ítróttarskaðar og opin brot (cut man)
- Fyrireikingararbeiði til altjóða limaskap í WO.

## Framtíðarætlanir

Venjaraútbúgvingar.
Serligar coaching útbúgvingar.
Altjóða limaskapur.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/profile.php?id=100090670122144

### Nevndarforfólk:
Martin Meng

### Nevndarlimir:
Johannes Klein, næstforfólk
Beinta Johannessen, kassameistari

### Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Tórshavn Boksing | 58 |
| Klaksvík Boksing | 15 |




Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Dart

Dartsamband Føroya / dartsamband@gmail.com / Tel 595097 / www.dartfo.com

**Tað eru fleiri feløg, ið hava fingið sær tilfar til at halda kappingar. Hetta ger tað møguligt at hava kappingar í fleiri bygdum og býum kring landið.**

## Strategi

**Breidd:**

Stórur dentur er lagdur á ungdómsdart, sum er í støðugari menning.

**Úrval:**

Tað eru fleiri feløg, ið hava fingið sær tilfar til at halda kappingar. Hetta ger, at tað ber til at halda kappingar í fleiri bygdum og býum kring landið.

**Ítróttagleði:**

Tað er góð samvera til allar kappingar.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

10 Einmanskappingar - 10 Tvímanskappingar - 8 Liðkappingar - 10 Mix kappingar - 4 Ungdómskappingar - Henning Open - Firmadart - Ólavsøkukapping - Double-In Kapping

**Uttanlands:**

Slovenia Open - September 2024
Sweden Open - August 2024
Iceland Open - Apríl 2024
Danish Open - Juli 2024
World Master í Ungarn - Oktober 2024

## Virksemi

Tað hendi nógv hjá Dartsambandi Føroya í 2024. Í ársfrágreiðingini fyri 2023 skrivaðu vit, at ætlanir vóru um at fáa ungdómsdartið í fasta legu. Havnar Dartfelag fekk nýtt høli, sum gjørdi tað møguligt at seta gongd á ungdómsvenjingar, og longu mánadagin 29. januar var fyrsta venjingin. Til tær flestu venjingarnar vóru millum 10-20 ungdómar í U13 og U18. Í heyst fekk Eiðis dartfelag samstarv við kommununa, sum setti gongd á ungdómsdart.

Í august mánaði kom eitt nýbrot fyri ungdómin. Í samráði við leiðsluna í Eysturskúlanum kom í lag, at næmingar kundu velja dart sum vallærugrein í Nám X. 60 næmingar tóku av hesum møguleikanum, og tey spæla tí dart tríggjar ferðir um vikuna. Hetta er avgjørt nakað, sum vit framhaldandi fara at stuðla, og vit fara at vita, um aðrir skúlar vilja gera tað sama. Ein Nám X kapping bleiv hildin, har 32 spælarar vóru við.

Eisini fóru vit at hava ungdómskappingar í FM. Tann fyrsta kappingin var 15. september. 13 spælarar vóru við í U13-bólkinum og 13 spælarar í U18-bólkinum. Tann fjórða og síðsta ungdómskappingin í 2024 var tann 11. november. Til ta kappingina vóru 7 spælarar við til U18 og 10 spælarar vóru við til U13. Djóni Samuelsen vann U18 og Mika Heinesen vann U13. Hann var bara 8 ára gamal.

WDF World Masters var í Budapest 9. til 13. oktober. 14 ára gamli Eli Heinesen fór til kappingina saman við pápa sínum. Pápi Eli segði, at teir fóru ikki við fyri at vinna nakra stóra kapping, men fyri at merkja hendan serstaka kappingarandan, og tað ber ikki til at siga annað enn, at Eli hevur fingið blóð upp á tonnina síðani tá, tí hann hevur longu ætlan um at kappast í fleiri uttanlandskappingum í 2025.

Í apríl mánaði fóru heili 25 spælarar til Íslands at kappast í Iceland Open og í Iceland Masters. Í Iceland Open kláraði Jan McIntosh at kempa seg til eitt fyrsta pláss, og dagin eftir kom hann í finaluna í Iceland Masters. 18. - 20. oktober fór Jan til Riga Open, har hann kom í fjórðingsfinaluni.

Landsliðið fór til Nordic Cup í Íslandi bert eina viku eftir Iceland Open, har Jan Erik Fjallstein bleiv nummar tvey.

Tríggir spælarar úr Føroyum luttóku í Danish Open, sum var 3. mai. Danish Open er størsta kapping í Norðurevropa.

Í oktober/november byrjaðu fyrireikingarnar til EM í 2026. Nógvir fundir blivu hildnir, og nógvar avtalur blivu gjørdar. Tann 15. desember upprann tann stóri dagurin, tá ið støða skuldi takast um, hvar EM í 2026 skuldi haldast. WDF segði, at Føroyar høvdu bestu karmarnar til at skipa fyri tiltakinum.

## Framtíðarætlanir

Vit vilja menna dart í Føroyum. Tað gera vit serliga við at leggja dent á ungdómin. Tað gera vit við at hava kappingar í Føroyum og við at senda landsliðini til kappingar uttanlands - sum t.d. HM í Niðurlondum í 2025. Dart mennist við fullari ferð um allan heim, og Dartsamband Føroya vil vera partur av hesi menning.

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| D9 Dartfelag | 62 |
| Havnar Dartfelag | 43 |
| Vága Dartfelag | 27 |
| Klaksvíkar Dartfelag | 15 |
| Argja Dartfelag | 20 |
| Team Sandoy | 10 |
| Eiðis Dartfelag | 11 |
| Suðuroyar Dartfelag | 15 |
| Pílar & Skot | 12 |




**Nevndarforfólk:**
Annfinn Hjaltalin

**Nevndarlimir:**
Heri Kallsoy, næstforfólk
Hans Marius Mouritsen, kassameistari
Kristian Joensen, skrivari
Nadja Tróndardóttir, nevndarlimur

**Ungdómsnevnd:**
Annfinn A. Hjaltalin, forfólk
Uni Árting, næstforfólk

**EM-Nevnd:**
Annfinn Hjaltalin, forfólk
Jens Albert Simonsen, næstforfólk
Uni Árting, nevndarlimur

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Golf

Golfsamband Føroya / ingisam@gmail.com / Tel 222273 / www.golf.fo

**Sambandið skipaði fyri trimum úttøkukappingum í samstarvi við Tórshavnar Golffelag til tess at finna, hvørjir leikarar skulu umboða Føroyar á oyggjaleikunum í Orknoyggjum**

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

Sambandið skipaði fyri trimum úttøkukappingum í samstarvi við Tórshavnar Golffelag til tess at finna, hvørjir leikarar skulu umboða Føroyar á oyggjaleikunum í Orknoyggjum

## Framtíðarætlanir

Størsta avbjóðingin hjá Golfsambandinum í ár eru oyggjaleikirnir í Orknoyggjum. Undan leikunum fara fýra golfleikarar, ið eru búsitandi í Føroyum, á venjingarlegu í Danmark í eina viku fyri at venja seg við undirlagið. Av tí at vit ikki hava nakra (veruliga) golfbreyt í Føroyum, eru stórar avbjóðingar hjá okkara golfleikarum at halda venjingina viðlíka. Golfsambandið strembar tí eftir - í samstarvi við Tórshavnar Golffelag - at fáa í lag innandura venjingarumstøður, so møguleiki er fyri at halda golfspælið viðlíka í vetrarhálvuni. Avbjóðingin hesi komandi árini er at fáa nýggjar og yngri limir í feløgini. Avbjóðingin er størri, nú Tórshavnar kommuna fyribils hevur slept ætlanunum um at byggja/fíggja golfbreyt á Glyvursnesi.

**Nevndarforfólk:**
Ingi Samuelsen

**Nevndarlimir:**
Jógvan Amonsson, næstforfólk
Bárður Højgaard, peningarøkil

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Golffelag | 71 |
| Eysturoyar Golffelag | 15 |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Klintring

Klintrisamband Føroya



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík



# Pool

Poolsamband Føroya / info.npaf@psf.fo  / Tel 255229

**Hetta er fyrsta árið hjá sambandinum, og tað hevur verið umráðandi at fáa góðkenningar til dómarar, venjarar og kappingar upp á pláss. Tí hevur verið skipað fyri styrkismetingarkappingum í feløgunum.**

## Strategi

**Breidd:**
Sambandið hevur skipað fyri, at okkara limir tóku av tilboðið um venjaraskeið 1.

**Úrval:**
Sambandið skipar fyri EPBF dómaraskeiði í januar 2025, ið er eitt altjóða skeið.

**Sjálvboðin:**
Alt arbeiði er sjálvboðið, og ágrýtnið millum okkara limir er vaksandi.

**Ítróttagleði:**
Hetta er fyrsta árið hjá sambandinum, og tí hevur verið umráðandi at fáa góðkenningar til dómarar, venjarar og kappingar upp á pláss. Tí hevur verið skipað fyri styrkismetingarkappingum í feløgunum.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Styrkimetingarkapping í EPF, oktober - desember
Styrkimetingarkapping í HPF, oktober - desember

## Framtíðarætlanir

2025: Dómaraskeið í januar. Landskapping í liðum.
EPF vs. HPF í 8-ball.
9-ball- og 10-ball kappingar alt árið.
Styrkimetingarkappingin fyri lið í 8-ball byrjar aftur í august.
Ungdómsarbeiðið skal byrja.
Stuðla feløgum at finna hóskandi høli.
Marknaðarføra og varpa ítróttina.

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Eysturoyar Pool Felag | 20 |
| Havnar Pool Felag | 19 |

**Nevndarforfólk:**
Shehan Andrew Wanniya Bandara

**Nevndarlimir:**
Hans Kristian Eyðunsson Hansen, skrivari
Arnfinn í Bartalsstovu, kassameistari




Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Seyðahundar

Seyðahundasamband Føroya / minhundur@gmail.com / Tel 580445 / www.hundar.fo

**Seyðahundasambandið er sjónligt í fjølmiðlunum, og av tí at vit hava fleiri feløg undir okkum, er hetta við til at eggja og menna ítróttin kring landið.**

## Strategi

**Breidd:**

Seyðahundasambandið er sjónligt í fjølmiðlunum, og av tí at vit hava fleiri feløg undir okkum, er hetta við til at eggja og menna ítróttin kring landið. Vit uppliva, at áhugin er vaksin, síðan feløgini blivu stovnað. Tað eru á leið góðir 30 hundar, sum kappast, og er hetta sera gott í okkara ítrótti.

**Úrval:**

Sambandið hevur skipað fyri felagsvenjing fyri okkara úrvalsíðkarum, ið skulu luttaka uttanlands, so at tey eru fyrireikað til hesar avbjóðingarnar.

**Sjálvboðin:**

Í hvørjum felag hava vit raskar nevndarlimir, ið hjálpa til við kappingum og øðrum tiltøkum, sum feløgini skipa fyri. Feløgini leggja dent á at løna hjálparum við gávum ella peningi, sum tey fáa frá stuðlum.

**Ítróttagleði:**

Undir sambandinum eru seks seyðahundafeløg, og tey arbeiða við at hava felagsvenjingar, skeið og tiltøk til limirnar. Vit síggja, at hetta eydnast sera væl, tí tað er tilgongd av limum og fólki, sum møta til kappingar.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

Í okkara kalendara standa allar kappingarnar:
https://hundar.fo/kalendari/

Øll feløgini undir sambandinum skulu í øllum førum hava eina kvalifikatiónskapping um árið.

24.08.2024 Seyðahundakapping - Suðurstreymoyar seyðahundafelag - Mjáuvøtn - klassi 1. og 2.
21.09.2024 Seyðahundakapping - Eysturoyar seyðahundafelag - Funningsbotnur - Kvalifikatiónskapping 1. - Klassi 3., 2. og 1.
09.11.2024 Seyðahundakapping - Sandoyar seyðahundafelag - Húsavík - Kvalifikatiónskapping 2. - klassi 3., 2. og 1.
30.11.2024 Seyðahundakapping - Sundalags seyðahundafelag - Saksunardalur - kvalifikatiónskapping - klassi 3., 2. og 1.
01.03.2025 Seyðahundakapping - Suðurstreymoyar seyðahundafelag - Vatnaskørðum - Kvalifikatiónskapping 3. - klassi 3.
08.03.2025 Seyðahundakapping - Seyðahundasambandið - Vatnaskørðum - Kvalifikatiónskapping 4. - klassi 3.
15.03.2025 Seyðahundakapping - Norðoyar seyðahundafelag - Viðareiði - klassi 1., 2. og 3.

**Uttanlands:**

28.08-01.09.2024 EM - Continental Sheepdog Championship - Eysturríki
09.-11.08.2024 NM - Nordisk Mesterskap - Finnland

## Virksemi

Kappingarárið hjá Seyðahundasambandinum er frá apríl í 2024 til apríl í 2025. Tá ið kappingarárið er liðugt, fáa luttakararnir at vita, hvør hevur vunnið sær pláss til kappingar uttanlands. Tummas Jacobsen, Anna Sofía Fjallheim og Jónstein Petersen hava tryggjað sær pláss í Nordisk Mesterskap og EM 2025.
Í ár hevur Seyðahundasambandið skipað fyri einum dómaraskeiði. Vit høvdu vitjan av einum norðmanni, sum eitur Jo Agnar Hansen. Jo Agnar hevur drúgvar royndir í kappingum og døming v.m. Skeiðið, sum bleiv hildið í ÍSF-húsinum, vardi í fýra dagar. Ástøðið bleiv gjøgnumgingið í hølunum hjá ÍSF og endaði við felagsdøming í kapping á Vatnaskørðum í Hoyvík. Dómaraskeiðið eydnaðist væl, og vit hava fingið tilgongd av nýggjum dómarum í ár.
Okkara landslið hevur kappast í EM í Eysturríki og í NM í Finnlandi í 2024 og hevur eisini verið til ymiskar opnar kappingar. Ketty Andrea Winther Hentze og Jónstein Petersen vóru fyri fyrstu ferð uttanlands og kappaðust. Sí grein á www.hundar.fo
Venjingar hava verið kring landið, har feløgini hava heitt á royndar hundavenjarar í Føroyum um at hava venjingarskeið -sí tíðindi, har vit hava skrivað um kappingar uttanlands.
https://hundar.fo/tidindi/

## Framtíðarætlanir

Vit fara at menna kappingarreglurnar fyri klassa 1. ,2. og 3. Vit fara at hava dómaraskeið, soleiðis at vit fáa fleiri dómarar til kappingarnar, sum vit hava árliga. Arbeitt verður við at seta krav um, at ein banaformaður skal vera til allar kvalifikatiónskappingarnar, sum vit hava. Vit fara at skipa fyri venjingum fyri okkara landsliðum, so at hesi blíva meira fyrireikað til uttanlandskappingar. Vit fara eisini at skipa fyri venjingum kring landið við heitinum - Hvussu venur ein til kappingar?

## Annað

Vága Seyðahundafelag hevði sína fyrstu kapping í kappingarárinum 2023/2024, og vit í sambandinum gleðast um, at gongd er komin á hjá teimum.



**Nevndarforfólk:**
Tummas Jacobsen

**Nevndarlimir:**
Tóki Berg Mikkelsen, næstformaður
Brandur Klettskarð í Kongstovu, skrivari
Steinur Poulsen, peningarøkil
Anna Sofía Fjallheim, nevndarlimur
Ketty Andrea Hentze Winther, tiltakslimur
Hanus Højgaard, tiltakslimur

**Aðrar nevndir:**
**Skráseting av seyðahundaparingum í Føroyum:** Jónleif Jørgensen, forfólk

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoyar Seyðhundafelag | 36 |
| Sandoyar Seyðahundafelag | 14 |
| Sundalags Seyðahundafelag | 22 |
| Norðoyða Seyðahundafelag | 25 |
| Vága Seyðahundafelag | 10 |
| Eysturoyar Seyðahundafelag | 12 |
| **Tilsamans** | **119** |

**Sosialir miðlar**
Seyðahundasamband Føroya | Facebook

Mynd: Finnur Justinussen

# Styrki

Føroya Styrkisamband / fss@fss.fo / Tel 223336 / www.fss.fo

**Til DM í ár vunnu vit heili seks gullheiðursmerkir, umframt níggju onnur heiðursmerkir. Hetta er besta úrslit vit hava fingið higartil, og ætlanin er bert at økja um tað talið.**

## Strategi

**Breidd:**
FSS stríðist fyri at fáa karmar, soleiðis at eitt veruligt breiddartilboð kann bjóðast. Tó verða fleiri feløg stovnað, og skjótt kunnu vit bjóða styrkiítrótt um alt landið. Í 2024 hava vit gjørt avtalu við HSF um styrkiskeið. Vit hava í løtuni styrkiskeið fyri Kyndil, KÍF og Runavíkar skúla.

**Úrval:**
Vit hava fingið atlimaskapir í tveimum altjóða sambondum í olympiskari vektlyfting, umframt at vit hava fingið fullan limaskap í Masters sambandinum. Í apríl 2025 setti HSF landsliðsíðkaran hjá okkum Pól Hendrik Andreasen í fulltíðarstarv sum kropsligan venjara.

**Sjálvboðin:**
Vit royna at fáa fólk úr ymsu venjingarmiðstøðunum og úr feløgunum við í fyriskipan av kappingum. Til NM, sum var í Runavík, vóru tað heilt nógv, ið tóku eitt megnar tak. Men júst sum aðrastaðni, so tykist tað sum, at vit altíð kunnu brúka fleiri hendur.

**Ítróttagleði:**
Felagsskapurin í styrkivenjing hevur stóran týdning. Sjálv styrkivenjingin er mangan merkt av nógvum og longum steðgum, sum merkir, at íðkarar brúka nógva tíð til at sita og bíða eftir næsta setti. Tí er sera týdningarmikið at hava gott samanhald. Hetta er galdandi millum settini, og tað er eisini týdningarmikið, at geva sær stundir til at stuðla hinum. Vit leggja nógv fyri, at øll feløg fáa betri samanhald. Seinasta átakið var at hava felags FM í styrki- og vektlyfting

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
30. mars 2024: FM í Olympiskari vektlyfting - hjá Burn Íðkarar, Tórshavn
21. juni 2024: FM í styrkilyfting - hjá Burn Íðkarar, Tórshavn
18. - 19. oktober 2024: NM fyri vaksin í Olympiskari vektlyfting - í Bylgjuni, Runavík
22. november 2024: Steypakapping í styrkilyfting - hjá Burn Íðkarar, Tórshavn
29. november 2024: Skansi Cup í Olympiskari vektlyfting - hjá Styrkifelagnum Stoyt, Tórshavn

**Uttanlands:**
**Olympisk vektlyfting**
28. januar 2024: Reykjavík International Games - Reykjavík
3. februar 2024: B-DM 2024 - Slagelse
9. mars 2024: Bagsværd Holdstævne - Bagsværd
23. mars 2024: European Small Nations Tournament Senior - Monaco
19. apríl 2024: DM Senior - Herning
17. juni 2024: EM Masters - Haugesund
23. juni 2024: DM Hold - Herning
23. august 2024: International Women Grand Prix - Baden, Eysturríki
8. september 2024: HM Masters - Rovaniemi
5. oktober 2024: Aaborg Cup - Aalborg
2. november 2024: Øst DM Senior - Bagsværd
16. november 2024: NM Junior - Keypmannahavn
10. desember 2024: AK Thors interne mesterskaber - Keypmannahavn
**Styrkilyfting**
13. september 2024: NM Junior - Horsens
**Kúlulyft**
5. juni 2024: EM - Rzeszow, Pólland

## Virksemi

2024 hevur verið eitt søguligt og virkisríkt ár hjá Føroya Styrkisambandi. Eitt nýtt felag varð stovnað, stór kapping varð hildin í Føroyum og vit hava fingið altjóða limaskap - bæði í vektlyfting og í styrkilyfting.

**Nýggj feløg**
Vit arbeiða støðugt við at víðka um felagsskapin um alt landið. Í 2024 varð felagið Trúðheimur sett á stovn í Runavík, har stórt arbeiði hevur verið gjørt. Runavíkar Kommuna hevur verið ein virkin partur í hesum m.a. tí at tey hýstu norðurlendsku meistarastevnuni í vektlyfting. Við hesum er stórt stig tikið fram móti at flyta ítróttina út um høvuðsstaðarøkið.

**Styrkilyfting**
Styrkilyftingin heldur fram at vaksa. Í 2024 luttóku fimm íðkarar í norðurlendsku meistarastevnuni, og har fingu vit fleiri góð úrslit - m.a. tvey fjórða pláss. Hetta var annað árið á rað, at vit vóru umboðað har.
Til FM í 2024 setti luttakaratalið met við átta monnum og fýra kvinnum, og tað vísir seg, at áhugin fyri hesi ítróttagreinini er støðugt vaksandi.



**Nevndarforfólk:**
Heini Hátún

**Nevndarlimir:**
Niels Áki Mørk, samskipari
Rói Hjaltalin, ábyrgdarpersónur fyri Olympiskari vektlyfting og samskipari
Hjalmar Berthelsen, ábyrgdarpersónur fyri styrkilyfting
Sonni Eliassen, ábyrgdarpersónur fyri kúlulyft
Maibrit Reynheim Petersen, tiltakslimur
Gudmundur Danielsen, tiltakslimur
Jákup Súni Berg, tiltakslimur

**Aðrar nevndir:**
Dómaranevnd / Ábyrgdarbólkur
Gudmundur Danielsen, forfólk
Petur Fróðason
Sonni Eliassen

**Felag og limatal:**

| | |
|---|---|
| Megingjørð Styrkifelag, Sundsvegur 6 | 8 |
| Styrkifelagið Stoyt, Slættanesgøta 11 | 20 |
| Burn Íðkarar, Berjabrekka 1 | 44 |
| Trúðheimur, Skálafjørður | 6 |
| Full Power Kúlulyft, Klaksvík | 3 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

**Vektlyfting**
Vektlyftingin er framvegis størsta greinin undir okkara paraply. Hæddarpunktið í 2024 var, at NM bleiv hildið í Føroyum. Hetta var fyrstu ferð, og vit høvdu seks íðkarar við. Talan var um stóra, altjóða hending, sum setti Føroyar á lyftikortið.
Umframt hetta vóru Føroyar eisini við í Small Nations, sum er EM fyri smátjóðir. Hetta var fyrstu ferð, at vit vóru við, og tað varð stórt stig fyri okkum á evropeiska pallinum.
Fleiri met vórðu sett í 2024 - bæði innanlands og í altjóða kappingum.

**Kúlulyft**
Sonni Eliassen helt fram at gera seg altjóða galdandi og lyfti seg til eitt flott silvurheiðursmerki í EM. Hóast fáir íðkarar eru í hesi greinini, so halda úrslitini fram at tala fyri seg sjálvi.

**Annað virksemi**
2024 var eisini árið, har styrkiskeið vórðu víðkað. HSF (Hondbóltssamband Føroya) fekk eitt skeið, og harumframt eru vit farin at undirvísa javnan í Runavíkar Skúla, sum liður í at spjaða styrkiítróttina út til ungdómin.

**Altjóða limaskapur**
Á altjóða pallinum hava vit tikið stór fet. Føroyar hava nú fingið atlimaskap í European Weightlifting Federation (EWF) og í International Weightlifting Federation (IWF). Vit hava eisini fingið fullan limaskap í European Masters Weightlifting Association (EMWA) og í International Masters Weightlifting Association (IMWA). Hetta merkir, at føroyskir íðkarar nú veruliga kunnu luttaka á jøvnum føti við hini londini í fleiri altjóða kappingum og í samstørvum.

## Framtíðarætlanir
Okkara ætlan er tríbýtt. Vit vilja arbeiða fyri altjóða/úrvali, fyri breiddini í í Føroyum, har vit eisini spjaða styrkiítróttin út og triði partur er at gerast eitt sersamband undir ÍSF.
Úrvalsvirksemið hevur verið í gongd leingi. Tað veksur eisini so líðandi. Vit hava fingið stabiliserað so mikið, at  tað næstan er sjálvirkandi undir okkara samskipara. Tó mugu vit fáa fleiri altjóða limaskapir, so at vit kunnu kappast undir Merkinum til allar kappingar, sum vit megna.
Í sambandi við NM í Olympiskari vektlyfting í 2024 hava vit fingið styrkivenjing í fasta legu í Runavík. Hetta tilboðið er farið í gongd í framhaldsdeildini í Runavíkar skúla  Av tí sama er fimta felagið sett á stovn, ið hevur heimstað í suður-Eysturoy. Vit vóna, at vit kunnu fáa eitt felag sett á stovn í Suðuroy, Vágum, møguliga Sandoy og etablera norðoyar-feløgini.
Í byrjanini av 2025 vóru vit ikki so langt frá at blíva eitt sersamband undir ÍSF. Tað bleiv mett, at vit mangla tað heilt síðsta í sambandi við ungdómsarbeiðið. Komandi árið og árini fara vit at skipa soleiðis fyri, at vit kunnu menna styrkiítróttina millum ung, so at vit koma á mál við hesum.

# Taekwondo

Taekwondosamband Føroya / faroeislands.taekwondo@gmail.com / Tel 598187 / www.taekwondo.fo

**Ítróttargleðin kemur ofta við tiltøkum, sum ikki eru sjálv ítróttin. Vit royna at blanda ítrótt við at renna, svimja og spæla fótbólt saman. Runutusk verður í juni.**

## Strategi

**Breidd:**
Vit hava tikið nýggjar limir inn.
Vit hava hildið graduering í desember og í juni.
Vit hava havt tríggjar venjingarlegur við hugna, svimjing, felagsmáltíðum og gisting í klubbanum.

**Úrval:**
Vit hava søkt um úrval til Høgna K. Dávason, og vit hava fingið játtan til tvey ár. Vit hava eisini søktum nýggja pulju til juniorar - Artur og Jerrold, sum eisini eru á landsliðnum.

**Sjálvboðin:**
Í ár hevur ikki gingið nóg væl hjá okkum at taka okkum av teimum sjálvbodnu, men hettar verður betri í komandi ári.

**Ítróttagleði:**
Ítróttargleðin kemur ofta við tiltøkum, sum ikki eru sjálv ítróttin. Vit royna at blanda ítrótt við at renna, svimja og spæla fótbólt saman. Runutusk verður í juni.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
FM í desember í 2024.

**Uttanlands:**
NM í Oslo í januar.
Esbjerg Cup í Esbjerg í Danmark í februar.
Rødovre Cup í Danmark í juni.

## Sosialir miðlar

Taekwondo felagið hwarang føroyar (Facebook)
Taekwondo Fø (Instagram)

### Nevndarforfólk:
Noomi Kunoy Heradóttir

### Nevndarlimir:
Gurið Lómfelli, næstforfólk
Tórheðin Jensen, kassameistari
Dávur Kunoy Høgnason, nevndarlimur
Dávid Im, nevndarlimur

### Feløg og limatøl:
Hwarang Føroyar 111


Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Tennis

Tennissamband Føroya / tennis@tennis.fo / Tel 230521 / www.tennis.fo

**Venjingar fyri ung og børn byggja í stóran mun á gleði við at íðka tennis, umframt at liðvenjingarnar fyri vaksin eisini hava ítróttargleði sum ein týðandi lið í venjingunum.**

## Strategi

**Breidd:**

Skipað verður regluliga fyri venjingum fyri ung og børn - umframt liðvenjingum fyri vaksin, har kvinnur og menn eru við. Kappingar fyri seniorar hava eisini verið partur av skránni í 2024.

**Úrval:**

2024 hevur verið eitt ár millum tær stóru kappingarnar fyri landslið (oyggjaleikir). Regluligar venjingar hava tó verið við atliti at óalmennu oyggjaleikunum í Isle of Man í tennis í 2025. Fimm menn og fýra kvinnur luttaka. Hetta er fyrstu ferð, at kvinnur luttaka á OYL.

**Sjálvboðin:**

Fleiri sjálvboðin eru við til venjingar fyri vaksin og børn. Røkt og umsiting av felagshúsinum og økinum um vøllirnar verður umsitin av sjálvbodnum.

**Ítróttargleði:**

Venjingar fyri ung og børn byggja í stóran mun á gleði við at íðka tennis, umframt at liðvenjingarnar fyri vaksin eisini hava ítróttargleði sum ein týðandi lið í venjingunum.
Virkisætlanin er tengd at venjing og menning av nýggjum og vandum leikarum. Venjing í bólkum við skeiðum í tíggju vikur hevur eydnast sera væl seinastu árini, og í samstarvi við HTF hevur verið skipað fyri venjingum fyri børn, og tað hevur verið væleydnað

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

Várkapping, summarkapping, FM og heystkapping. Allar avgreiddar í Havn.

## Framtíðarætlanir

Byggja tennis- og padelhøll. OYL í Isle of Man í 2025. OYL í FØ í 2027.

## Sosialir miðlar

htf.fo // Havnar Tennisfelag á FB
tennis.fo á instagram

**Nevndarforfólk:**
Ingi H. Højsted

**Nevndarlimir:**
Barbara á Rógvi, nevndarlimur
Jón Brekku, skrivari
Stefan í Skorini, kassameistari
Janus Rein, nevndarlimur
Svenn F. Jacobsen

**Feløg og limatøl:**
Havnar Tennisfelag 220



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Ítróttasamband Føroya

**Eystara Bryggja 30, Postsmoga 223, FO-110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2024

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann /

_______________________________

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2024** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Starvsnevndin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2024 hjá Ítróttasamband Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2024 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 1. mai 2025

**Daglig leiðsla**

Petur Mittún
aðalskrivari

Starvsnevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Elin Heðinsdóttir Joensen<br>forseti | Magnus Tausen<br>varaforseti | Eva Vilhelm<br>nevndarlimur |
| Anna Maria Toftegaard<br>nevndarlimur | Kerstin Laksáfoss<br>nevndarlimur | Edna Maria Debes<br>nevndarlimur |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til limafeløgini í Ítróttasamband Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ítróttasamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2024 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskapar-árinum 1. januar - 31. desember 2024 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Tórshavn, tann 1. mai 2025

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Ítróttasamband Føroya er greiddur samsvarandi viðtøkunum um uppseting av ársroknskapinum og ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki A. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur, í mun til undanfarna ár. Uppseting og notur eru tillagaðar virksemi ÍSF's.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**

Inntøkan er allur játtaður og útgoldin stuðul og aðrar inntøkur í árinum.

**Kostnaður**

Ítróttasamband Føroya er partvís meirvirðisgjaldsskrásett.

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá Ítróttasambandi Føroya.

**Fyrisitingarkostnaður**

Fyrisitingarkostnaður fevnir um kostnað, sum knýtir seg til umsitingina av Ítróttasambandi Føroya, herundir avskrivingar v.m., sum ikki knýta seg til høvuðsraksturin.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til felagsrakstur, fyrisiting, hølir og tap uppá áogn.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

### Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Áður innroknaðar niðurskrivingar verða afturførdar, tá ið grundarlagið fyri niðurskrivingini ikki er longur.

### Fíggjarlig støðisogn

### Onnur virðisbrøv og kapitalpartar

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, ið ikki eru skrásett á virðisbrævamarknaði, verða innroknað til kostprís. Um endurvinningarvirðið er lægri enn kostprísur, verður niðurskrivað til lægra virði.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparárið.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### Skuld

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2024<br>kr. | 2023<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 27.291.668 | 27.848.205 |
| | **Inntøkur tilsamans** | **27.291.668** | **27.848.205** |
| | Ítróttaferðing | -393.369 | -550.433 |
| | Trygging av ítróttafólki | -623.824 | -588.177 |
| 2 | Antidoping | -500.000 | -500.000 |
| 3 | ONF | -456.733 | -706.840 |
| 4 | Felagsútreiðslur | -2.582.645 | -5.708.106 |
| 5 | Umsiting av ÍSF-húsinum | -560.463 | -431.858 |
| 6 | Skrivstovuútreiðslur | -317.885 | -384.407 |
| 7 | Starvsfólkakostnaður | -2.183.693 | -2.076.132 |
| | **Útreiðslur tilsamans** | **-7.618.612** | **-10.945.953** |
| 8 | Stuðul til sersambond | -14.911.000 | -14.172.000 |
| 9 | Stuðul til altjóða kappingar | -2.450.000 | -3.200.000 |
| 10 | Stuðul til Úrvalsítrótt | -2.000.000 | -800.000 |
| | **Stuðul tilsamans** | **-19.361.000** | **-18.172.000** |
| | Rentuútreiðslur | 49.140 | -10.997 |
| | **Ársúrslit** | **361.196** | **-1.280.745** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 361.196 | 0 |
| Flutt frá fluttum úrsliti | 0 | -1.280.745 |
| **Býtt tilsamans** | **361.196** | **-1.280.745** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## OGN

| Nota | | 2024<br>kr. | 2023<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 11 | Kapitalpartar í atknýttum feløgum | 100.000 | 50.000 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 100.000 | 50.000 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **100.000** | **50.000** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 264.779 | 1.074.527 |
| | Millumrokning, Oyggjaleikir | 1.687.763 | 0 |
| | Millumrokningar við sambond | 167.663 | 0 |
| | Lán til sambond | 1.200.000 | 1.200.000 |
| | Millumrokning við Úrval | 0 | 413.195 |
| | Áogn tilsamans | 3.320.205 | 2.687.722 |
| | Tøkur peningur | 11.866.147 | 12.108.530 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **15.186.352** | **14.796.252** |
| | **OGN TILSAMANS** | **15.286.352** | **14.846.252** |

## SKYLDUR

| Nota | | 2024<br>kr. | 2023<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 12 | Flutt úrslit | 7.872.814 | 7.511.618 |
| | **Eginogn tilsamans** | **7.872.814** | **7.511.618** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 48.098 | 966.996 |
| | Skyldugur stuðul | 200.000 | 200.000 |
| 13 | Avsetingar | 7.165.440 | 6.056.288 |
| | Avseting, stuðul til sambond | 0 | 111.350 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 7.413.538 | 7.334.634 |
| | **Skuld tilsamans** | **7.413.538** | **7.334.634** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **15.286.352** | **14.846.252** |

| | | 2024<br>kr. | 2023<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Landskassastuðul | 15.100.000 | 13.100.000 |
| | Landskassastuðul til Antidoping Føroyar | 500.000 | 500.000 |
| | Landskassastuðul til altjóða kappingar | 500.000 | 500.000 |
| | Landskassastuðul til Úrvalsítrótt | 800.000 | 800.000 |
| | Stuðul MMR Oyggjaleikir | 0 | 250.000 |
| | Oyggjaleikir, luttøkugjald | 0 | 2.415.012 |
| | Inntøkur, skúlaleikir | 1.118.615 | 1.004.528 |
| | Samstørv | 280.000 | 150.000 |
| | Ítróttavedding | 8.461.000 | 8.572.000 |
| | ONF | 500.000 | 500.000 |
| | Aðrar inntøkur | 32.053 | 56.665 |
| | | **27.291.668** | **27.848.205** |
| **2.** | **Antidoping** | | |
| | Dopingroyndir, fundir v.m. | 296.152 | 152.621 |
| | Dopingroyndir, herundir løn | 257.976 | 246.108 |
| | Avsett, Antidoping | -54.128 | 101.271 |
| | | **500.000** | **500.000** |
| **3.** | **ONF** | | |
| | ONF | 356.733 | 543.361 |
| | Løn | 100.000 | 163.479 |
| | | **456.733** | **706.840** |

| | | 2024<br>kr. | 2023<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **4.** | **Felagsútreiðslur** | | |
| | Regulering MVG part, netto | -151.849 | 0 |
| | Ferðing og koyring | 4.608 | 2.069 |
| | Norðurlandafundir | 27.372 | 58.182 |
| | Felags limaskipan | 58.060 | 0 |
| | Alheimsfundir | 0 | 28.330 |
| | Oyggjaleikir | 77.343 | 2.893.990 |
| | Breiddarpuljan | 206.499 | 0 |
| | Íðkanarnevnd | 97.046 | 73.116 |
| | Felagstiltøk | 300.496 | 358.306 |
| | Ítróttafagnaður | 540.517 | 801.331 |
| | Skeiðsútreiðslur | 91.487 | 72.114 |
| | Gávur og graveringar | 30.238 | 93.112 |
| | Skeið og ráðstevnur | 24.624 | 0 |
| | Starvsnevndarfundir | 23.124 | 55.382 |
| | Tryggur ítróttur | 31.564 | 0 |
| | Umboðsting og aðalfundir | 83.962 | 114.021 |
| | Limagjøld til felagsrakstur | 18.939 | 18.912 |
| | Føroyaleikir | 0 | 101.583 |
| | Skúlaleikir | 1.118.615 | 1.037.658 |
| | | **2.582.645** | **5.708.106** |

| | 2024 kr. | 2023 kr. |
|---|---|---|

## 5. Umsiting av ÍSF-húsinum

| | 2024 kr. | 2023 kr. |
|---|---|---|
| Viðlíkahald | 4.950 | 131.481 |
| Húsaleiga | 427.100 | 124.072 |
| El og hiti | 36.651 | 79.176 |
| Trygging | 5.035 | 7.108 |
| Reingerð og vask | 86.727 | 90.021 |
| | **560.463** | **431.858** |

## 6. Skrivstovuútreiðslur

| | 2024 kr. | 2023 kr. |
|---|---|---|
| Skrivstovuhald | 59.123 | 72.606 |
| Postgjald | 2.068 | 2.757 |
| Lýsingar | 14.959 | 1.777 |
| KT, Tól og innbúgv | 79.315 | 132.864 |
| Telefon og internet | 49.358 | 52.818 |
| Bókhald og roknskaparhjálp | 27.300 | 30.318 |
| Grannskoðan og sakførarakostnaður | 24.375 | 35.800 |
| Konsulenthjálp | 44.000 | 43.750 |
| Heimasíða | 17.387 | 11.717 |
| | **317.885** | **384.407** |

## 7. Starvsfólkakostnaður

| | 2024 kr. | 2023 kr. |
|---|---|---|
| Lønarendurgjald, starvsnevnd | 45.000 | 115.261 |
| Løn | 1.660.660 | 1.474.688 |
| Alm gjøld | 141.681 | 135.701 |
| Eftirlønargjøld | 313.288 | 342.717 |
| Trygging av starvsfólki | 23.064 | 7.765 |
| | **2.183.693** | **2.076.132** |

Umframt lønarendurgjald til starvsnevndina á kr. 45.000, hava starvsnevndarlimirnir fingið løn frá Ítróttavedding á kr. 190.200 í árinum.

Lønir bókaðar á ávís økir og eru ikki við í lønarnotuni.
Í árinum eru goldnar kr. 125.000 til Úrval, kr. 257.976 til Antidoping, kr. 728.916 til Skúlaleikir, kr. 33.306 til Ítróttarfagnað, kr. 373.825 til Oyggjaleikir 2027 og kr. 100.000 til ONF. Samlaðu lønarútgjaldingarnar í árinum eru kr. 3.324.684.

| | 2024<br>kr. | 2023<br>kr. |
|---|---|---|

## 8. Stuðul til sersambond

| | 2024 kr. | 2023 kr. |
|---|---|---|
| Fótbóltssambandið | 1.550.000 | 1.300.000 |
| Hondbóltssambandið | 2.674.901 | 2.523.716 |
| Flogbóltssambandið | 1.473.554 | 1.251.781 |
| Róðrarsambandið | 786.168 | 756.241 |
| Fimleikasambandið | 974.031 | 980.397 |
| Svimjisambandið | 1.067.724 | 1.080.082 |
| Judo Føroyar | 581.014 | 540.594 |
| Parasport | 743.066 | 839.721 |
| Badmintonsambandið | 724.920 | 769.692 |
| Borðtennissambandið | 532.580 | 543.687 |
| Sambandið Fyri Súkkling og Triathlon | 468.810 | 392.978 |
| Frælsur Ítróttur Føroya | 610.313 | 580.036 |
| Skjótisambandið | 549.078 | 519.095 |
| Bogaskjótisambandið | 504.020 | 490.583 |
| Kurvabóltur | 335.613 | 317.378 |
| Ríðisambandið | 535.208 | 486.019 |
| **Tilsamans** | 14.111.000 | 13.372.000 |
| Stuðul til menningarsambond | | |
| Boksisamband Føroya | 120.000 | 120.000 |
| Føroya Seyðahundafelag | 110.000 | 110.000 |
| Taekwondasamband Føroya | 130.000 | 130.000 |
| Billiardsamband Føroya | 50.000 | 50.000 |
| Golfsamband føroya | 60.000 | 70.000 |
| Styrkisamband Føroya | 110.000 | 116.535 |
| Tennissamband Føroya | 120.000 | 120.000 |
| Dartsamband Føroya | 130.000 | 130.000 |
| Poolsamband Føroya | 20.000 | 0 |
| Afturført stuðul til ser- og menningarsambond | -50.000 | -46.535 |
| **Tilsamans** | 800.000 | 800.000 |
| Útlutaður stuðul tilsamans | 14.911.000 | 14.172.000 |

| | 2024 kr. | 2023 kr. |
|---|---|---|
| **9. Stuðul til altjóða kappingar** | | |
| Dartsambandið | 92.955 | 63.025 |
| Hondbóltsambandið | 806.953 | 474.774 |
| Styrkisamband Føroya | 200.479 | 0 |
| Flogbóltsambandið | 1.042.393 | 829.860 |
| Badmintonsambandið | 106.386 | 76.671 |
| Svimjisambandið | 150.100 | 111.560 |
| Skjótisambandið | 66.396 | 0 |
| Bogaskjótisamband Føroya | 112.508 | 0 |
| Taekwondosambandið | 84.882 | 16.990 |
| Róðrarsambandið | 5.139 | 26.841 |
| Seyðahundasambandið | 62.087 | 52.337 |
| Ríðisambandið | 144.254 | 70.327 |
| Fimleikasambandið | 150.020 | 127.168 |
| Avseting, netto | -574.552 | 1.350.447 |
| | **2.450.000** | **3.200.000** |
| **10. Stuðul til Úrvalsítrótt** | | |
| Hondbóltsamband Føroya | 520.000 | 700.000 |
| Styrkisamband Føroya | 225.000 | 115.000 |
| Svimjisambandið | 300.000 | 200.000 |
| Badmintonsamband Føroya | 20.000 | 0 |
| Bogaskjótisamband Føroya | 100.000 | 80.000 |
| Frælsur Ítróttur | 200.000 | 0 |
| Sersamband fyri Súkling og Triathlon | 100.000 | 0 |
| Fimleikasamband Føroya | 70.000 | 190.000 |
| Flogbóltsamband Føroya | 20.000 | 40.000 |
| Taekwondo | 75.000 | 250.000 |
| Lønar- og umsitingarkostnaður | 140.602 | 7.434 |
| Afturgoldin stuðul | -190.589 | -335.130 |
| Broytingar í avsetingum | 419.987 | -447.304 |
| | **2.000.000** | **800.000** |

| | 31/12 2024 kr. | 31/12 2023 kr. |
|---|---|---|
| **11. Kapitalpartar í atknýttum feløgum** | | |
| Útveganarvirði, primo | 50.000 | 50.000 |
| Tilgongd í árinum | 50.000 | 0 |
| **Útvegnarvirði ultimo** | **100.000** | **50.000** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **100.000** | **50.000** |

**12. Flutt úrslit**

| | 31/12 2024 kr. | 31/12 2023 kr. |
|---|---|---|
| Flutt úrslit primo | 7.511.618 | 8.792.363 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 361.196 | -1.280.745 |
| | **7.872.814** | **7.511.618** |

**13. Avsetingar**

| | 31/12 2024 kr. | 31/12 2023 kr. |
|---|---|---|
| Avsett Antidoping Føroyar | 326.105 | 380.233 |
| Oyggjaleikir í Føroyum | 147.600 | 147.600 |
| Altjóða kappingar | 3.008.325 | 2.326.065 |
| Avsett samstørv | 580.000 | 0 |
| Stuðul til menningarsambond | 84.132 | 134.132 |
| Avseting til nýtt ÍSF hús | 2.818.258 | 2.818.258 |
| Avsett til skúlaleikir | 201.020 | 250.000 |
| | **7.165.440** | **6.056.288** |

## Uppskot til býti, lagt fyri aðalfundin hjá Ítróttasambandi Føroya 24. mai 2025

| | Uppskot 2025 | Býti 2024 | Býti 2023 | Býti 2022 | Býti 2021 | Býti 2020 | Býti 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fótbóltssamband Føroya** | 1.750.000 | 1.550.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.556.500 |
| **Hondbóltssamband Føroya** | 3.137.790 | 2.674.901 | 2.523.716 | 2.346.634 | 2.346.634 | 2.513.007 | 2.413.022 |
| **Flogbóltssamband Føroya** | 1.594.518 | 1.473.554 | 1.251.781 | 1.271.820 | 1.271.820 | 1.316.037 | 1.271.168 |
| **Róðrarsamband Føroya** | 891.683 | 786.168 | 756.241 | 678.423 | 678.423 | 752.067 | 778.953 |
| **Fimleikasamband Føroya** | 1.095.207 | 974.031 | 980.397 | 975.294 | 975.294 | 1.145.239 | 1.164.575 |
| **Svimjisamband Føroya** | 999.936 | 1.067.724 | 1.080.082 | 1.042.364 | 1.042.364 | 1.096.061 | 1.161.386 |
| **Judo Føroyar** | 569.809 | 581.014 | 540.594 | 558.103 | 558.103 | 539.473 | 518.306 |
| **Parasport Føroyar** | 780.144 | 743.066 | 839.721 | 838.038 | 838.038 | 909.612 | 820.447 |
| **Badmintonsamband Føroya** | 707.462 | 724.920 | 769.692 | 837.806 | 837.806 | 868.311 | 864.649 |
| **Borðtennissamband Føroya** | 543.202 | 532.580 | 543.687 | 501.615 | 501.615 | 510.935 | 485.106 |
| **Súkkling og Triathlon** | 563.520 | 468.810 | 392.978 | 366.984 | 366.984 | 83.883 | 467.320 |
| **Frælsur Ítróttur Føroya** | 671.580 | 610.313 | 580.036 | 550.527 | 550.527 | 566.406 | 563.724 |
| **Ríðisamband Føroya** | 586.879 | 535.208 | 486.019 | 491.534 | 491.534 | 522.416 | 517.060 |
| **Skjótisamband Føroya** | 583.573 | 549.078 | 519.095 | 491.074 | 491.074 | 500.876 | 481.541 |
| **Bogaskjótisamband Føroya** | 551.417 | 504.020 | 490.583 | 478.633 | 478.633 | 508.418 | 496.675 |
| **Kurvabóltur í Føroyum** | 384.280 | 335.613 | 317.378 | 300.000 | | | |
| **Menningarsambond** | 1.000.000 | 800.000 | 800.000 | 693.152 | 793.152 | 617.258 | 589.567 |
| | **16.411.000** | **14.911.000** | **14.172.000** | **13.722.001** | **13.522.001** | **13.750.000** | **14.150.000** |

Loysnir tel 214452

Ítróttasamband Føroya

Eystara Bryggja 30 / Postsmoga 223 / Tel 31 26 06 / isf@isf.fo / www.isf.fo